Eldrabólkurin 2002

# Álit um eldraøkið

- **Lýsing og meting av eldraøkinum**
- **Framtíðarskipan av eldraøkinum**
- **Dagføring av eldraøkinum**
- **Uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunu**

# Innihaldsyvirlit


## 1. Arbeiðssetningur 1

## 2. Inngangur
2.1 Viðmerkingar til arbeiðssetning 3
2.2 Innihald 3
2.3 Tilmæli til Landsstýrismannin í Almannamálum 4

## 3. Rættindi teirra eldru
3.1 Livir føroyska samfelagið upp til ST-grundreglur? 6
3.2 Lógarfest rættindi 7
3.3 Støðan á eldraøkinum 8

## 4. Lýsing og meting av eldraøkinum
4.1 Lýsing av røktarheimsøkinum 10
4.2 Meting av røktarheimsøkinum 14
4.3 Lýsing av eldrasambýlunum 16
4.4 Meting av sambýlisøkinum 19
4.5 Lýsing av Heimarøktini 20
4.6 Meting av Heimarøktini 23
4.7 Lýsing av Eldrarøktini í Sandoynni 25
4.8 Meting av Eldrarøktini í Sandoynni 28
4.9 Lýsing av Heilsuverkinum 29
4.10 Meting av Heilsuverkinum 31
4.11 Lýsing av fyribyrgjandi tænastum 31
4.12 Meting av fyribyrgjandi tænastum 34
4.13 Niðurstøða 35

## 5. Røktartørvskanning 37
5.1 Lýsing og viðger av tørvskanning 38
5.2 Kostnaðarmeting 43
5.3 Heimarøkt og onnur tilboð 59
5.4 Niðurstøða 63

## 6 Uppgávu og ábyrgdarbýti millum land og kommunur
6.1 Uppgávu og ábyrgdarbýti á eldraøkinum 65
6.2 Greitt uppgávu og ábyrgdarbýti 66
6.3 Fyrimunir og vansar við at leggja øki út til kommunurnar 68
6.4 Stødd á eindum 68
6.5 Fyritreytir fyri at eldraøkið kann leggjast út 69
6.6 Øki ið framhaldandi skulu at liggja hjá landinum 70
6.7 Niðurstøða 71

# 1. Arbeiðssetningur

Í oktober 2000 setti landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, ein arbeiðsbólk at lýsa og viðgera eldraøkið í síni heild.

## Arbeiðssetningur um eldraøkið

Spurningurin um framtíðar uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunu verður sum kunnugt nógv viðgjørdur í løtuni.

Eisini innan almannaøkið verður spurningurin nógv umrøddur, hvussu best verður skipað fyri, við tí høvuðsendamáli, at borgarin fær bestu og mest skynsamu tænastuna.

Landsstýrismaðurin vil við hesum heita á tygum um at velja eitt umboð í eina nevnd sum lands-stýrismaðurin setur at gera eina meting um, hvussu uppgávur og ábyrgdir - bæði fyrisitingarligar og fíggjarligar - ímillum land og kommunu **á eldraøkinum** kunnu verða býttar í framtíðini.

Umráðandi er, at arbeiðsbólkurin viðger eldraøkið í síni heild, og umframt at geva tilmæli til fíggjarlig og fyrisitingarlig viðurskifti eisini metir um, hvussu vit tryggja dygd í tænastuni, og hvussu vit skapa virðiligar karmar fyri eldra ættarliðið. At vit hava skipanir, sum byggja á meginreglur um virðing og møguleika fyri sjálvur at vera við at velja, innan teir karmar, sum samfelagið kann útvega.

Endamálið við arbeiðinum er at fáa til vega eitt gott grundarlag, sum tryggjar, at góðskan í eldrarøktini er á so høgum stigi sum møguligt, samstundis sum tær játtanir, sum ávikavist verða játtaðar av landi og kommunum, verða gagnnýttar á so skynsaman hátt sum møguligt .

Skotið verður upp, at arbeiðsbólkurin verður settur saman við umboðum fyri Almanna- og Heilsumálastýrið, Føroya kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Heimarøktina, einum umboði fyri røktarheimsleiðarar, og einum umboði fyri Landsfelag pensjónistanna.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum verður soljóðandi:

Heitt verður á arbeiðsbólkin um at lýsa eldraøkið sum heild, og hvussu tað kann skipast frameftir.
Spurningar, ið eiga at verða svaraðir, eru:

1. Hvussu tryggja vit umsorgan og røkt av gomlum, og hvussu skal ábyrgdin býtast millum landsmyndugleikar og kommunalar myndugleikar?

2. Hvussu skipa vit ellis- og røktarheimsøkið?

3. Hvussu skipa vit sambýlis- og vistarheimsøkið?

4. Hvussu skipa vit okkum viðvíkjandi bygging av eldraíbúðum?

5. Hvussu skipa vit dagtilhald o.a fyri eldri?

Miðast skal eftir, at uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýti fylgjast, tá ið avgerð skal takast um, hjá hvørjum uppgávan skal liggja. Tað er av stórum týdningi, at arbeiðsbólkurin metir um, hvussu vit forða fyri dupultumsiting og øðrum dupultum ella fleirfaldaðum fyriskipanum.

Tað, sum breið semja tykist vera um, er at virka verður fyri, at avstandur millum borgara og myndugleika er so stuttur sum møguligt, at borgarin kennir seg viðurkendan sum tann, ið best veit um egnan tørv, at borgarin veit um tey rættindi, sum hann hevur.

Miðað verður eftir, at tilmælið verður handað landsstýrismanninum áðrenn 1. februar ár 2001.

Almanna- og Heilsumálastýrið

Undirritað av Helenu D. á Neystabø

Í nevndina vóru eftir ynski frá landsstýriskvinnuni vald:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Karla Einarson | Landsfelag pensjónistanna. |
| 2. | Tordur Niclasen | Ráðið fyri Røktar- og ellisheimsleiðarar. |
| 3. | Jacob Vestergaard/Mia Petersen | Føroya Kommunufelag. |
| 4. | Jákup H. Foldbo | Heimarøktin & Serforsorgin. |
| 5. | Ida Sørensen | Heimarøktin og Serforsorgin. |
| 6. | Ása Olsen | Heimahjálparafelag Føroya |
| 7. | Eyðun Jensen | Kommunusamskipan Føroya |
| 8. | Kristjan Árnason | Almanna- og Heilsumálastýrið |
| 9. | Hilmar Høgenni | Løgmansskrivstovan |

Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund 24. oktober 2000. Eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni, varð Jákup H. Foldbo stjóri fyri Heimarøktina og Serforsorgina valdur sum formaður. Til skrivara var valdur Kristjan Árnason, fulltrúi í Almanna- og Heilsumálastýrinum. Í november 2001 var Eyðun Christiansen settur sum skrivari.

# 2. Inngangur

## 2.1 Viðmerkingar til arbeiðssetningin

Bólkurin hevur lagt stóran dent á at kanna tørvin á eldraøkinum og breitt at lýsa tænasturnar á økinum, sum tær eru skipaðar dag. Orsøkin er fyrst og fremst, at bólkurin hevur mett, at ein lýsing av núverandi støðuni og tørvinum á eldraøkinum er ein avgerandi fyritreyt, tá metast skal um, hvussu økið skal skipast í framtíðini, og hvussu vit tryggja eitt vælvirkandi eldraøki við fjølbroyttum tænastum.

Heldur minni dentur er lagdur á at viðgera, hvussu ábyrgdar- og uppgávubýtið ímillum land og kommunur skal skipast framyvir, tí hesin spurningur og spurningurin um, hvussu hetta skal setast í verk, er ein politiskur spurningur

Bólkurin hevur heldur lagt seg eftir at fáa til vega eina lýsing av tænastum og tørvi á eldraøkinum, fyri í einari meting av hesum at geva lands- og kommunalpolitikarum eitt grundarlag at standa á, tá avgerð skal takast um ábyrgdar- og uppgávubýti millum land og kommunur.

## 2.2 Innihald

Í kapitli 3 verður við atliti at ST - grundreglunum fyri eldrapolitikk í heiminum hugt at, hvørji lógarbundin rættindi tey eldru hava í Føroyum, og hvussu landsins myndugleikar røkja sínar skyldur mótvegis borgaranum.

Kapittul 4 er ein lýsing av, hvussu tær ymisku tænasturnar á eldraøkinum virka í dag. Hesin parturin lýsir, hvørjir trupulleikar eru, og hvørjar broytingar og ábøtur áttu at verið framdar undir verandi skipan.

Í kapitli 5 í tilmælinum verður tørvurin á eldraøkinum í Føroyum viðgjørdur. Bólkurin hevur gjørt eina víðfevnda tørvskanning, har mett verður um tørvin hjá umleið 1700 eldri fólkum, sum í dag eru á bústovni, fáa heimarøkt, ella standa á bíðilistum til bústovnar ella aðrar tænastur. Metingar verða gjørdar av tørvinum á tilboðum fyri alt landið í einum og fyri hvørt øki sær. Tørvurin verður framskrivaður samsvarandi framskrivingum av fólkatalinum, og lutfallið millum ung, vaksin og gomul verður lýst.

Kapittul 6 viðger ábyrgdar- og uppgávubýtið nú og framyvir millum land og kommunur. Víst verður á fyrimunir og vansar við at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Tað er breið politisk semja um at leggja so stóran part av eldraøkinum sum gjørligt út til kommunurnar. Í hesum sambandi vísa vit á tær fyritreytir og teir karmar, sum skulu til, áðrenn tað er ráðiligt at leggja eldraøkið út til kommunurnar.

Í kapitlunum 4, 5 og 6 verður endað við niðurstøðum, sum tilsamans geva tilmæli frá Eldrabólkinum. Tikið verður samanum niðurstøðurnar í partinum ”Tilmæli frá Eldrabólkinum” seinast í hesum kapitlinum.

Bólkurin hevur nakrar viðmerkingar til hugtøkini í álitinum.

Tá ið skrivað verður **eldraøki,** verður fyrst og fremst hugsað um eldraøkið sum málsøki, ið annaðhvørt land ella kommunur hava myndugleika yvir. Men eldraøkið er eisini eitt tænastuøki, ið umfatar allar tær tænastur, sum veittar verða eldri.

Tá ið skrivað verður **samskipan,** verður hugsað um eina samskipan av eldratænastum. Tað vil í høvuðsheitum siga ein skipan, har røktarheimstænasta, sambýlisrøkt, heimarøkt, og aðrar tænastur á eldraøkinum eru undir somu leiðslu, við møguleikum fyri liðiligari arbeiðsskipan og tvørfakligum samstarvi.

## 2.3 Tilmæli til landsstýrismannin í Almannamálum

1. Mælt verður til greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur við at leggja eldraøkið til kommunurnar at umsita. Ein rammulóg skal áseta skyldur hjá kommununum mótvegis eldra ættarliðnum. Eftir hjá almenna myndugleikanum skal liggja ein faklig eftirlitis- og ráðgevingaruppgáva.
2. Eldraøkið eigur at verða býtt upp í hóskandi kommunal Eldrarøktarøki, sum kommunur kunnu røkja sjálvstøðugt ella í samstarvið. Økini mugu ikki verða ov smá.
3. Fyri at tryggja góðsku í tænastuni, at játtan og starvsfólkaorka verður gagnnýtt til fulnar, verður mælt til at samskipa tænasturnar í Eldrarøktarøkjunum undir einari leiðslu og við felags visitatión til tænastur.
4. Við støði í tørvskanningini verður mælt til, at ítøkiligar raðfestingar í íløgum og rakstri verða gjørdar, soleiðis at tilboðini á eldraøkinum í nógv størri mun nøkta tørv brúkarans.
   - Tørvur er á 122 røktarheimsplássum og 119 plássum á heimi/deild fyri minnisveik
   - 75 eldri fólk við minni røktartørvi hava tørv á eldrasambýlisplássum
   - Heimarøkt, økisterapi, dagstovnatilboð og onnur fyribyrgjandi tilboð eiga at verða dagførd, soleiðis at eldri fólk veruliga kunnu verða sum longst í egnum heimi.
   - Mattænasta eigur at verða fyri øll eldri, ið ynskja tað, og koyritænasta fyri øll eldri, ið ikki kunnu nýta almenna ferðasambandið
   - Ein virkin bústaðarpolitikkur eigur at geva eldri fólki møguleikan til at flyta í vardar íbúðir ella eldraíbúðir.

   Bráðfeingistørvurin á røktarbúplássum kan tykjast møtimikil, men vónandi kan ein røð av fyribyrgjandi tænastum til heimabúgvandi, saman við betri bústaðarmøguleikum og koyritænastu, minka nakað um tørvin.
5. Tað eigur at verða raðfest frammaliga at útvega stovnspláss uttanfyri sjúkrahúsverkið til liðugt viðgjørd eldri við røktartørvi, soleiðis at heilsuverkið í størri mun kann útgreina, viðgera og veita uppvenjing til fleiri (eldri) sjúklingar.
6. Ein útleggingartilgongd má ikki forða fyri, at ein skipað útbygging, menning og samskipan av stovnstilboðum, heimarøkt og øðrum tænastum fer fram. Mælt verður til, at landsmyndugleikin í samráð við kommunalu myndugleikarnar leggur framtíðarætlanir hesum viðvíkjandi.

Umráðandi er, at landsmyndugleikarnir seta seg saman við kommunalu myndugleikunum fyri at avtala, hvussu ábyrgdar- og uppgávubýtið skulu verða og

hvørjar fakligar, fyrisitingarligar og fíggjarligar karmar framtíðar myndugleikin á eldraøkinum fær at virka undir. Tí uppgávan er stór og kostnaðarmikil, og fyritreytirnar hjá kommununum sera ymiskar at røkja hesa uppgávuna.

# 3. Rættindi teirra eldru.

Í eini roynd at seta umstøðurnar hjá teimum gomlu á dagsskránna, setti felagsskapur Sameindu Tjóða sær í 1982 fyri at leggja eina heildarætlan fyri eldrapolitikkin í øllum heiminum. Enn eru Føroyar ikki sjálvstøðugur limur í ST. Kortini eigur stórur dentur at verða lagdur á, at Føroyar fylgja grundreglunum hjá ST. Endamálið er at áseta nøkur altjóða viðurkend stevnumið, sum tryggja rættindi teirra eldru og javnstøðu teirra, á sama hátt sum alheims viðurkendi mannarættindasáttmálin hevur virkað í nógv ár.

ST-londini eru ikki bundin av at fylgja hesi heildarætlan, men Sameindu Tjóðir eggja limalondunum til at hava ávísar grundreglur í huga, tá ið eldrapolitikkurin verður lagdur til rættis.

ST- grundreglurnar* umfata:

- sjálvræði
- luttøku
- umsorgan
- sjálvsmenning
- virðileika

## 3.1 Livir føroyska samfelagið upp til ST-grundreglurnar?

Bólkurin metir, at fleiri av grundreglunum ikki eru uppfyltar í sambandi við politikkin á eldraøkinum í Føroyum í dag.

Tað er einamest í mun til partin um **umsorgan,** at føroyska samfelagið ikki tykist at røkja uppgávurnar nøktandi mótvegis teimum eldru borgarunum. Orsøkirnar til hetta eru:

- ov fá røktarheimspláss
- ov fá tilboð um uppvenjing og viðlíkahald av mistum førleika
- manglandi tænastuveitingar frá Heimarøktini
- ovbyrjan av teimum avvarðandi

Størsti trupulleikin er, at ov fá røktarheimspláss eru til gomul fólk, ið ikki longur megna eginumsorgan.

Í ST-grundreglunum stendur til dømis *”at eldri eiga at hava møguleika fyri at njóta nøktandi støði á stovnsumsorgan, sum bjóðar tryggleika, endurútbúgving, sosiala og sálarliga stimbran, í einum menniskjansligum og tryggum umhvørvi.”*

Henda reglan kann, við ónøktaða tørvinum á stovnsplássum í huga, ikki sigast at verða rokkin fyri eldraøkið í Føroyum.

---

* Fylgiskjal 1

Tørvurin á stovnsplássum leggur eitt stórt trýst á tey avvarðandi. Tey standa ofta hjálparleys við tí krevjandi uppgávu, sum tað er at vera um røktarkrevjandi eldri.

Samstundis er Heimarøktin noydd at raðfesta teir røktartungu brúkararnar framum teir léttaru brúkararnar, ið serliga hava tørv á fyribyrgjandi og viðlíkahaldandi tænastu, fyri at kunna vera sum longst í egnum heimi. Á henda hátt megnar Heimarøktin ikki í nóg stóran mun at røkja tær røktarheimsfyribyrgjandi uppgávurnar.

Tá hugsað verður um støðuna viðvíkjandi uppvenjing og eftirviðgerð í sambandi við sjúku, er ein stórur ónøktaður tørvur. Hóast fólk í ávísan mun fáa eftirviðgerð, manglar ofta ein viðlíkahaldandi tænasta, so haldast kann fast um vunna førleikan.

Støðan er ikki í samsvari við ST-grundreglurnar, ið nevna, at eldri eiga at hava "atgongd til heilsutænastur, ið hjálpa teimum at røkja ella vinna aftur best møguligu kropsligu, sálarligu og kensluligu vælveruna og at fyribyrgja ella seinka sjúku."

Tørvurin á tilboðum økir um vandan fyri, at **sjálvræði** verður tikið frá eldri fólki við stórum røktartørvi, tí umstøður ikki eru til at skapa eitt trygt umhvørvi, ið er lagað til teirra persónliga tørv. Tey mugu búgva heima ella hjá avvarðandi, sjálvt um umstøðurnar ikki eru til tað. Í ringasta føri kann hetta hava við sær beinleiðis brot á grundleggjandi mannarættindi, so sum rættin til frítt at flyta seg, tí dømi eru um, at eldri fólk í maktarloysi verða bundin ella innilæst.

Í mun til **luttøku** kunnu vit ikki beinleiðis siga, at ST-grundreglurnar ikki verða hildnar. Men vit eru eftirbátar í mun til okkara grannalond, tá tað snýr seg um møguleika teirra eldru, til á virknan hátt at taka lut í orðingini og útinnan av politikki, sum beinleiðis viðvíkur teirra vælferð.

Støðan í Føroyum kundi verið øðrvísi, um tey eldru í størri mun høvdu formaliseraðan rætt til at ávirka tann politikk, ið førdur verður á eldraøkinum.

## 3.2 Lógarfest rættindi

Um metast skal um rættindi teirra eldru til tænastur o.l. á eldraøkinum, eigur at verða hugt nærri at forsorgarlógini[*], ið er heimildargrundarlagið undir hesum tænastum.

Í § 1 í forsorgarlógini stendur, at "tað almenna hevur skyldu til at hjálpa ……."

Í § 32 í forsorgarlógini stendur "at Landsstýrið kann upprætta ella góðkenna stovnar" og tað er við heimild í § 32 at ellis– og røktarheim og sambýli verða rikin og sett á stovn.

Í § 32 A verður nevnt "at der kan ansættes hjemmehjælpere til at yde bistand i hjemmet". Tað er við heimild í §32A at Heimarøkt verður veitt..

Í mun til tørvin hjá eldri borgarum á umsorganartænastum hevur tað almenna skyldu til at hjálpa eftir § 1 í forsorgarlógini, sum er at meta sum ein endamálsorðing. Síðani

[*] Fylgiskjal 2

eru nærri ásetingar um, hvat slag av hjálp tað almenna kann veita, td. heimarøkt ella røktarheimspláss. Tað almenna hevur sostatt skyldu til at hjálpa, men í lógini er ikki nærri tilskilað, á hvønn hátt hendan hjálpin skal veitast. Hinvegin er tilskilað, hvussu tað almenna kann hjálpa.

Lógin kann sostatt ikki tryggja tí eldra rættin til undir ávísum umstøðum at fáa heimarøkt ella eitt røktarheimspláss. Her er politiska raðfestingin av játtan til tey ymisku økini avgerandi fyri, hvat tænastustigið verður.

Sæð í mun til støðuna á eldraøkinum í dag, er tað ein spurningur, um ásetingarnar í lógarverkinum eru ov veikar, og tí ein óbeinleiðis orsøk til støðuna.

## 3.3 Støðan á eldraøkinum

Bólkurin er á einum máli um, at viðurskiftini á eldraøkinum í dag ikki eru nøktandi. Hetta er partvís ein avleiðing av, at økið í fleiri ár ikki hevur fingið nóg stóra játtan til íløgur í nýggj stovnspláss og aðrar tænastur, og partvís ein avleiðing av, at samfelagsviðurskiftini (og harvið familjumynstrið) eru broytt, samstundis sum tað frá politiskari síðu ikki er lagt upp fyri hesi viðurskifti.

Tann stóri tørvurin á stovnsplássum til teir tyngstu brúkararnar er við til at avlaga alt eldraøkið.

Tørvurin á røktarheimsplássum er í dag nógv størri enn útboðið av røktarheimsplássum. Av hesi orsøk enda alsamt fleiri av teimum røktarheimskrevjandi aðrastaðni í skipanini, og fáa sostatt ikki tørv sín nøktaðan.

Ónøktaði tørvurin á stovnsplássum hevur við sær:

- at ein alt ov tung ábyrgd verður løgd á avvarðandi at eldri, ið eru røktarkrevjandi. Tey eldru kunnu standa á bíðilista í áravís til eitt røktarheims- ella sambýlispláss. Hesa tíðina liggur at kalla øll ábyrgdin av røktini og umsorganini til tann eldra, á familjuni/nærumhvørvinum. Hetta eru óvirðilig kor, bæði fyri tað eldra fólkið, og fyri teirra avvarðandi
- at avvarðandi verða noydd av arbeiðsmarknaðinum fyri at vera um eldri fólk
- at ein stórur partur av orkuni hjá heimarøktini fer til at veita tungum brúkarum í sambýlum, ella í egnum heimi, hjálp
- at eldri fólk, sum hava fingið viðgerð á sjúkrahúsi, og síðani hava tørv á einum stovnsplássi, verða liggjandi á sjúkrahúsinum, ofta leingi, meðan tey standa á bíðilista til eitt stovnspláss. Somuleiðis er stórur tørvur á plássum til eftirviðgerð og uppvenjing
- at deildin á Landssjúkrahúsinum, ið upprunaliga var ætlað til útgreinan og viðgerð av minnisveikum, nærum bert hevur fastbúgvandi røktartung fólk á deildini. Upprunaliga endamálið við deildini var, at fólk aftaná kanning og viðgerð skuldu útskrivast til heimið ella ávísast til eitt stovnspláss.

Tað tykist at vera eitt sindur ógreitt, hvør veruliga hevur ábyrgdina av, at trupulleikarnir á eldraøkinum verða loystir. Sum nú er, hava kommunurnar tikið stig til at fáa trupulleikarnar loystar, hóast uppgávan formliga liggur hjá landinum. Hetta

verður gjørt við at byggja sambýli, og í øðrum førum við at kommunur taka seg saman at byggja ellis– og røktarheim. Trupulleikin er, at útbyggingin ikki er samskipað, og vandi er tískil fyri, at vit fáa eina raðfesting ið ikki veitir trygd fyri, at játtanin á eldraøkinum verður gagnnýtt á besta hátt.

Samanumtikið er støðan á eldraøkinum í Føroyum í dag ikki nøktandi, og við atliti at teimum broytingum, sum fara at verða í fólkasamansetingini, har parturin av eldri fólki lutfalsliga fer at vaksa, kann tað gerast sera trupult at koma burturúr hesi støðu, um ikki okkurt munagott verður gjørt.

# 4. Lýsing og meting av eldraøkinum

Eldraøkið sum tænastuøki umfatar í stuttum allar tær tænastur og tey tilboð, sum veitt verða pensjónistum og eldri, ið farin eru av arbeiðsmarknaðinum.

Í stuttum kann sigast, at talan er um fyribyrgjandi, viðlíkahaldandi og viðgerandi tænastur og tilboð.

Her skal verða greitt frá teimum tilboðum, sum eru á eldraøkinum í dag. Talan er um búpláss, heimarøkt og aðrar tænastur til eldri. Greitt verður frá, hvørji tilboð talan er um, hvussu tilboðini verða fíggjað og fyrisitin, og hvør hevur atgongd til hesi tilboð. At enda verður gjørd ein meting av hvørjum einstøkum øki.

## 4.1 Lýsing av røktarheimsøkinum

Í løtuni eru 8 ellis- og røktarheim í Føroyum. Harumframt er ein royndarskipan í Sandoynni, sum samskipar røktarheimsrakstur og heimarøkt. Hendan skipan verður lýst fyri seg.

**Talva 5.1** Røktarheimseindir

| Stovnur | Bústaður | Játtan 2001 | Búpláss (umlættingarpláss) | Eindarkostn 2001 |
|---|---|---|---|---|
| Røktar- og Umlættingarheimið Lágargarður | Tórshavn | 18.922.960 | 46(2) | 1023 |
| Ellis- og Umlættingarheimið í Tórshavn | Tórshavn | 11.086.000 | 24(9) | 920 |
| Ellis-og Avlamisheimið í Vágum | Miðvágur | 13.068.825 | 32(2) | 1023 |
| Eysturoyar Ellis- og Røktarheim | Runavík | 20.163.330 | 51(3) | 1023 |
| Suðuroyar Ellis- og Røktarheim | Tvøroyri | 11.201.850 | 28(2) | 1023 |
| Norðoya Røktarheim | Klaksvík | 13.442.220 | 32(4) | 1023 |
| Norðoya Ellis- og Vistarheim | Klaksvík | 4.107.345 | 11 | 1023 |
| Landssjúkrahúsið – røktarsjúklingar | Tórshavn | 3.733.950 | 10 | 1023 |
| **Íalt** | | **95.456.480** | **234(22)** | **1010** |

Røktar- og umlættingarheimið Lágargarður og Eysturoyar røktar- og ellisheim eru lutfalsliga stórar eindir við uml. 50 búfólkum hvør, meðan eindirnar í Suðuroy, Norðoyggjum, í Vágunum og Ellisheimið í Havn eru heldur minni við góðum 30 búfólkum. Harumframt eru smáar eindir við uml. 10 búfólkum á Landssjúkrahúsinum (Røktardeildin) og á Norðoya Vistarheimi.

Í Norðstreymoy arbeiðir ein bygginevnd við bygging av einum røktarheimi við 32 búplássum, og ætlandi verður byrjað at gera byggibúgvið í ár. Eisini arbeiða kommunurnar í Eysturoynni við ítøkiligum ætlanum um at útbyggja Eysturoyar Ellis- og Røktarheim við 24 búplássum. Tórshavnar Kommuna er farin undir at byggja heim fyri minnisveik í Tórshavn, ið burturav skal hýsa 16 minnisveikum fólkum. Hetta er fyrsta heim, ið verður bygt til endamálið, og verður tað klárt at taka í nýtslu um árskiftið 2003/2004

**Lógarheimild og endamál:** Ellis– og røktarheim verða sett á stovn við heimild í løgtingslóg nr. 100 frá 2 mars 1988 um almenna forsorg í Føroyum[*].

Í § 32 stk. 4 stendur at ”Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um stovnssetan og rakstur av stovnum og sambýlum fyri persónar, ið ikki kunnu klára seg í egnum heimi vegna teirra heilsustøðu”.

Flestu heimini eru skipað sum sjálvsognarstovnar, við tí endamáli at reka ellis– og røktarheim. Í flestu endamálsorðingunum er tilskilað, at stovnarnir við góðkenning frá landsstýrinum kunnu átaka sær aðrar uppgávur innan almanna- og heilsurøkt. Øll heimini hava eina reglugerð, sum er góðkend av landsstýrinum, har karmarnir sum heild eru nærri ásettir.

Sum navnið sigur, var upprunaligi tankin við ellis- og røktarheimum at hýsa bæði hjálpnum og óhjálpnum fólki við ellisbrekum. Einasta heimið, har búfólkasamansetingin líkist tí upprunaligu, er á Tórshavnar ellisheimi, har ein partur av búfólkunum er partvíst sjálvhjálpin.

**Røktarheimsrøkt:** Tann stóri tørvurin á stovnsplássum hevur havt við sær, at tað nærum bert eru tey mest røktarkrevjandi, ið verða búfólk á ellis– og røktarheimum.

Ein vaksandi partur av hesum búfólkum eru fólk, sum eru minnisveik, og serskild deild til hesi er bert at finna á tveimum røktarheimum í landinum. Hetta er ein trupulleiki, tí tey, ið verða minnisveik, fáa ikki teirra tørv nøktaðan:

- tey minnisveiku órógva ofta restina av búfólkunum og øvugt
- tey minnisveiku hava serligan tørv á skipaðum og friðarligum umhvørvi í smærri eindum
- fleiri og væl útbúgvin starvsfólk noyðast at vera um hesi fólk, um góð umsorgan og neyðugur tryggleiki skal veitast teimum

Røktarheimsøkið er eitt starvsfólkatungt økið. Fyritreytin fyri dygdini og støðufestinum í røktini er fyrst og fremst starvsfólkið - og sjálvandi eisini hvussu arbeiðið er skipað. Røktarstarvsfólkið á heimunum er fyri tað mesta sjúkrasystrar, heilsurøktarar og sjúkrahjálparar. Býtið millum hesi er eitt sindur ymiskt frá stað til stað. Lítið útskifti er av starvsfólki, og tað hevur týdning fyri, at framhaldið í røktini gerst betri.

Fleiri av teimum størru heimunum nýta í dag "stakrøkt" sum arbeiðsskipan. "Stakrøktin" hevur til endamáls at vera umsorganarfremjandi og ábyrgdar/ávirkanarfremjandi

Meginreglan er, at 1 starvsfólk hevur “ábyrgd” av einum avmarkaðum tali av búfólki. T.d. kann talan vera um 4 búfólk um dagin og 8 um kvøldið. Hetta, at eitt og sama starvfólk er knýtt at nevndu búfólkum, ger at

- størri samanhangur er í røktini
- búfólkið fær betri røkt við øktari tryggleikakenslu

---

[*] Fylgiskjal 2

- búfólk verða betri nøgd (sum oftast)
- avvarðandi verða betri nøgd

Starvsfólk eru betri nøgd, tí slík arbeiðsskipan hevur við sær:

- størri ábyrgd
- størri ávirkan og avgerðarrætt

Tey flestu heimini hava eina væl útgjørda fysioterapi og kunnu veita bæði fyribyrgjandi og førleikafremjandi uppvenjingar. Í slíkum uppvenjingum er oftast tætt samstarv millum fysioterapi og ergoterapi, sum eisini finst á øllum heimunum. Ergoterapiin skipar eisini fyri *"sosialari samveru"* og ítrivi eftir førleika búfólksins.

Útboðið av fysio- og ergoterapi er tó ymiskt frá stað til stað og frá tíð til tíð. Høvuðsorsøkin er, at tað bert eru fá heiltíðarstørv og fleiri parttíðarstørv, samstundis sum fysioterapeuturin og ergoterapeuturin eru rættuliga "einsamallir" í sínum starvi. Tað kann vera trupult at fáa hesi størv sett og at fáa starvsfólkini at støðast.

Umframt at veita tilboð um hárfríðkan og fótarøkt, verður skipað fyri ymiskum tiltøkum alt árið. Tað verður roynt at fáa tiltøk, sum búfólk ikki kunnu fara út til, inn á heimið.

Lívið á einum røktarheimi er í stóran mun eitt *"felagslív"*. Tó verður mangastaðni skipað soleiðis fyri, at búfólk kunnu savnast í smærri eindum á heiminum. Her verður t.d. hugsað um hugnaliga dagliga samveru, eisini í sambandi við máltíðir. Heimini er opin, skilt á tann hátt, at avvarðandi og onnur kunnu koma at vitja "alt samdøgrið".

Nógv orka verður løgd í at veita neyðuga hjálp/røkt í mun til ynski/tørvin hjá tí einstaka. Sum heild kann sigast um røktina á einum røktarheimi, at hon ber brá av at vera ein heildarloysn ella pakkaloysn. Tá ið eldri fólk flyta inn á røktarheimseindirnar, fáa tey samstundis eina heildar- umsorgan, sum fevnir um alt frá sjúkrarøkt, mattænastu, fyribyrgjandi og førleikafremjandi venjing til hárrøkt og fótarøkt.

Orsakað av tí stóra bráðfeingistørvinum á røktarheimsplássum, eru tað nøkur røktarheimspláss, har tvey búfólk búgva saman á einari stovu.

**Dagstovnatilboð, mattænasta og venjingartilboð:** Røktar og umlættingarheimið Lágargarður er einasta røktarheim, sum í størri mun hevur nýtt karmarnar á røktarheiminum til eisini at veita heimabúgvandi brúkarum tænastu. Dagstovnurin á Lágargarði hevur síðani 1988 veitt dagtilboð til 30 heimabúgvandi eldri, ið koma saman til ítriv og stimbrandi samveru. Somuleiðis veitir køkurin á Lágargarði mattænastu til góðar 150 eldri borgarar í Tórshavnar kommunu. Frá oktober í ár verður økt um tilboðini á dagstovninum á Lágargarði við nøkrum plássum og venjingartilboðum til bólkar av eldri fólki við ymiskum *eldrasjúkum.*

Onnur røktarheim eru sum í minni mun veita tænastur til heimabúgvandi brúkarar, t.d. veitir Norðoyar Ellis- og Vistarheim mattænastu til 18 heimabúgvandi eldri fólk.

**Leiðsla og fyrisiting:** Felags fyri heimini er, at tey eru sjálvsognarstovnar, undantikið ellisheimið í Tórshavn, sum er kommunalur stovnur. Eitt stýri hevur ovastu leiðsluna á stovninum og er í flestu førum samansett av limum úr teimum ymisku kommununum í økinum.

Stýrið hevur fulla ábyrgd av øllum virkseminum á stovninum, men sum er, setir stýrið ein leiðara fyri stovnin, sum hevur dagligu leiðsluna við ábyrgd mótvegis stýrinum. Ymiskt er, hvussu virknan lut stýrini hava í leiðsluni av heimunum.

Á teimum stóru og miðalstóru heimunum er skipaður leiðslubygnaður, við deildarleiðarum á røktar-deildunum, køksfunktión við ábyrgdarhavandi økonomu, reingerðardeild, umsjónarmonnum og bókhaldarafunktión.

Røktar- og ellisheimið í Suðuroy og Norðoya Røktarheim liggja saman við sjúkrahúsinum í økinum. Stovnarnir eru felags um eitt nú køksfunktión, vaskarí, bókhald v.m., og verða útreiðslurnar til hesi øki býttar eftir einum ávísum frymli.

Stjórin í Heimarøktini og Serforsorgini hevur ræðisrættin á økinum. Í hesum sambandi hevur hann fíggjarliga, fyrisitingarliga og fakliga eftirlits- og ráðgevingarskyldu mótvegis røktarheimunum

**Fíggjarlig viðurskifti:** Landskassin fíggjar allan raksturin á Røktarheimsøkinum. Rakstrarjáttanin til hvønn stovnin verður útroknað í mun til ein dagsprís, sum verður settur fyri hvørt stovnspláss. Ellis- og umlættingarheimið í Tórshavn hevur búfólk, sum ikki eru so røktartung, og tískil er eindarprísurin eitt sindur lægri.

Við sama dagsprísi fyri hvønn brúkara er tænastustigið ymiskt alt eftir, hvussu rationelt raksturin av teimum ymisku heimunum kann skipast. Her vísa royndirnar, at tey størru heimini hava lutfalsliga meira játtan eftir til fyribyrgjandi og heilsufremjandi røkt og umsorgan enn tey miðalstóru og smærru. Hetta tí útreiðslurnar til náttarvakt gerast lutfalsliga minni á størru heimunum, og at annar rakstur kostar minni fyri hvønn brúkara.

Sambært løgtingslóg nr 108 frá 22. desember 1999[*], fellur pensjónin hjá pensjónistum, sum koma á røktar– og ellisheim, burtur. Harafturat skulu pensjónistar, ið hava aðra inntøku, rinda eitt ávíst gjald fyri uppihaldið. Gjaldið svarar til 10 % av skattskyldugari inntøku. Eina upphædd á 730 kr. um mánaðin, ið kann kallast ”lummapeningur”, varðveita búfólkini til rindan av útreiðslum í sambandi við persónligan tørv.

Landsstýrið kann sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001[**] um studningslán til ellis- og røktarheim, játta stuðul upp til 50 % av íløguni. Hin helvtin verður goldin av avvarðandi kommunu.

**Visitatión:** Fyri flestu røktarheimini er galdandi, at bert avlamis-, fólka- og einkjupensjónistar kunnu gerast búfólk. Tó kunnu undantøk verða gjørd við góðkenning frá Trivnaðarmálaráðnum

---

[*]Fylgiskjal 3
[**]Fylgiskjal 4

Endalig avgerð um upptøku á stovnin verður tikin av stýrinum, men stýrið kann seta eina upptøku-nevnd. Nevndirnar eru eitt sindur ymiskt samansettar á teimum ymisku stovnunum í landinum. Í flestu førum eru leiðarin á stovninum, ein kommunulækni, umboð fyri heimarøktina og heimasjúkrasystrarnar umboðað í upptøkunevndini. Í Suðuroy og í Vágum er stýrið virkandi upptøkunevnd.

Tá søkt verður um upptøku, fær umsøkjarin eitt umsóknarblað, har støðan hjá umsøkjaranum verður gjølla lýst. Upplýsingar skulu vera frá t.d. heimasjúkrasystur, heimahjálp og sosialráðgeva. Somuleiðis skulu upplýsingar vera frá lækna. Eisini verður heimavitjan gjørd, har frágreiðing grundað á upplýsingar frá umsøkjara og / ella avvarðandi verður skrivað.

Upptøkan fer vanliga fram á tann hátt, at umsøkjarar úr økinum, har røktarheimseindin liggur, hava framíhjárætt til búpláss, men tað kann koma fyri, at umsøkjari aðrastaðni frá við serligum bráðfeingistørvi verður tikin framum. Bert í einari reglugerð er beinleiðis ásett, at umsøkjarar í økinum hava framíhjárætt.

Upptøkunevndirnar virka sum er í hvør sínum lagi, og eingin beinleiðis samskipan av upptøku og bíðilistum við hini røktarheimini og eldrasambýlini fer fram.

## 4.2 Meting av røktarheimsøkinum

**Tørvurin hjá teimum minnisveiku:** Røktarheimini eru sum heild vælvirkandi røktareindir. Størsti dagligi trupulleikin fyri búfólk og starvsfólk á flestu heimum er, at minnisveik búfólk við einum serligum tørvi á bútilboði og røkt búgva saman og fáa somu tænastu, sum røktartung búfólk, ið eru við sítt fulla vit. Hetta er í dag størsta orsøkin til tvístøður og mistrivnað millum búfólk á røktarheimsøkinum.

Royndir eru við tveimum deildum fyri minnisveik, og staðfestast kann, at tað økir um trivnaðin hjá búfólkunum, tá tey búgva hvør sær og fáa røkt í mun til sín tørv. Kortini mugu vit gera okkum greitt, at tey minnisveiku hava ein serligan tørv á tryggleika, umsorgan og nærveru, ið krevur fleiri og betri útbúgvið starvsfólk. Tørvur er á hóskandi játtan til hetta endamálið.

**Kostnaðar- og tænastustigið:** Við tí í huga, at tað framyvir eins og nú fer at verða torført at fáa játtanina at røkka til í mun til tørvin á eldraøkinum, eigur útbyggjanin av røktarheimsøkinum at verða sera væl umhugsað.

Lutfalsliga stórar røktarheimseindir við 50 ella fleiri búfólkum, kunnu, um tær eru bygdar og verða riknar á skynsaman hátt, gerast bíligar í rakstri, soleiðis at ráð eisini eru til at veita fyribyrgjandi og heilsufremjandi tænastur. Í hesum høpi skal sigast, at stórar eindir ikki nýtast at gerast ópersónligir stovnar, men kunnu við nútíðar byggihátti skipast í smærri heimligar eindir.
Ein annar møguleiki er at byggja minni røktarheim, hesi vilja í flestu førum liggja tættari at heimaumhvørvinum hjá búfólkunum, men tey verða kostnaðarmiklari bæði at byggja og reka. Tá stig verða tikin til útbyggingar og nýbygging, er tað sera umráðandi, at myndugleikin, ið tekur avgerðina, eisini hevur umhugsað, hvussu langtíðar kostnaðar- og tænastustigið á stovninum verður.

**Visitatión:** Upptøka av búfólki og bíðilistar til upptøku eru týðandi stýringsamboð á røktarheimsøkinum, sum ikki verða nýtt til fulnar í dag. Øll heimini skuldu havt upptøkunevndir mannaðar við fakfólki, við felags treytum fyri upptøku, og bíðilistarnir skuldu verið samskipaðir fyri alt landið. Harumframt skuldu ein dagførdur bíðilisti fyri hvørt øki og ein fyri landið sum heild verið gjørdir, har tørvur brúkarans var útgreinaður og raðfestur. Tað hevði givið leiðslunum á røktarheimunum og heimarøktarøkjunum eitt betri stýringsamboð. Umsøkjarin hevði fingið eina tryggari viðgerð og greiðari boð, og almenningurin, fyrisiting og politikarar høvdu havt eitt betri grundarlag at mett um tørvin á økinum og at virkað eftir.

**Fíggjarlig viðurskifti:** Í sambandi við fíggjarlig viðurskifti hjá teimum einstøku eindunum, metir bólkurin tað vera óheppið, at raksturin hjá Norðoyar Røktarheimi og Suðuroyar Ellis– og røktarheimi eru samantvinnaðir við raksturin á sjúkrahúsunum. Greiður fíggjarligur og fyrisitingarligar skilnaður eigur at vera ímillum eindirnar, men eindirnar eiga sjálvsagt at samstarva, har tað er ein fyrimunur.

**Viðurskifti hjá búfólki:** Tað er ein fíggjarlig ómynduggerð av búfólkunum, at tey missa pensjónina. Vit áttu helst at havt somu mannagongd sum á sambýlunum, har búfólkini varðveita pensjónina, og sjálvi gjalda fyri uppihald.

Tað er heldur ikki nøktandi, at búfólk í ávísum førum búgva saman tvey og tvey. Ein loysn av hesum umstøðum eigur at verða raðfest frammaliga.

**Heilsufremjandi og røktarheimsfyribyrgjandi tænastur:** Tað er sera umráðandi, at karmarnir á røktarheimunum verða nýttir til fulnar og koma heimabúgvandi eldri fólki til góðar. Røktarheimini eiga, har tað er gjørligt, at verða latin upp fyri øðrum eldri fólkum við minni ella størri tørvi:

- dagstovnatilboð eigur at verða veitt teimum eldru, ið enn kunnu búgva heima, men hava tørv á stimbran, samveru og umsorgan um dagin
- mattænasta eigur at verða veitt øllum eldri fólkum, ið ynskja tað
- uppvenjingartilboð skuldu verið veitt á røktarheimunum ella úti hjá brúkaranum
- náttartilhald á einum bústovni eigur at verða eitt tilboð til eldri fólk, sum megna at vera heima um dagin, men sum av onkrari orsøk ikki megna at sova einsamøll um náttina.

Felags fyri tænastur sum hesar er, at tær økja um møguleikan hjá eldri fólki sum longst at liva eina sjálvstøðuga tilveru í egnum heimi.

## 4.2 Lýsing av eldrasambýlunum

Tey seinastu 10 árini hevur vøksturin á búplássum til eldri fólk, ið ikki longur klára seg í egnum heimi, undantikið røktarheimið Áargarður á Sandi, verið eldrasambýlispláss.

**Talva 4.2** Eldrasambýlið

| Navn á sambýli | **Øki** | **Búpláss** | **Árstal** | **Ognarformur** |
|---|---|---|---|---|
| Eldrasambýlið Oman Hoydalar | 1 | 9 | 1998 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið í Vestmanna | 2 | 7 | 1998 | Landið |
| Eldrasambýlið í Kollafirði | 2 | 7 | 1997 | Landið |
| Korndalsbýlið | 2 | 10 | 2000 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið á Skála | 3 | 9 | 1994 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið í Fuglafirði | 3 | 11 | 1984 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið í Klaksvík | 4 | 11 | 1998 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið í Hvalba | 5 | 9 | 2001 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið á Tvøroyri | 5 | 4 | 1998 | Kommunalt |
| Eldrasambýlið í Vági | 5 | 12 | 2000 | komm. Sjálvsognarst |
| **Tal av búfólki tilsamans** | | **89** | | |

*Eldrasambýlini í Sandoynni eru partur av Eldrarøktini í Sandoynni og verða viðgjørd aðrastaðni.

Nøkur sambýlispláss eru í væntu, og fleiri kommunur ætla at byggja eldrasambýli. Nýbygda eldrasambýlið í Kráarbrekku í Klaksvík við 16 búplássum er um at vera klárt at flyta inn í, og í Fuglafirði er eldrasambýlið Vesturstova víðkað við 6 búplássum. Í skrivandi løtu hava Eiðis, Runavíkar, Leirvíkar, Nes og Gøtu kommunur umsóknir inni hjá Trivnaðarmálaráðnum um stuðul til útbygging, nýbygging og keyp á eldrasambýlisøkinum.

**Lógarheimild og endamál:** Eldrasambýlini verða á sama hátt sum ellis– og røktarheim sett á stovn við heimild í § 32, stk.4, í løgtingslóg nr. 100 frá 2. mars 1988 um almenna forsorg í Føroyum[*] og sambært kunngerð nr. 71 frá 27 august 1998 um eldrasambýli[**].

Heimarøkt verður veitt í eldrasambýlunum við heimild í §32 A, í løgtingslóg nr. 100 frá 2 mars 1988[***] og sambært løgtingslóg um heimasjúkrasystratænastu[****].

**Endamálið** hjá sambýlum er sambært kunngerðini at hýsa fólkapensjónistum við ellisbrekum, ið hava tørv á starvsfólki at hjálpa teimum í dagligu tilveruni.

Í serligum førum kunnu undantøk gerast, ið loyva avlamispensjónistum upptøku.

Flestu reglugerðirnar fyri tey kommunalu sambýlini nevna heimini, sum eitt búpláss fyri pensjónistar, ið hava tørv á varandi røkt ella støðugari umsjón alt samdøgrið. Tað er tí ilt at skilja millum endamálið við einum sambýli og einum ellis– og røktarheimi.

---

[*] Fylgiskjal 2
[**] Fylgiskjal 5
[***] Fylgiskjal 2
[****] Fylgiskjal 6

Á hesum økinum er ein mismunur millum kunngerðina og tær flestu reglugerðirnar. Kunngerðin leggur upp til, at eldrasambýlini eru fyri lættari brúkarar, meðan reglugerðirnar í flestu førum áseta, at tey eru fyri brúkarar við stórum tørvi á røkt og umsorgan.

**Røktin í eldrasambýlunum:** Heimarøktin hevur ábyrgdina av røktini í eldrasambýlunum. Til d.d. hevur starvs-fólkasamansetingin í Heimarøktini verið: heimasjúkrasystrar og heimahjálparar, harav bert fáir av heimahjálparunum hava útbúgving. Seinasta árið eru kortini fleiri av heimahjálparunum uppskúlaðir til heilsuhjálparar, og nakrir heilsurøktarar eru eisini settir í starv.

Bert heima- og heilsuhjálparar og nakrir fáir heilsurøktarar arbeiða fast inni í sambýlunum. Arbeitt verður alt samdøgrið, og verður heimahjálpin veitt eftir somu heimild, sum tá fólk búgva heima, men hálpin er støðugari, tí fleiri fólk, ið hava tørv á røkt, búgva saman. Ein heimasjúkrasystir kemur regluliga inn í sambýlini. Hennara ábyrgd er at hava eftirlit við og at vegleiða soleiðis, at røktin í sambýlinum er á einum dygdargóðum stigi. Økisleiðarin hevur endaligu ábyrgdina av røktini í sambýlunum, og hevur regluligar starvsfólkafundir, har m.a røktin í sambýlinum verður viðgjørd.

Umhvørvið í einum sambýli er sera heimligt og líkist als ikki einum vanligum røktarheimi. Køkur og stova eru sum í vanligum sethúsum, búrúmini eru smá og í flestu heimum er eitt vesi við brúsu til 3 – 4 búfólk. Sambýlini eru hugnalig og vælegnað til tann bólk, tey vóru ætlaði at hýsa, nevniliga einsamøllum eldri fólki við ellisbrekum, sum ynskja at búgva saman við øðrum.

Tað, sum kemur til sjóndar, nú sambýlini eru ein veruleiki, er, at tey eldru, sum koma inn at búgva, í flestu førum eru so illa fyri og hava so stóran røktartørv, at tey mugu sigast at hoyra til á einum røktarheimi.

Tíverri eru umstøðurnar í sambýlunum at veita fólki við stórum røktartørvi eina góða tænastu ikki nøktandi, bæði hvat viðvíkur fysiskum karmum, fakførleikanum hjá starvsfólkunum og grundleggjandi fysio- og ergoterapeutiskum tilboðum..

Á eldrasambýlum gerast trupulleikarnir við búfólkasamanseting serliga týðiligir, tí sambýlini eru so smá. Sambýlisbúgvar við sera ymiskum tørvi eru í stóran mun noyddir at vera saman, uttan stórvegis møguleikar fyri at kunna vera fyri seg sjálvar.

**Fyrisiting:** Heimarøktin fyrisitur og hevur ábyrgdina av røktarstarvsfólkunum og røktini á heiminum. Sum sambýlisbúgvar búgva brúkararnir í egnum heimi og hava ábyrgdina av sær sjálvum.

Stjórin í Heimarøktini setir og loysir fastlønt starvsfólk í og úr starvi. Økisleiðarin setir og loysir úr starvi tímalønt starvsfólk.

Á teimum kommunalu sambýlunum hevur avvarðandi kommuna ábyrgdina av ognini og annars av rakstrinum av sambýlinum. Í nøkrum førum er nærri avtala gjørd um arbeiðsbýtið, har Heimarøktin umsitur partar av ábyrgdarøkinum fyri kommununa.

**Fíggjarviðurskifti:** Í sambandi við kreppuna fyrst í 90-árunum var tað ikki hildið ráðiligt at byggja fleiri kostnaðarmikil røktarheimspláss. Úrtslitið av hesum er, at

flestu sambýlini eru at meta sum stór sethús við plássi til millum 7 og 12 búfólk. Tó eru Eldrasambýlið í Vági og Eldrasambýlið undir Kráarbrekku í Klaksvík, sum er um at verða liðugt, í stóran mun bygd til at hýsa fólki við røktartørvi.

Landið tók saman við avvarðandi stig til nøkur av teimum fyrstu eldrasambýlunum, men sum frá er liðið, eru tað kommunurnar, ið hava tikið stig til bygging av eldrasambýlum, fyri at nøkta bráðfeingistørvin á røktarheimsplássum.

Landið hevur síðani 1998 latið stuðul til íløgur til eldrasambýli, eftir einari siðvenju um at stuðla við upp til 50.000 kr. fyri hvørt búpláss, tó í mesta lagi við ½ millión.

Á kommunalu eldrasambýlunum verður náttarvaktin og raksturin av húsarhaldinum goldin av kommununum, meðan Heimarøktin vegna landið ber útreiðslurnar av restini av røktini. Á eldrasambýlum undir landinum verða náttarvaktin og raksturin eisini goldin úr landskassanum.

Fyri tey kommunalu eldrasambýlini er galdandi, at um pensjónistar, sum ikki hava bústað í kommununi, koma í sambýlið, skal kommunan hjá viðkomandi pensjónisti gjalda partvíst til raksturin av eldrasambýlinum.

Útreiðslur til rakstur av einum sambýli við 10 búfólkum er uml. 2,5 mió kr. um árið, og svarar tað til ein dagsprís á slakar 700 kr. fyri hvørt búfólkið.

Hugsanin hevur verið, at sparingar kundu fremjast við at veita heimahjálparabrúkarum við røktartørvi tænastu á einum stað, men henda hugsan bygdi á eina misskiljing. Hædd varð ikki tikin fyri, at heimarøktin er ein vitjunartænasta, sum kemur í heimið og loysir ávísar uppgávur, og at brúkarin síðani má klára seg sjálvan restina av samdøgrinum, møguliga við hjálp frá avvarðandi

Tá samanum kemur, skulu eldri fólk við røktarheimstørvi hava røkt og umsorgan alt samdøgrið.

Búfólkini á eldrasambýlunum varðveita sína pensjón og rinda sjálvi 3.100 kr. um mánaðin fyri uppihald. Fyri hjún, har bæði eru pensjónistar, og har annað er á røktarheimi/eldrasambýli, verður gjaldið lækkað til 2100 kr. um mánaðin. Hevur pensjónistur aðra inntøku, verður goldið fyri heimahjálp sambært kunngerð um heimahjálp, tó í mesta lagi 1.118 kr. um mánaðin.

**Visitatión:** Ein upptøkunevnd er vald fyri hvørt eldrasambýlið. Í upptøkunevndini fyri tey kommunalu sambýlini sita: eitt umboð, tilnevnt av kommununi/komununum, sum er formaður, ein kommunulækni tilnevndur av Trivnaðarmálaráðnum, økisleiðarin í heimarøktarøkinum og eitt umboð, tilnevnt av røktarheiminum. Har einki røktarheim er í økinum, skal lokala heimasjúkrasystirin tilnevnast. Fyri sambýlini undir landinum er upptøkunevndin tann sama, við tí undantaki, at økisleiðarin er formaður, og at einki umboð er fyri kommununa/kommunurnar.

Upptøkunevndirnar taka avgerðir um fast búpláss, meðan umlættingarplássini sum oftast verða umsitin av økisleiðaranum í Heimarøktini

Búpláss og umlættingarpláss verða veitt eftir røktartyngd og umstøðunum hjá hvørjum einstøkum umsøkjara. Kortini er tað soleiðis á teimum flestu kommunalu eldrasambýlunum, at eldri fólk við røktartørvi úr avvarðandi kommunu hava fyrsta rætt til upptøku, og síðani kunnu umsøkjarar úr øðrum kommunum koma upp á tal.

## 4.4 Meting av sambýlisøkinum

Útreiðslur og tænastustigið: Í dag eru tað tær einstøku kommunurnar, sum taka stig til bygging av eldrasambýlum og bera næstan alla íløguna. Hetta verður gjørt av neyð, tí landsmyndugleikarnir seinastu árini ikki hava raðfest útvegan av røktarheims- og sambýlisplássum. Tað skerst ikki burtur, at hetta hevur havt við sær ein óskipaðan politikk á økinum, og at tørvur nú er á at samskipa virksemið.

Eldrasambýlini eru í mun til røktarheimini ein bílig loysn fyri samfelagið, bæði í íløgum og árligum rakstri. Dagsprísurin fyri eitt eldrasambýlispláss er uml. 700 kr., meðan eitt røktarheimspláss kostar 1100 kr. Men ásannast má, at sambýlisloysnirnar ikki taka byrjunarstigið í tørvinum hjá brúkaranum á røkt og umsorgan. Groft sagt kunnu røktarheimsbúgvar og sambýlisbúgvar býtast í A og B brúkarar.

A brúkarin fær eitt røktarheimsbúpláss við røkt og umsorgan á einum hóskandi fakligum stigi, ið eisini fevnir um uppvenjing og viðlíkahald av førleika brúkarans.
B brúkarin fær eitt sambýlisbúpláss í nærumhvørvinum við røkt og umsorgan, har fakliga stigið ikki er nóg høgt, og tilboðið umfatar ikki uppvenjing og viðlíkahald av førleika brúkarans.

**Endamálið við eldrasambýlum:** Bólkurin metir, at tað er umráðandi at umhugsa, hvat endamálið við eldrasambýlunum skal vera. Eftir verandi leisti eru sambýlini ikki ein góð loysn til eldri fólk við tørvi á røktarheimsplássi av hesum orsøkum:

- røktartænasturnar í einum sambýli nøkta ikki í nóg stóran mun ymiska tørvin hjá røktartungum búfólkum
- fakførleikin hjá starvsfólkunum stendur, sum er, ikki mát við tørvin hjá búfólkunum
- hølisumstøðurnar í nógvum sambýlum eru als ikki hóskandi, tá røkt skal veitast røktartungum búfólkum
- búfólkasamansetingin er ov ymisk, samstundis sum felagshølini og búrúmini eru ov smá.

Ein háttur at loysa sambýlistrupulleikarnar er at broyta endamálið soleiðis, at búfólkini og búfólkasamansetingin hóska til umstøðurnar. Nøkur av sambýlunum kundu verið gjørd til heim fyri minnisveik og onnur, soleiðis at samansetingin av búfólki varð: búfólk við lættari tørvi og nøkur fá røktartung búfólk, ið ikki hava veikt minni.

Minnisveik fólk hava tørv á einum lítlum og tryggum umhvørvi, og tað eru treytir, sum sambýlini lúka. Eisini hava tey tørv á starvsfólki við serligum førleika og hugi til at vera um minnisveik fólk.
Á verandi eldrasambýlum verður torført at tillaga hølisviðurskiftini til røkt av fysiskt røktarkrevjandi búfólkum, men um meginparturin av búfólkunum telur búfólk við

lættari røktartørvi, verða møguleikarnir fyri trivnaði og góðari røkt og umsorgan størri.

Vansin við einari aðrari búfólkasamanseting enn teirri verandi, har búfólkini koma úr nærumhvørvinum, er, at fólk í størri mun skulu flyta úr nærumhvørvinum fyri at fáa tørvin nøktaðan. Hesin vansi verður tó útjavnaður av øktu møguleikunum fyri trivnaði, røkt og umsorgan.

Verður hinvegin avgjørt at halda fast um verandi endamál og búfólkasamanseting, skal tað gerast greitt, at krøvini til bústaðarviðurskiftini og starvsfólkasamansetingina eru nøkur heilt onnur enn í dag. Tá er tað eitt krav, at hvør hevur sína lítlu íbúð, og at felagshøli eru, har ymiskir bólkar hava møguleika fyri at vera saman. Somuleiðis verður neyðugt, at røktarstarvsfólkini hava betri fakførleika enn í dag, og at tilboð sum fysio- og ergoterapi verða ein partur av tænastuni í sambýlunum.

Umráðandi er, at upptøkan á sambýli/sambýlum og á røktarheiminum í einum ávísum øki verður samskipað, soleiðis at tað verður ein felags faklig upptøkunevnd, sum skipar fyri upptøkuni. Upptøkan hevði óivað verið smidligari bæði hvat viðvíkur raðfesting av umsóknum, boðum til brúkaran, og tá tað snýr seg um at finna pláss til búfólkini eftir teirra røktartørvi.

## 4.5 Lýsing av Heimarøktini

Heimarøktin er skipað í 6 sjálvstøðug øki, sum umfata heimarøkt til heimabúgvandi brúkarar og brúkarar, ið búgva á eldrasambýlum. Eldrasambýlini eru umrødd, og nú skal heimarøktin til heimabúgvandi brúkaran umrøðast.

**Talva 4.3** Heimarøktarøkini

| Heimarøktarøki | Rakstur 2001 | Brúkarar | Sambýlispláss |
|---|---|---|---|
| Øki 1. Heimarøktin í Suðurstreymoy | 19.100.000 kr. | 357 | 19 |
| Øki 2. Heimarøktin í Vágum/Norstr./Norðeyst. | 16.800.000 kr. | 161 | 24 |
| Øki 3. Heimarøktin í Eysturoy | 16.200.000 kr. | 205 | 20 |
| Øki 4. Heimarøktin í Norðoyggjum | 11.300.000 kr. | 141 | 11 |
| Øki 5. Heimarøktin í Suðuroy | 14.200.000 kr. | 175 | 25 |
| Fyrisiting | 2.200.000 kr. | | |
| Tilsamans | 79.800.000 kr. | 1039 | 89 |

**Lógarheimild og endamál:** Heimarøktin sum hugtak er ein samanrenning av tveimum veitingum, nevniliga heimasjúkrarøkt og heimahjálp.

- Heimahjálp verður veitt við heimild í: § 32 A í løgtingslóg. nr. 100 frá 2. mars 1988 um almenna forsorg í Føroyum.[*]
- Lógargrundarlagið undir arbeiðinum hjá heimasjúkrasystrunum er § 1 í løgtingslóg nr 88 frá 6. juni 1997 um Heimasjúkrasystratænastuna.[**]

Endamálið er við miðvísari heimatænastu, umsorganar-, heilsu- og sjúkrarøkt at miða ímótí at stuðla brúkaranum, og at gera tað møguligt hjá honum at búgva sum longst heima í best møguligum umstøðum, um tað er heilsuliga og samfelagsliga ráðiligt.

Visitatión: Heimarøktin veitir tænastur til fólk, sum búgva heima. Grundleggjandi fyri tænastuna er, at starvsfólkini bert gera tað, sum brúkarin ikki megnar sjálvur.

Tann, ið heldur seg hava tørv á hjálp, kann venda sær til økisskrivstovuna hjá Heimarøktini. Heimarøktin vitjar síðani heimið og metir um tørvin.

Hvussu nógv heimahjálp verður veitt, er treytað av:

- hvat brúkarin sjálvur megnar
- um onnur, sum kunnu hjálpa til, eru í húsinum
- um tað eru avvarðandi ella onnur, sum kunnu rætta eina hjálpandi hond.

Í hvørjum einstøkum føri verður avtala gjørd um, hvørjar uppgávur Heimarøktin átekur sær í heiminum, og hon verður endurskoðað við jøvnum millumbilum.

Snýr umsóknin seg um praktiskar tænastuveitingar, kann eftirlitskvinnan í økinum gera heimavitjan. Er talan um sjúku ella brek, ið krevja persónliga røkt ella sjúkrarøkt, er tað økisleiðarin, varaleiðarin ella ein av heimasjúkrasystrunum, sum fer á heimavitjan.

Heimasjúkrarøkt umfatar smb. kunngerð um heimasjúkrasystraarbeiði:

- sjúkuviðgerð, uppvenjing, umsorgan og almenna heilsuvegleiðing, sum hóskar til tørvin hjá sjúklinginum
- vegleiðing og hjálp, uppsøkjandi arbeiði, í samstarvi við læknaligan og sosialan serkunnleika, til persónin ella familjuna, sum hevur serligan tørv á tí
- sjúkufyribyrgjandi arbeiði

Heimahjálp umfatar:

- persónliga røkt
- matgerð – vørukeyp
- reingerð
- aðrar tænastur

Heimarøkt og Heimasjúkrarøkt verða, sum er, bert veittar um dagin og um kvøldið. Nú er tó samtykt at veita Heimarøktini eina eykajáttan í ár at seta í verk døgnrøkt. Ætlanin er, at døgnrøkt skal setast í verk í øllum heimarøktarøkjum frá 1. okt. 2002. Tænastustigið í Heimarøktini verður munandi betri, tá døgnrøktin verður veruleiki. Hon fer at gera umstøðurnar hjá eldri fólki at vera heima tryggari, og fer eisini at geva

[*] Fylgiskjal 2
[**] Fylgiskjal 6

sjúkum fólki, sum hava tørv á røkt alt samdøgrið, ein møguleika at velja at verða heima heldur enn at liggja á sjúkrahúsi.

**Heimarøkt og røktartørvur:** Fleiri brúkarar í heimarøktini hava røktarheimstørv, men eru heima, tí stovnspláss ikki eru til taks. Hetta eru brúkarar, sum hava varandi tørv á hjálp frá øðrum persóni, fyri at nøkta grundleggjandi tørv, so sum at fáa mat og drekka, at lata seg í og úr, at halda seg reinan, at fáa fríska luft, at koma í og úr seingini o.s.fr. Meginparturin av arbeiðsorkuni í heimarøktini fer tí til hesar brúkarar.

Harumframt er tað eitt stórt tal av brúkarum, sum tørvar hjálp, stuðul og vegleiðing í longri ella styttri tíðarskeið til uppgávur, sum tey, orsakað av bráðfengis ella varandi sjúku, ellisbroytingum, ella sosialum umstøðum, ikki megna sjálvi. Umframt vegleiðing og stuðul eru hetta ofta praktiskar uppgávur so sum reingerð, innkeyp, matgerð, hjálp til bað o.a. Hetta slag av tænastuveitingum miðar ímóti, at fólk, hóast broyttar umstøður, kunnu megna sín gerandisdag í egnum heimi.

Tað er onki at taka seg aftur í, at heimarøktin er pírin, tá tað snýr seg um tænastuveitingar av hesum slag, tí raðfestingin av hesum uppgávunum er tengd at tí stóru røktartyngd, sum er í skipanini. Tænastan verður tí fyrst og fremst veitt teimum brúkarum, sum hava tørv á at fáa grundleggjandi fysisku tørvirnar nøktaðar. Sostatt kemur tænastan til teir lættaru brúkararnar, og til fyribyrgjandi tænastur í aðru røð.

Ein fylgja av hesum er, at ein ávís ónøgd er við skipanina. Sum heild ynskja nógvir brúkarar fleiri og longri vitjanir.

Heimarøktin er ein skipan, har starvsfólk koma inn til brúkaran at loysa eina uppgávu og síðani skulu víðari til næsta brúkara. Krøvini til arbeiðsskipanina eru høg, tí at tørvurin hjá brúkarunum og harvið krøvini til tænastuna alsamt broytast, og tí at brúkarar alla tíðina verða innskrivaðir og útskrivaðir í skipanini. Samskifti, samstarv og avtalur millum leiðslu, starvsfólkabólkar, brúkarar og avvarðandi eru tey mest týðandi amboðini.

Fyri at skapa eina trygga arbeiðsskipan, har tænastan røkkur brúkarunum, er arbeiðið hjá heimahjálparunum og heimasjúkrasystrunum skipað í bólkum, har hetta ber til.

Í heimahjálparabólkunum, sum arbeiða í einum ávísum øki, er alla tíðina møguligt at broyta dagligu arbeiðsætlanina hjá hvørjum einstøkum heimahjálpara. Hetta er neyðugt í mun til tær broytingar, sum støðugt koma fyri so sum broyting í tørvinum, nýggjar vitjanir, avlýsing av vitjanum, sjúkufrávera hjá starvsfeløgum o.fr.

Heimasjúkrasystraarbeiðið er eisini skipað í bólkar, men tær arbeiða í størri økjum og arbeiða meiri sjálvstøðugt enn heimahjálparar. Miðað verður ímóti tvørfakligum samstarvi, har heimahjálparabólkarnir hava sjúkrasystrar at venda sær til, sum hava kunnleika til teirra brúkarar, og førleika at vegleiða í røktarfakligum spurningum. Í flestu heimarøktarøkjum gongur hettar samstarvið hampiliga væl, men tørvur er á at arbeiða enn meira við hesum.

Yvirhøvur er arbeiðið skipað soleiðis, at brúkarin, so vítt gjørligt, fær hjálp frá sama heimahjálpara/sjúkrasystur allar dagar í vikuni.

Heimarøktin veitir tænastu um alt landið til uml. 1039 brúkarar. Tað ger, at Heimarøktin er eitt ógvuliga starvsfólkatungt øki.

Til fyri stuttum, tá Rundskriv um Heimarøkt varð avtikið, kundu bert heimasjúkrasystrar og heimahjálparar starvast í Heimarøktini, men nú eru dyrnar upplatnar fyri, at aðrir starvsfólkabólkar eisini kunnu starvast í Heimarøktini. Hetta er ein neyðug gongd, tí í samsvari við tann økta tørvin á røktarheimsplássum eru uppgávurnar í Heimarøktini broyttar frá, fyri ein stóran part at snúgva seg um tænastuveitingar av praktiskum slagi, til fyrst og fremst at snúgva seg um tungar røktarauppgávur. Tá uppgávan broytist, broytast eisini førleikakrøvini til starvsfólkini. Ein trupulleiki hjá Heimarøktini er júst at fáa nóg mikið av starvsfólki, sum hava neyðuga fakførleikan, at loysa uppgávurnar.

Eitt stig á leiðini er, at Almanna- og heilsuhjálparaskúli er settur á stovn, sum umframt eina 1-árs útbúgving til almanna- og heilsuhjálpara, eisini skipar fyri uppskúling av verandi heimahjálparum til almanna- og heilsuhjálparar.

Ymiskt er, hvussu gongur at nøkta starvsfólkatørvin, tað veldst um, hvar í landinum eftirspurningurin er, og hvørjum starvsfólkabólki tørvur er á, men staðfestast má, at tað yvirhøvur er trot á starvsfólki um alt landið. Útlitini fyri at tørvurin kann nøktast í framtíðini eru heldur døpur, m.a. tá hugt verður at miðalaldrinum hjá eitt nú heimahjálparunum, og tá hugsað verður um, hvussu nógv velja at starvast í Heimarøktini, og hvussu nógv velja at fara úr Heimarøktini í annað starv í framtíðini.

Fyrisiting – Meginskrivstovan: Stjórin fyri Heimarøktina og Serforsorgina hevur fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd av Heimarøktini. Fakligur leiðari hevur dagligu leiðsluna av Heimarøktini um hendi. Á meginskrivstovuni starvast harumframt:

- ein fíggjarfulltrúi, arbeiðsøkið er Heimarøktin og Serforsorgin
- tvey skrivstovufólk
- eitt roknskaparfólk

Meginskrivstovan avgreiðir fíggjarlig, fyrisitingarlig, og starvsfólkaviðurskifti fyri heimarøktarøkini

Leiðslan í heimarøktarøkjunum er skipað við økisleiðara og varaøkisleiðara, ið hava dagligu leiðsluna um hendi. Harumframt starvast eftirlitskvinnur í økjunum, og arbeiða tær mest við heimahjálparavirkseminum. Í hvørjum øki eru heimasjúkrasystrabólkar og heimahjálparabólkar, sum arbeiða saman í einum ávísum øki. Heimahjálparabólkarnir hava bólkaleiðara, sum á morgunfundum leiðir og býtir út arbeiðið.

## 4.6 Meting av Heimarøktini

Heimarøktin hevur tey seinastu árini verið og er framvegis undir einum stórum trýsti, tí:

- Heimarøktin saman við avvarðandi er einasti veitari av hjálp og røkt til eldri fólk í egnum heimi, sum í veruleikanum hava røktarheimstørv

- alsamt størri partur av arbeiðsorkuni hjá Heimarøktini fer til at veita hjálp á sambýlum við røktartungum búfólki.

Sostatt fer ein alsamt vaksandi partur av játtanini og heimarøktartænastunum til at nøkta tørvin hjá teimum heilt tungu brúkarunum, meðan teir minni tungu og løttu brúkararnir fáa ein alsamt minkandi part av heimarøktartænastunum og harvið av játtanini.

Hendan gongd hevur als ikki verið nøktandi, og hevur beinleiðis verið í andsøgn við virðisgrundarlagið í Heimarøktini ”sum longst í egnum heimi”. Skal Heimarøktin hava møguleika fyir at liva upp til endamálsorðingina, skal røktin í nógv størri mun vera av fyribyrgjandi slagi og veitast til teir brúkararnar, sum hava tørv á umsorgan, røkt, stuðli, og hjálp, men enn ikki hava røktarheimstørv.

Týðandi øki, sum orka ikki er til at menna undir verandi umstøðum, eru:

- fyribyrgjandi vitjanir soleiðis at heimarøktin í størri mun kann virka heilsufremjandi, og sostatt liva upp til virðisgrundarlagið
- stuðul og ráðgeving til minnisveik og teirra avvarðandi.

Døgnrøkt er, sum nevnt, ein týðandi partur av einari fyribyrgjandi tænastu, bæði tá viðvíkur tørvinum á búplássum til eldri og sjúkrahúsinnleggingar. Tað er tí eitt munandi framstig í sambandi við tænastuveitingina til tann einstaka brúkaran, men eisini eitt framstig í einum samfelagsligum høpi, at døgnrøkt verður sett í verk í næstu framtíð.

Heimarøktin er tann stovnurin, sum dagliga hevur samband við flest brúkarar á eldraøkinum, og í tillutanini av tænastum verður mett um støðuna og tørvin hjá hvørjum einstøkum brúkara, ið søkir um heimarøkt. Bólkurin leggur dent á, at "tillutan av tænastu" er tað týdningarmesta stýringsamboðið, bæði í heimarøktini, men eisini yvirhøvur í eldrarøktini. Tí tað er í tillutanini av tænastunum, at tænastustigið og kostnaðarstigið á veitingini verða stýrd. Áherðsla má tí leggjast á at menna hetta økið, samstundis sum neyðugt verður at staðfesta, hvat tænastustigið í heimarøktini skal verða.

Varhugin um, at nógvir brúkarar ikki eru nøgdir við tænastveitingarnar í Heimarøktini, má staðfestast. Ein máti er at gera eina landsumfevnandi brúkarakanning, har brúkarin fær høvi at gera vart við sítt nøgdsemi við tænastustigið í Heimarøktini. Úrslitið av kanningini hevði verið ein skjalprógvan av, hvørja tænastu og hvat tænastustig á veiting, brúkarin sjálvur metir, at hann hevur tørv á fyri at vera "sum longst í egnum heimi". Sostatt hevði brúkarakanningin verið eitt leiðbeinandi amboð fyri játtandi myndugleikar og leiðsluna í Heimarøktini.

Viðvíkjandi starvsfólkatrotinum í Heimarøktini nú og í framtíðini, metir bólkurin, at tað er alneyðugt, at ein samskipan av eldraøkinum fer fram sum skjótast, soleiðis at samlaði starvsfólkahópurin á eldraøkinum verður meiri fjølltáttaður, tá ræður um fakligan førleika. Á tann hátt kann arbeiðið skipast liðiligari, og starvsfólkaorkan og -førleikin brúkast miðvísari, soleiðis at tey røttu starvsfólkini verða brúkt til at loysa hóskandi uppgávur, bæði í heimarøktini og inni á bústovnunum.

Bólkurin metir eisini, at eitt slíkt tvørfakligt samstarv hevði havt við sær eina betri tænastu til brúkararnar, umframt at tað fyri starvsfólkini hevði verið avbjóðandi og mennandi og møguliga gjørt, at tað varð lættari at fáa starvsfólk at søkja (og støðast) á eldraøkinum. Hinvegin er onki at ivast í, at trot á m.a røktarstarvsfólki fer at verða ein trupulleiki, sum eitt so starvsfólkatungt øki sum eldraøkið má berjast við í framtíðini.

## 4.7 Lýsing av Eldrarøktini í Sandoynni

Eldrarøktin er ein royndarverkætlan, ið fevnir um eitt røktarheim, tvey eldrasambýli og heimarøktina í oynni.

**Talva 4.4** Eldrarøktin í Sandoynni

| Stovnur | Bústaður | Rakstur 2001 | Búpláss | Árstal | Brúkarar |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktaarheimið Áargarður | Sandur | | 12 | 1998 | |
| Eldrasambýlið Gerðisgarður | Skálavík | | 7 | 1998 | |
| Eldrasambýlið á Skerinum | Skopun | | 5 | 1999 | |
| Heimarøktin | Sandoy | | | | 44 |
| Tilsamans | | 8.300.000 kr. | 24 | | 68 |

Røktarheimið Áargarður er ætlað teimum mest røktarkrevjandi búfólkunum, meðan Sambýlið á Skerinum, sum frá er liðið, er vorðið eitt búpláss fyri røktartung, serliga tí fleiri minnisveik búfólk búgva á hesum sambýlinum. Í Sambýlinum í Gerðisgarði hava búfólkini verið lutfalsliga sjálvbjargin, men eru, sum frá er liðið, eisini vorðin røktarheimskrevjandi. Staðfestast kann tí, at hóast bústovnarnir vóru ætlaðir til ymiskar bólkar av búfólkum, ger ónøktaði tørvurin á røktar-heimsplássum, at allir bústovnarnir, sama hvat heitið er, hava sama viðskiftaskara.

Lógarheimild og endamál: Eldrarøktin í Sandoynni er ein royndarskipan, sett í verk við heimild í løgtingslóg nr. 63 frá 20. mai 1996.* Í 2001 varð royndartíðin við lóg longd við einum ári, fram til 31. december 2002.

**Endamálið** við royndarskipanini er:

At samskipa heimarøkt, - sambýli og røktarheimsfyrisiting og -rakstur
- at royna eina skipan har røktarheimsbúgvar varðveita sína pensjón

Samskipað eldrarøkt: Ein samskipan av heimarøkt, og røkt á bústovnum kann gerast á ymiskan hátt. Hon kann fevna frá tí ið verður rópt "total samskipan" sum er, tá ið starvsfólkini ígjøgnum arbeiðsdagin skifta ímillum at arbeiða úti í økinum og inni á stovninum, og til tað arbeiðsbýtið, ið vit vanliga kenna, har greiður skilnaður er ímillum starvsfólkabólkarnar, ið starvast ávikavist úti í økinum og inni á stovninum.

* Fylgiskjal 7

Tá ið bústovnarnir lótu upp í Sandoynni, var úrslitið, at røktartyngdin varð flutt frá "útiøkinum" inn á røktarheimið og sambýlini. Tískil bar stórt sæð til at røkja økið á sama hátt sum áður. Hvør heimahjálp hevði sínar brúkarar, sum hon vitjaði antin tá arbeiðsdagurin byrjaði ella tá arbeiðsdagurin endaði, og annars varð arbeitt á bústovninum. Hetta hevði við sær, at framhaldið og umsorganin vórðu varðveitt bæði í heimarøkt og á bústovni.

Men síðani er røktartyngdin munandi økt í økinum, og hetta hevur serliga havt við sær, at meira heimahjálp skal veitast í privatum heimum. Fyri at sleppa undan at bróta framhaldið í røktini, og fyri at fyribyrgja ørkymlan og strongd ímillum starvsfólkið, hevur verið skipað soleiðis fyri, at heimahjálparar í so stóran mun sum gjørligt hava sín arbeiðsdag antin inni á stovni ella úti í økinum.

Sum frá er liðið, eru stovnarnir vorðnir náttúrligir miðdeplar fyri røktina og tænastuna í tí økinum, har tey liggja.

- Røktarheimið Áargarður og brúkarar á Sandi
- Sambýlið á Skerinum og brúkarar í Skopun
- Sambýlið Gerðisgarður og brúkarar í Skálavík, Húsavík og Dali

Sostatt eru í veruleikanum 3 heimahjálparabólkar í Sandoynni. Tað ger, at hóast skifti er ímillum at arbeiða úti í bygdini og inni á stovninum, so er talan um ein lítlan bólk, bæði av brúkarum og starvsfólki, og hevur hetta við sær, at framhaldið í røktini er varðveitt. Eisini tá skift verður frá at vera heimabúgvandi brúkari til at flyta inn á ein av bústovnunum, er framhaldið betri, tí búfólkið og starvsfólkini frammanundan kenna hvønn annan.

Hvussu samskipanin verður fyriskipað, er í stóran mun treytað av, hvussu røktartyngdin er í økinum. Er røktartyngdin stór úti í økinum, er neyðugt at hava heimahjálp í økinum allan dagin. Er røktartyngdin hinvegin minni, kann heimahjálparin t.d. gera vitjanir á morgni og síðani fara inn á stovnin at arbeiða.

Fyri sjúkrasystrabólkin hevur skipanin eisini havt stórar broytingar við sær. Tær virka nú sum økissjúkrasystrar, ið bæði arbeiða inni á stovni og sum heimasjúkrasystrar. Ein heimasjúkrasystir arbeiðir úti í økinum gerandisdagar, og hevur samstundis ábyrgdina av sjúkrarøktini í sambýlunum, - á røktarheimseindini er altíð ein sjúkrasystir í dagvakt. Hetta hevur við sær, at sjúkrasystrarnar hava og kenna ábyrgd fyri allari sjúkrarøktini, bæði inni á bústovninum og úti í økinum.
Tá ið ongin sjúkrasystir er í kvøld og/ella náttarvakt, er altíð ein sjúkrasystir, sum hevur tilkallivakt. Tað er ein tryggleiki fyri aðrar starvsfólkabólkar, at tey altíð kunnu fáa fatur á eini sjúkrasystur.

Samskipanin hevur havt við sær, at starvsfólkabólkarnir: heimahjálparar, heilsuhjálparar, heilsu-røktarar og sjúkrasystrar, eru noyddir at samstarva í størri mun enn áður, um teir einstøku brúkararnar. Hetta hevur havt við sær, at sínámillum vegleiðing og fakligt kjak eru natúrligir partar av arbeiðsdegnum. At royndir og faklig vitan ígjøgnum samstarv gerast felags kunnleiki, gevur starvsfólkunum betri førleika, og er á henda hátt við til, at brúkarin fær eina betri tænastu.

Eftirmeting av royndarskipanini í Sandoynni vísir, at nøgdsemi ímillum bæði brúkarar og starvsfólk við skipanina er rættiliga stórt.

**Visitatión:** Ein trýmanna visitatiónsnevnd er sett av Trivnaðarmálaráðnum. Í visitatiónsnevndini sita økisleiðarin, kommunulæknin í økinum og ein økissjúkrasystir.

Ongin visitatiónsreglugerð er, men tey mest røktarkrevjandi verða um gjørligt visiterað til røktarheimið.

Samskipanin ger, at visitatiónin til bæði heimarøkt, sambýlini og røktarheimið er á einum og sama stað. Somuleiðis er øll visitatión í hondunum á fakfólki. Hetta veitir trygd fyri, at visitatiónin altíð tekur støðið í einum fakligum grundarlagi og í, hvussu røktartyngdin í samlaða økinum er. Tænastutilboðini í økinum eru somuleiðis samskipað, og tað ger, at brúkarin fær tað best møguliga tilboðið.

**Starvsfólk, leiðsla og fyrisiting:** Royndarætlanin í Sandoynni hoyrir fyrisitingarliga undir Heimarøktina og Serforsorgina. Virksemið er skipað soleiðis, at røktarheim, eldrasambýli og heimarøktin er *eitt* øki við *einum* leiðara, sum hevur dagligu ábyrgdina av at reka eldrarøktina í oynni.

Fyrisitingarligt arbeiði, sum at leggja vaktir til rættis, at sláa lønir inn, avgreiðsla av rokningum við meira, hevur tikið ov nógv av leiðsluorkuni, men við varaleiðarastarvinum, sum er komið ístaðin fyri eftirlitskvinnustarvið, er leiðsluorkan økt, so rúm eisini er fyri einum mennandi fakligum og fyrisitingarligum leiðsluarbeiði.

Í skipanini starvast: sjúkrasystrar, heilsurøktarar, sjúkrahjálparar, heilsuhjálparar, heimahjálparar, økonoma, ítrívsvegleiðari og húsavørður. Av tí at skipanin er ein royndarverkætlan, hevur eldrarøktin í Sandoynni, framum Heimarøktina annars, havt fríari teymar til setan av ymiskum starvsfólkabólkum. Starvsfólkasamansetingin hevur økt um tvørfakliga samstarvið og um møguleikan fyri at seta starvsfólk við røttum førleika til ta røttu uppgávuna.

Fyrimunirnir við hesi skipan eru fyrst og fremst, at tað er tann eini leiðarin, sum hevur ta fyrisitingarligu, fakligu og fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Hetta gevur leiðaranum møguleika at skipa økið á ein hátt, har játtanin verður gagnnýtt á skilabesta hátt.

**Útreiðslur og tænastustig:** Eldrarøktin í Sandoynni hevur sjálvstøðugt rakstrarstað undir høvuðskontuni "Røkt av eldri". Leiðarin hevur fíggjarligu ábyrgdina av økinum mótvegis stjóranum fyri Heimarøktina og Serfor-sorgina.

Røktartyngdin av brúkarunum á teimum 3 bústovnunum er nærum at meta við tyngdina á hinum røktarheimseindunum í Føroyum. Men útreiðslunar til tær 3 eindirnar eru væl minni í mun til hini røktarheimini. Hetta kemur partvíst av, at eindirnar í Sandoynni ikki hava somu tænastur at bjóða, sum hini røktarheimini hava, og partvíst av, at møguleikarnir fyri at gagnnýta arbeiðsorkuna og harvið játtanina á ein betri hátt, eru við eini skipan, sum teirri í Sandoynni.

Útrokningar vísa, at uml. ½ millión í lønarútreiðslum kundu verið spardar, um tær tríggjar eindirnar høvdu ligið á sama stað.

Sambært kunngerð nr. 167 frá 29. desember 1997[*] § 1 fáa fólkapensjónistar í royndarskipanini í Sandoynni framhaldandi útgoldið fólkapensjón, hóast teir flyta á ein bústovn at búgva.

Hetta er ein partur av royndarætlanini, at øll búfólk í skipanini, eisini tey á røktarheimseindini, varðveita pensjónina og gjalda fyri uppihald 3.100 kr. um mánaðin. Um hjúnarfelagin er heimabúgvandi, er gjaldið 2.100 kr. um mánaðin. Gjaldið fyri umlætting er 75 kr. um dagin frá fyrsta degi.

## 4.8 Meting av Eldrarøktini á Sandoynni

Royndarskipanin í Sandoynni hevur víst, at tað eru fleiri fyrimunir við einari samskipan av heimarøkt og røktarheimsfyrisiting og rakstri.

**Røkt og samskipan:** Ein samskipan gevur eina nógv liðiligari skipan av røktini. Í staðin fyri bert at tosa um at flyta brúkaran, fáa vit møguleika fyri at flyta starvsfólkið, og tað er ein týðandi liður í at veita eina skikkaða tænastu so nær brúkaranum sum gjørligt.

Samanhangur í røktini hevur stóran týdning fyri trivnaðin og umsorganina til einstaka búfólkið / brúkaran, og royndirnar í Sandoynni vísa, at tað ber til at sameina og skapa eina liðiliga skipan, uttan at samanhangurin í røktini verður brotin.

Skipanarliga er tað ein fyrimunur, at ein leiðsla hevur ábyrgdina av allari tænastu til eldri við røktartørvi. Uttan mun til um brúkarin hevur tørv á røktarheimsplássi, reingerð ella mattænastu, so er tað sama skipan og leiðsla, sum hevur ábyrgdina av tillutan og útinnan av tænastuni til einstaka brúkaran. Tað gevur eina betri stýring av skipanini, og ger tað einfaldari at skjalprógva fyri brúkarum og politikarum, hvørjar tænastuveitingar verða veittar, hvørjar ikki verða veittar og hvørjar møguliga áttu at verið veittar.

**Visitatión:** Ein felags visitatión hevur eisini fleiri fyrimunir. Fyri tað fyrsta er bert tann eina upptøkunevndin, sum hevur innlit í allar umsóknirnar og soleiðis kann skipa fyri, at fólk fáa tey tilboð, sum tey hava tørv á. Við einari samskipan fæst størri trygd fyri, at ein røtt raðfesting fer fram, tá mett verður um, hvørt viðkomandi skal hava búpláss á røktarheimi, í sambýli, fáa heimarøkt, koma á bíðilista o.s.fr.

**Fíggjarlig viðurskifti:** Tá tillutan og útinnan av tænastuveitingum og starvsfólkahópurin eru samskipað, fæst ein neyvari stýring og betri gagnnýting av orkuni í økinum, og sostatt verður raksturin bíligari. Men royndirnar í Sandoynni vísa eisini meirkostnaðin av at hava smáar eindir. Lógu eindirnar á einum stað, hevði peningur verðið spardur, sum í dag m.a. verður nýttur til tríggjar náttarvaktir og øktar rakstrarútreiðslur, sum standast av 3 bústovnum. Hesin peningur hevði kunnað rokkið

[*] Fylgiskjal 7

til eitt hægri tænastustig á bústovnunum og til fleiri og betri røktarheimsfyribyrgjandi tænastur.

Viðurskifti hjá búfólki: Fastbúgvandi á røktarheiminum og í sambýlunum varðveita sína pensjón. Royndirnar vísa okkum, at tað hevur stóran týdning fyri røktarheimsíbúgvarnar, at teir varðveita sítt peningaliga frælsi.
Hinvegin er av alstórum týdningi at staðfesta, hvørjar tænastur á bústovnunum skulu verða íroknaðar í uppihaldsgjaldinum, sum búfólkini gjalda, og hvørjar tænastur búfólkini sjálvi skulu rinda fyri.

Samskipan av eldrarøkt í øðrum pørtum av landinum: Í mun til eina samskipan av Heimarøkt og røktarheimsrøkt í øðrum pørtum av landinum verður mett, at her eru nógvir fyrimunir.

Men tað skal gerast vart við, at Eldrarøktin í Sandoynni er eitt lítið øki, og at einki røktarheim var í oynni frammanundan. Hetta hevur við sær, at nakrar av royndunum ikki beinleiðis kunnu nýtast aðrastaðni.

Í einari samskipan í øðrum pørtum av landinum eigur at verða farið varisliga fram, serliga tá talan er um at samskipa og møguliga umskipa arbeiðsgongdir á verandi stovnum, tað veri seg heimarøktarøkjum ella røktarheimum. Men samstundis verður mett, at tað framyvir verður neyðugt hjá leiðsluni at kunna nýta starvsfólkaorku og serkunnleika meira liðiliga, tá hugsað verður um, hvussu stórur tørvurin er á at økja tænastuveitingarnar til eldri fólk.

## 4.9 Lýsing av Heilsuverkinum

Heilsuverkið hevur ein týðandi leiklut, tá tað ræður um heilsuna hjá eldri fólki. Her verður ikki farið í smálutir, men týðandi virksemi og tørvandi tænasta skulu verða umrødd.

- Demensútgreiningardeildin við 12 plássum
- Uppvenjingardeildin við 8 plássum
- Røktardeildin við 10 plássum

Sjúkrahúsviðgerð av eldri fólki: Sum útgangsstøðið fáa eldri fólk, ið hava tørv á sjúkrahúsviðgerð, somu viðgerð sum aðrir sjúklingar. Kommunulæknin leggur fólk inn, og síðan tekur sjúkrahúsverkið yvir. Tey eldru fólkini verða útgreinað og fáa síðan viðgerð á skurð-, heiliráð- ella psykiatriskum deildum.

Tað eru fleiri sjúkur, ið gerast alt vanligari, sum fólk eldast, eitt nú demenssjúkur, osteoporesa, diabetes, giktasjúkur, apopleksia cerebri o.fl.

Aðrastaðni eru aldurstengdar sjúkur ein læknalig og sjúkrarøktarlig sergrein, sum er býtt upp í somatiska geriatri og gerontopsykiatri. Í føroyska sjúkrahúsverkinum eru hesar sergreinir ikki, og tískil verður onki serligt gjørt fyri henda stóra og alsamt vaksandi sjúklingabólk.

**Gerontopsykiatri:** Í álitinum um skipan av framsóknari psykiatri í Føroyum (januar 2002), verður mett: *"At teir sjúklingar, sum hava gagn av gerontopsykiatriskari*

*viðgerð, eru eldri fólk, sum hava eina umfatandi sjúkumynd við samanspæli millum psykiatrisk sjúkutekin og aðrar faktorar, sum demens, somatiska sjúku og viðgerð við fleiri sløgum av heilivági."*

Hetta eru sjúklingar, sum í dag mangla nøktandi viðgerðar- og røktartilboð. Í dag hava hesir sjúklingar næstan bert kommunulæknan, røktarheim, sambýli og heimarøktina at dúva uppá, og har eru neyðugur serkunnleiki, starvsfólkaorka og tilboð annars ikki til taks. Tískil verður tørvurin hjá hesum sjúklingum/brúkarum als ikki gingin á møti og tað ger m.a., at hesir sjúklingar "fylla nógv" í økinum, har teir eru.

**Demensútgreiningardeildin:** Vert er at nevna, at hagfrøðiliga sæð eru millum 350 og 410 føroyingar yvir 65 ár, sum eru minnisveik, og helvtin av teimum minnisveiku hava Alzheimers sjúku, har medisinsk viðgerð, givin í tøkum tíma, kann útseta sjúkueyðkennini, men tó ikki lekja hesa niðurbrótandi sjúku.

Endamálið við demensútgreiningardeildini er at útgreina og seta í verk viðgerð til fólk, sum eru minnisveik og tey sálarligu sjúkutekin, sum fylgja við, tá fólk gerast minnisveik. Men orsakað av stóra ónøktaða tørvinum á røktarheimsplássum, hevur ikki verið gjørligt at útskriva sjúklingarnar aftur, soleiðis sum ætlanin upprunaliga var. Tískil eru 11 av 12 sjúklingum fastbúgvandi á demensútgreiningardeildini. Sostatt fer nærum ongin útgreinan fram á deildini.

Tá talan annars er um psykiatrisk sjúk fólk, er í høvuðsheitum talan um tveir bólkar. Tað eru teir sjúklingar, har sjúkan "brennur út", sum tey eldast og sum kunnu nýta tey tilboð, sum í dag eru til taks á eldraøkinum, eisini um tey gerast so røktarkrevjandi, at teimum tørvar eitt búpláss. Hin bólkurin er teir psykiatrisku sjúklingarnir, sum umframt at tey eldast, framhaldandi hava tørv á serligum psykiatriskum tilboðum, bæði tá tað snýr seg um viðgerð, røkt, búumstøður og onnur tilboð.

**Uppvenjingardeildin:** Uppvenjingardeildin veitir rehabilitering til fólk, sum eru rakt av Apopleksi og Dissimenera Sklerosu. Viðgerðin umfatar intensiva uppvenjing av øllum teimum funksjónum, sum eru raktar av sjúkuni, og tað eru røktarstarvsfólk og fysio- og ergoterapeutar, sum í samstarvi geva hesa uppvenjing. Harumframt er talupædagogur frá Sernámsdeplinum knýttur at deildini. Miðal uppvenjingartíðin er tveir mánaðir.

Størsti parturin av hesum sjúklingum, sum hava tørv á uppvenjing, eru eldri fólk, og øll hava tørv á uppfylgjandi venjingartilboðum og viðlíkahaldi av vunna førleikanum.

**Røktardeildin:** Á røktardeildini eru 10 føst búpláss. Búfólkini búgva saman tvey og tvey á hvørjari stovu. Tvey vesi eru á deildini, harav annað hevur bað. Bert ein uppihaldsstova er, og á gongini er nógv ferðing fram og aftur í sambandi við uppvenjingardeildina. Røktarstarvsfólkini geva búfólkunum umsorgan og røkt, men búfólkini fáa ikki fysio- og ergoterapi. Flestu búfólkini á røktardeildini eru rakt av Apopleksia og eru liðugt viðgjørd frá sjúkrahúsverkinum, men kunnu ikki útskrivast, tí eingi røktarheimspláss eru.

## 4.10 Meting av heilsuverkinum

Mett verður, at sjúkrahúsini í størst møguligan mun skulu nýtast til útgreinan og viðgerð av sjúklingum og ikki til røkt og umsorgan av eldri fólki, sum hava tørv á røktarheimsrøkt ella líknandi tilboðum. Ein fyritreyt fyri hesum er, at tað verður raðfest frammaliga, at geva teimum, sum eru vorðin fastbúgvandi - á røktardeildini, demensútgreiningardeildini og øðrum deildum - ein bústað, sum nøktar tørv teirra.

Yvirhøvur má sigast, at sjúkrahús hvørki eru ætlað ella egnað sum fastur bústaður, men staðfestast má, at umstøðurnar, serliga á røktardeildini, eru vánaligar.

Tað er ikki nøktandi, at ongin sergrein innan eldrasjúkur er í sjúkrahúsverkinum, tí útgreinan og viðgerð av hesum sjúkum krevur serkunnleika. Í álitinum um Heildarpsykiatri verður gjørt vart við tørvin á gerontopsykiatriskum serkunnleika, og arbeiðsbólkurin er samdur í hesum, men leggur eisini áherðslu á, at tað er neyðugt við serkunnleika innan somatiska geriatri. - Er ikki møguligt at fáa føst læknastørv innan hesi øki, eigur møguleikin fyri at keypa sær konsulenttænastu á økinum, at verða royndur.

Tá tað snýr seg um bupláss til tann bólkin av eldri psykiatriskum sjúklingum, sum støðugt hava sertilboð fyri neyðini, metir bólkurin, at tey áttu at havt eitt tilboð á einum psykiatriskum røktarheimi. Hetta ella hesi røktarheim kundu verið miðsavnað, soleiðis at serkunnleikin og tilboðini høvdu verið so "optimerað" sum gjørligt. Bólkurin tekur sum so ikki støðu til, undir hvørjum stovni eitt slíkt røktarheim verður skipað, men møguleikarnir eru fleiri, t.d. Bústaðar- og virknisdeild fyri sinnisveik, Sjúkrahúsverkið ella undir samlaðu eldrarøktini.

## 4.11 Lýsing av fyribyrgjandi tænastum

Í høvuðsheitum er talan um:

- umsorgararbeiði fyri pensjónistar
- ansingarløn
- serflutningstænastu, sum MBF umsitur.
- vardar íbúðir

Umsorgararbeiði fyri pensjónistar: Heimildin at stuðla umsorgararbeiði er at finna í kunngerð nr. 49 frá 20. apríl 1994, um umsorgararbeiði fyri pensjónistar*.

Høvuðsendamálið við kunngerðini er at seta í verk tiltøk, sum stuðla pensjónistum at verða búgvandi í egnum heimi og gera teir virknar. Her kunnu nevnast tiltøk sum vitjunartænastur, mattænastur, pensjónistafimleikur, undirvísing, fyrilestrar, klubbarbeiði, tilhaldsstøð, dagtilhald, koyritænastu v.m. Eisini kann stuðul veitast til undirhaldandi tiltøk so sum útferðir, veitslur o.a

Umsorgararbeiði kann við góðkenning frá Almannastovuni setast í verk av felagsskapum, stovnum, kommunum ella øðrum. Almannastovuni er heimilað at gera av, um umsorgararbeiði kann setast í verk sum ein sjálvstøðug skipan ella tiltak.

* Fylgiskjal 8

Stuðulin, sum verður útgoldin í dag, kann bólkast í 3 partar:

1. Dagtilhald fyri pensjónistar
2. Mattænasta
3. Ymiskur studningur

Fleiri kommunur og felagsskapir hava ynski um at seta eitthvørt slag av umsorgararbeiði í verk. Hetta sæst eisini á teimum umsóknum, sum Almannastovan hevur fingið. Játtanin í 2001 var 3.665 tús. kr. Skal tørvurin nøktast, er neyðugt at seta eina munandi størri upphædd av.

**Dagtilhaldini:** Tað eru skipað 13 dagtilhald/frítíðarklubbar kring landið.

Dagtilhaldini hava í høvuðsheitum til endamáls at geva pensjónistum í kommununum møguleika og umstøður at hittast til fjøltáttað ítriv og virksemi, sum betra um lívsvirðið hjá tí einstaka pensjónistinum. Umframt at fáa stuðul frá landinum, eru hølini í flestu førum fingin til vega ókeypis frá kommununi.

**Mattænasta:** Í Tórshavn, Klaksvík, Vágum og í Suðuroy er skipað fyri mattænastu fyri heimabúgvandi pensjónistar. Tá talan er um mattænastu, er ikki talan um stuðul til mat, men um stuðul til koyring, einnýtisvørur o.a.tl. Pensjónisturin rindar fyri matin, og verður stuðul ikki veittur til hetta endamál. Tørvurin á mattænastum er í ávísum økjum væl størri enn tað samlaða útboðið av hesari tænastu. Orsøkin til at tørvurin á mattænastu ikki er nøktaður allastaðni er annaðhvørt manglandi koyritænasta ella ov vánaligar køksumstøður.

**Ymiskur stuðul:** Stuðul verður latin til at reka skrivstovuna hjá Landsfelag pensjónistanna. Felagið hevur 14 lokal feløg kring oyggjarnar, og hesi kunnu fáa stuðul frá landsfelagnum. Somuleiðis stuðlar felagið vitjunartænastuna og skipar fyri virksemi fyri pensjónistar. Umframt henda stuðul verður stuðul eisini veittur Blindastovninum og Deyvafelagnum.

Ansingarløn: Við heimild í løgtingslóg nr. 64 frá 1984[*], kann ansingarløn veitast til avvarðandi ella onnur, sum átaka sær at vera ansarar hjá einum heimabúgvandi fólki sum:

> "varandi ella yvir longri tíð skal hjálpast og vera undir annara eftirliti og umsorgan tilvildarligar tíðir av samdøgrinum, og ikki kann vera einsamallur meira enn einar 2 tímar í senn.".(kelda. Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima, Almannastovan juni 1997)

Almannastovan fyrisitur og játtar ansingarlønina. Mannagongdin er, at Almannastovan eftir at hava fingið umsókn um ansingarløn, biður økisleiðaran í tí Heimarøktarøki har brúkarin, sum hevur ansing fyri neyðini, býr, um at gera eina meting av tørvinum fyri ansing og, í øðrum lagi, at meta um førleikan hjá umsøkjaranum, at røkja uppgávuna. Eisini skal upplýsast, hvussu nógva hjálp brúkarin fær frá Heimarøktini og hvør hjálp, Heimarøktin metir, skal veitast, um

[*] Fylgiskjal 9

ansarin verður settur. Við støði í hesum upplýsingum viðger Almannastovan umsóknina.

Ansingarlønin svarar til einkjupensjónsupphæddina við uppískoytisveiting uml. 7000 kr. um mánaðin. Treytin er, at ansarin bert kann hava eitt 1/2 tíðar starv umframt ansingarlønina. Hetta merkir fyri flestu ansarar, at teir hava ein munandi inntøkumiss, um teir fara úr einum fullum starvi og velja at gerast ansarar.

Tá ein brúkari fær ansing, veitir Heimarøktin bert tænastu til sjúkrarøkt, persónligt reinføri og annað starvsfólkið, tá talan er um ein dupultan brúkara, ansarin er hitt fólkið.

At vera ansari er í nógvum førum eitt bæði likamliga og sálarliga tungt arbeiði, og ansarin er í høvuðsheitum bundin alt døgnið, hvønn dag, alt árið.

**Serflutningsskipan landsins:** Serflutningsskipan landsins er sambært reglugerð[**] ein flutningsskipan fyri brekað, ið hava tørv á serflutningi. Hetta eru fólk, sum:

- sita í koyristóli ella nýta hjálpitól, sum líkjast,
- av likamligum ella sálarligum breki støðugt hava brúk fyri hjálp,
- í avmarkaða tíð vegna sjúku ella skaða hava hendan tørv.

Skipanin verður fíggjað við 45 prosentum úr landskassanum, 45 prosentum frá avvarðandi kommunu og 10 prosentum frá brúkarunum. Skipanin virkar sum er í Tórshavn og í Klaksvík, men fleiri kommunur t.d. í Eysturoynni arbeiða við ætlanum um at fara undir slíka skipan.

**Vardar-/eldraíbúðir:** Sambært løgtingslóg nr. 111 frá 3. november 1988[*] eru vardar íbúðir ætlaðar at hýsa avlamisfólki, eldri fólki og fólki annars, sum mugu búgva á vardum støðum. Endamálið er at tryggja hesum eitt gott og hóskandi tilhald. Studningur verður latin til stovnar, sum hava til endamáls at byggja (stovnseta) og reka vardar íbúðir. Stovnurin skal vera sjálvsognarstovnur og hava viðtøkur, sum eru góðkendar av landsstýrinum. Í løtuni eru vardar íbúðir í Havn og í Vági.

Rakstrarstuðulin verður smb. § 5 í heimildarlógini bert veittur til útreiðslur, sum stava frá rentum og avdráttum av upprunaligu prioritetslánunum (upp í 50%). Á fíggjarlógini fyri 2002 eru 150 t.kr. avsettar til endamálið, og røkkur tað bert til verandi virksemi.

Húsalánsgrunnurin umsitur sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a.[**] Íbúðargrunnin, sum í 1998 varð stovnaður við einum stovnsfæi á 10 mió. kr. Íbúðargrunnurin kann veita lán upp til 20% av byggikostnaðinum av íbúðarbygging hjá einum sjálvsognarstovni ella felagi, har minst 15% av byggikostnaðinum skal vera eginpeningur. Dømi um íbúðarbygging har Íbúðargrunnurin er við, er byggingin av eldraíbúðum og eldrasambýlið undir Kráarbrekku í Klaksvík.

---

[**] Fylgiskjal 10
[*] Fylgiskjal 11
[**] Fylgiskjal 12

## 4.12 Meting av fyribyrgjandi tænastum

Felags fyri hesi tilboðini er, at tey á hvønn sín hátt hava stóran týdning fyri møguleikan hjá eldri fólki at vera í egnum heimi sum longst, men sum heild má ásannast, at tilboðini ikki eru ment samsvarandi tørvinum.

**Umsorgararbeiðið fyri pensjónistar:** Almannastovan kan eftir hesi kunngerð veita stuðul til ymiskt umsorgararbeiði, men fleiri av játtaðu tilboðunum halda áfram ár eftir ár og eiga tí at verða játtað sum rakstrarjáttan. Stuðul til mattænastu og dagtilboð eru tilboð, sum heldur áttu at verið játtað og umsitin saman við verandi tilboðum á eldraøkinum, tí tað ofta er í tilknýti til verandi virksemi, at ynski um at menna og økja um tænastu til eldri borgarar verða sett fram.

Tað er umráðandi, at avvarðandi myndugleiki framyvir fær møguleika at seta umsorgararbeiði í verk, tí heimild er eisini fyri at gera royndarverkætlanir. Sovorðnar eiga í nógv størri mun at verða gjørdar enn nú, fyri at royna nýggjar og mennandi loysnir á trupulleikum, sum vit ikki annars megna at loysa. Eydnast royndirnar væl, kunnu tær setast í verk sum føst tilboð og tænastur.

**Ansingarløn:** Tá hugsað verður um, hvat heimarøktartænasta, eitt røktarheimspláss ella eitt sambýlispláss kosta, má sigast, at ansingarlønin slett ikki stendur mál við ta tænastu, ansararnir veita. Ansingarlønin gevur heldur ikki fólki ein veruligan valmøguleika at velja at vera um sínar næstringar í longri ella styttri tíðarskeið – hartil er inntøkumissurin ov stórur.

Bólkurin metir, at ein partur av bráðfengis tørvinum á røktarheimsplássum, og teirri mannminkandi støðu, sum bæði brúkarar og avvarðandi ofta koma í, meðan bíðað verður eftir, at varandi loysnir á einum røktartørvi verða funnar, kundi verið loystur, um samsýningin fyri ansing varð hækkað munandi. Samstundis kann samfelagið stuðla tí góða siði, sum vit føroyingar enn í ávísan mun kenna til: at avvarðandi ynskja at ansa tí eldra ættarliðnum.

Nøkur beinleiðis loysn á trupulleikan viðvíkjandi tørvinum á stovnsplássum verður ansingarsamsýningin helst ikki. Tí sum oftast eru tað kvinnur, ið hava arbeiði innan umsorgarøkið, sum gerast ansarar, tað vil siga at t.d. Heimarøktin kann missa starvsfólk, ið røkkur fleiri brúkarum, til eina ansarauppgávu fyri eitt menniskja.

**Flutningstænasta:** Manglandi flutningstænasta er í dag ein fløskuhálsur, ið forðar øðrum tænastum í at virka til fulnar. Brúkarar við niðursettum rørsluførleika kunnu mangan ikki koma til ymisk tilboð – bæði tá talan er um frítíðartilboð og røktartilboð. Í hesum sambandi er tað ógvuliga umráðandi, at flutningstænastan verður ment. Umsitingin liggur sum er hjá MBF og tað átti at verið ein hóskandi loysn. Tíverri sær tó út til, at torført er at víðka serflutningstænastuna, so hon virkar í fleiri pørtum av landinum, møguliga tí, at bæði land og kommunur hava ábyrgdina av at fíggja flutningstænastuna - og bíða eftir hvørjum øðrum..

Ein góð flutningstænasta er ein avgerandi fyritreyt fyri, at eldri kunnu verða sum longst í egnum heimi, og samstundis hava møguleika fyri at gagnnýta tær tænastur og tey tilboð, ið eru í útboði á eldraøkinum.

Íbúðarviðurskifti: Flest øll eldri fólk sita sum frálíður í einum rættuliga stórum húsum, tá tey eldast. Børnini eru flutt heimanífrá, og møguliga er orkan til at halda eitt stórt hús ikki til staðar, hvørki til vanliga reingerð ella viðlíkahald. Nógv verður eisini tosað um eldraíbúðir og líknandi, men tað tykist, sum torført er at gera nakað við støðuna.

Umframt at fólk hava ilt við at sleppa sínum gomlu sethúsum, er ein orsøk helst eisini at finna í, at tað fyri eldri fólk kennist møtumikið at skulla selja sethúsini og keypa ella leiga eina íbúð. Við verandi íbúðarmarknaði ella neyð í Tórshavn og aðrastaðni í landinum, eiga avvarðandi myndugleikar at taka størri ábyrgd og stig til at fáa í gongd bygging av eldraíbúðum og vardum íbúðum, sum fólk, ið fáa pensjón ella avlamispensjón klára at gjalda. Ein háttur at gera hetta kann verða, at tað almenna er við til at hækka eginpeningin hjá sjálvsognarstovnum ella feløgum, soleiðis at lánibyrðan gerst minni og íbúðarleigan lægri.

## 4.13 Niðurstøða

Nú tá greitt er frá og mett er um ymiskar stovnar og tænastur á eldraøkinum stendur eftir, at eldraøkið sum heild er ov stirvið og óliðiligt. Eitt gott og stórt arbeiði verður gjørt. Men arbeitt verður í ov stóran mun í hvør sínum lagi, og spurnartekin verða ikki í nóg stóran mun sett við, um nakað kann gerast øðrvísi. Bólkurin metir, at ein samskipan av røktarheimsrøkt, heimarøkt og øðrum týðandi røktar-og heilsufremjandi tænastum, hevði verið eitt gott stig mótvegis einari vælvirkandi Eldrarøkt.

Røktarheim, Heimarøkt og aðrar røktarheimsfyribyrgjandi og heilsufremjandi tænastur eiga at verða samskipaðar í **Eldrarøktarøki.**

Samskipanin skal fremjast varisliga og við atliti at serligu umstøðunum í hvørjum øki og teimum stovnum, sum har eru.

Endamálið er ein meira liðilig skipan, har møguleikarnir fyri tvørfakligum samstarvi og kunnleikin hjá starvsfólkunum verða troyttir til fulnar, brúkaranum at frama. Skipanin skal bjóða eina røð av tænastum:

- Røktarheimspláss/deild fyri minnisveik
- Heim fyri minnisveik
- Sambýlispláss
- Dagstovnatilboð
- Náttartilhald
- Bráðfeingistilhald
- Økisterapi/uppvenjingarpláss
- Umlætting
- Mattænastu
- Flutningstænastu

- Heimarøkt (døgnrøkt)
  -praktiska hjálp
  -persónliga røkt
  -fyribyrgjandi vitjanir
- Dagtilhald
- Vardar-/eldraíbúðir

Hvørt eldrarøktarøkið eigur at verða skipað undir einari leiðslu við felags visitatión, og visitatiónsreglum stovnspláss og aðrar tænastur. Tað er umráðandi, at tænasturnar verða fjølbroyttar og, í so stóran mun sum gjørligt, kunnu lagast til tørv brúkarans.

Ein samskipan fer at virka mennandi og tryggja at játtan, starvsfólkaorka og tænastutilboð verða gagnnýtt til fulnar, men einki av hesum letur seg gera, um ikki nakað munagott verður gjørt fyri at nøkta bráðfeingistørvin á røktarheimsplássum og øðrum tænastum.

Ein grundleggjandi fyritreyt er, at ymisk stovnspláss og røktarstarvsfólk verða fingin til vega, ið nøkta tørv brúkarans á røkt og umsorgan. Samstundis er alneyðugt at menna aðrar tænastur, ið virka røktarheimsfyribyrgjandi og heilsufremjandi og sum í longdini helst eru minni kostnaðarkrevjandi fyri skattgjaldaran.

Í veruleikanum ynskja flest øll eldri fólk at vera heima so leingi tey á nakran hátt klára seg - við ella uttan hjálp. Bólkurin metir, at eldri fólk, ið hava tørv á hjálp og umsorgan, skulu hava veruligar valmøguleikar, hvørt tey vilja búgva heima, flyta í minni eldraíbuð/varda íbúð, ella búgva saman við øðrum í eldrasambýli. Tá eingin annar møguleiki er, eigur eitt hóskandi stovnspláss at verða útvegað innan eitt rímiligt tíðarskeið. Skal hetta gerast møguligt, krevst eitt hægri tænastustig, har fyribyrging og heilsufremjan eru í hásæti.

# Kap 5 Røktartørvskanning

Ein tann størsti trupulleikin tá støða skal takast til framtíðarskipan av eldraøkinum er, at vitanin um tørvin á økinum er ov lítil, umframt at henda vitan ikki er samskipað. Arbeiðsbólkurin hevur tí gjørt eina fakliga meting av tørvinum á umsorganar- og røktartænastum.

**Grundarlagið undir tørvskanningini** Tørvsmetingin er gjørd út frá tí fyritreyt, at tørvurin á røktar- og umsorganartænastum ikki er tann sami fyri øll gomul. Tvørturímóti er tørvurin sera ymiskur, og er tað tí neyðugt, at ymiskar tænastur verða bjóðaðar brúkarunum, og at hesar tænastur nøkta teirra tørv.

Grundsjónarmiðið í tørvsmetingini er, at røktar- og umsorganartilboð skulu nøkta tørv brúkarans, og at gomul eiga at fáa fyribyrgjandi uppvenjingar og viðlíkahaldstænastur.

Í arbeiðssetninginum verður sagt, at vit á eldraøkinum eiga at hava ”skipanir sum byggja á meginreglur um virðing og møguleika fyri sjálvur at vera við til at velja, innan teir karmar sum samfelagið kann útvega”. Um tilboðini í kanningini vóru partar av tænastuni á eldraøkinum, høvdu hesar meginreglurnar í størri mun verið galdandi

Tørvsmetingin er gjørd av fakfólki innan Heimarøktina og røktarheimsøkið, og er sostatt ein røktarfaklig meting. Leiðslurnar hava við hjálp frá starvsfólki mett um tørvin hjá 1700 brúkarum, sum antin fáa røktar- og umsorganartænastur, ella standa á bíðilista til tænastur. Ein sovorðin kanning átti at verið samanborin við eina brúkarakanning, har brúkarin sjálvur ber fram sín tørv og síni ynskir, men bólkurin hevur ikki havt møguleika fyri at gera eina slíka kanning.

Úrtslitið av kanningini skal takast við einum ávísum fyrivarni, tí úrslitið er treytað av, at tað eru ymisk fakfólk, ið hava mett um tørvin hjá tí einstaka. Eisini skal fyrivarni takast fyri, at fleiri brúkarar uttan iva ynskja eina aðra tænastu enn hana, sum fakfólk meta vera tað bestu tænastuna.

Av tí at tað er metti tørvur brúkarans sum er grundarlagið, vísir tørvskanningin á eina røð av tilboðum, sum antin ikki verða veitt í dag, ella sum í ov lítlan mun verða veitt í dag.

**Allýsing av røktartilboðum** Bólkurin hevur í mun til tørvskanningina gjørt nakrar allýsingar av teimum einstøku røktartilboðunum. Orsøkin er partvíst, at nøkur av tilboðunum í tørvskanningini ikki eru partar av núverandi eldraøki, og partvíst, at nøkur av tilboðunum á núverandi eldraøki í framtíðini eiga at virka á ein annan hátt. Hesar definitiónir[•] hava samstundis verið ein vegleiðing til tey starvsfólk, ið hava staðið fyri meting av tørvi brúkarans. Her verða allýsingarnar stutt endurgivnar:

**Røktarheim / Demensdeildir**: Hetta eru tilboð fyri eldri, ið hava tørv á røkt og hjáveru alt samdøgrið. Í løtuni er búpláss fyri minnisveik í lítlan mun eitt veruligt tilboð á eldraøkinum.

---

[•] Fylgiskjal 13

**Sambýli** er tilboð fyri eldri, ið eru partvís sjálvhjálpin, og sum ikki hava tørv á starvsfólki alt samdøgrið. Somuleiðis eigur hetta at verða eitt tilboð fyri fólk, sum ikki kunnu og/ella ynskja at búgva einsamøll. Endamálið við sambýlinum er sostatt ikki í samsvari við tað, ið vit kenna frá eldraøkinum í dag.

**Heimarøkt** er tilboð fyri eldri, sum hava tørv á hjálp í egnum heimi ella í sambýli. Brúkarin verður bólkaður eftur tyngd, í samsvari við tær klassifikatiónsreglur, sum nýttar verða í heimarøktini.

**Vardar íbúðir** er tilboð fyri eldri, sum orsakað av likamligum brekum/veikleikum ikki kunnu búgva í einum vanligum húsum.

**Dagstovnar** er tilboð fyri eldri, sum í ein ávísan mun eru sjálvhjálpin, og sum hava tørv á sosialari samveru, ítrivi og menning.

**Náttilhald** er tilboð fyri eldri, sum ikki vilja/tora at vera einsamøll um náttina, men sum aðrar tíðir á samdøgrinum í stóran mun eru sjálvhjálpin. Hetta tilboð er ikki á núverandi eldraøki.

**Umlættting** er tilboð fyri eldri, sum hava tørv á umlæting í eitt ávíst tíðarskeið, men sum annars kunnu vera heima.

**Uppvenjingartænasta** er tilboð til eldri, sum hava likamliga/mentala uppvenjing og viðlíkahald fyri neyðini. Orsøkinar kunnu vera osteoporose, giktsjúkur, afasi o.a. apopleksi

**Mattænasta** er tilboð til eldri, ið ikki megna at standa fyri egnari matgerð.

Tá hugt verður at úrslitinum av tørvskanningini, er tað umráðandi at hava omanfyrinevndu allýsingar í huga og ikki bert verandi tilboð á eldraøkinum. Til dømis eru tey flestu, ið eru skrásett í teiginum ”Hevur sambýlispláss” eisini skrásett sum havandi tørv á ”røktarheimsplássi” ella ”plássi á heimi/deild fyri minnisveik” Tað vil siga, at tey búgva í sambýli, men hava tørv á einum øðrum bútilboði.

## 5.1 Lýsing og viðgerð av tørvskanningini

Lýsingin og viðgerðin av tørvskanningini• er býtt í tveir partar. Í fyrra partinum verður tørvurin á røktarbúplássum viðgjørdur fyri alt landið og síðani fyri hvørt øki fyri seg. Seinni partur viðger tørvin á tilboðum og tænastuveitingum til heimabúgvandi, her fevnir viðgerðin bert um alt landið sum heild.

• Fylgiskjal 14

**Talva 5.1** Tørvskanning - røktarbúpláss

| Øki | Samlaður røktarheimstørvur | Hevur røktarheimspláss | **Røktarheimstørvur** | Samlaður tørvur á heimi/deild fyri minnisveik | Hevur pláss á heimi/deild fyri minnisveik | **Tørvur á heimi/deild fyri minnisveik** | Samlaður tørvur á eldrasambýli | Hevur sambýlispláss | **Tørvur á sambýlisplássum** | Samlaður tørvur á røktarbúplássum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 99 | 40 | **59** | 28 | 16 | **12** | 78 | 34 | **44** | 115 |
| 2 | 48 | 22 | **26** | 24 | 10 | **14** | 26 | 24 | **2** | 42 |
| 3 | 70 | 51 | **19** | 28 | 0 | **28** | 29 | 20 | **9** | 56 |
| 4 | 46 | 42 | **4** | 24 | 0 | **24** | 31 | 11 | **20** | 48 |
| 5 | 38 | 28 | **10** | 26 | 0 | **26** | 31 | 25 | **6** | 42 |
| 6 | 14 | 10 | **4** | 15 | 0 | **15** | 7 | 13 | **-6** | 13 |
| Tils. | 315 | 193 | **122** | 145 | 26 | **119** | 202 | 127 | **75** | 316 |

Øki 1. Suðurstreymoy (Kollafjørður undantikin)
Øki 2. Vágar, Norstr. og N. Eysturoy
Øki 3. Suður Eysturoy
Øki 4. Norðoyggjar
Øki 5. Suðuroy
Øki 5. Sandoy

Til talvuna skal viðmerkjast, at plássini á ellisheiminum í Tórshavn eru sett til at vera sambýlispláss, orsakað av at ellisheimið fær lægri játtan enn hini ellis- og røktarheimini, og at flestu brúkararnir á ellisheiminum eru mettir til at hava sambýlistørv. Tí verða fá røktarheimspláss í Suðurstreymoy.

Seinasta árið hevur nógv verið tosað um, hvussu stórur tørvurin er á røktarheimsplássum. Røktartørvskanningin vísir, at tey mest sakligu boðini um tørvin hava verið á góðari leið. Harumframt vísir kanningin eitt áhugavert býti millum røktarheimspláss, heim/deild fyri minnisveik og eldrasambýlispláss.

Fyri alt landið er tørvur á

- 122 røktarheimsplássum
- 119 plássum fyri minnisveik
- 75 sambýlisplássum

Neyðugt er at gera okkurt munagott fyri at nøkta tørvin á røktarheimsplássum og plássum til minnisveik, og á hesum økinum slepst ikki undan at gera íløgur og at økja um rakstrarútreiðslurnar. Tó kunnu fyribyrgjandi tænastur av ymiskum slag í ein ávísan mun vera við til at minka um tørvin.

Á sambýlisøkinum, sum í kanningini er fyri lættari brúkarar, er harafturímóti í størri mun møguligt at veita somu tænastu til heimabúgvandi brúkarar, men tað krevur, at tænasturnar til heimabúgvandi verða munandi fleiri og betri.

**Mynd 5.2** Tørvur á røktarbúplássum




Sum heild er stórur tørvur á bæði røktarheimsplássum og heimum/deildum til minnisveik um alt landið, men tørvurin á bútilboðum til minnisveik er serliga týðuligur. Vert er at leggja til merkis, at tørvurin á sambýlisplássum ikki er serliga stórur, við undantaki av Suðurstreymoy og Norðuroyggjum. Frágreiðingin er óivað, at lutfalsliga fá sambýlispláss eru í hesum økjunum frammanundan, men tað sum er serliga áhugavert er, at tørvurin í Eysturoynni er sera lítil í mun til allar tær ætlanirnar, ið eru um at byggja eldrasambýli.

Fyri at meta um, í hvønn mun røktartørvskanningin er eftirfarandi, sammeta vit samlaða tørvin á búplássum við lutfallið av fólki yvir 66 ár í hvørjum øki.

**Talva 5.3** lutfall ímillum tørv og øki

| | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 | Øki 5 | Øki 6 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólk yvir 66 ár í % av samlaða | 31% | 21% | 18% | 13% | 13% | 4% |
| Tørvur á búplássum | 32% | 15% | 19% | 15% | 14% | 5% |

Sum sæst, fylgir metti tørvurin á bústovnaplássum heilt væl býtinum av eldri fólki í teimum einstøku økjunum. Eitt undantak er økið 2 Vágar/Norstr./Noreyst, har tørvurin møguliga er mettur varisligari enn í hinum økjunum.

Áhugavert er at meta um, hvussu stórur tørvurin á røktarbústaðarplássum er í mun til verandi tilboð.

**Mynd 5.4** Tørvsfulnaður




Sum sæst, er tørvsfulnaðurin minstur í Suðurstreymoy, har góð 40 % av teimum, ið hava tørv á búplássi, hava búpláss. Í Sandoynni er tørvsfulnaðurin hægstur og liggur um góð 60 %. Fyri allar Føroyar er tørvsfulnaðurin í mun til búpláss 52%.

Orsakað av ónøktaða tørvinum á búplássum eru flest øll eldrasambýlini vorðin smá røktarheim. Tey, sum búgva á sambýlum eru tí í allar flestu førum í tørvskanningini skrásett at hava tørv á annaðhvørt røktarheimsplássi ella á demensdeild/heimi. Í sambandi við tørvskanningina var avgjørt, at endamálið hjá sambýlinum ikki skuldi verða at hýsa fólki við røktarheimstørvi, men hinvegin at hýsa fólki, ið vóru partvíst sjálvhjálpin. Tá ið kanningin varð gjørd, var av teimum starvsfólkunum, ið gjørdu kanningina, í fleiri førum viðmerkt, at tey, ið skrásett vóru at hava tørv á sambýli, høvdu kunnað klárað seg í egnum heimi um so var, at døgnrøkt var á eldraøkinum. Sum kunnugt verður døgnrøkt veruleiki 1.okt.

Bráðfeingis tørvurin á røktarheimsplássum og demensheimum/deildum er so mikið stórur í dag, at tað er ilt at hugsa sær, at sambýlini í næstu framtíð koma at hýsa teimum ”lættaru” brúkarunum, ið tørvskanningin leggur upp til skal verða endamálið við sambýlunum. Hinvegin metir bólkurin at fleiri av sambýlunum er væl egnað sum heim fyri minnisveik, sjálvsagt treytað av at sambýlini eisini fáa eina starvsfólkanormering ið svarar til eitt heim fyri minnisveik.

Tað eru fyrst og fremst tey, ið skrásett eru at hava tørv á røktarheimsplássi og plássi á heimi fyri minnisveik, ið kunnu sigast at hava bráðfeingis tørv á einum búplássi. Um vit í fyrstu atløgu bert taka tørvin hjá hesum við í metingina, sær myndin soleiðis út.

Tað eru 114 eldri, ið hava tørv á annaðhvørt demensdeild/heimi ella einum røktarheimsplássi.

**Mynd 5.5** Bráfeingistørvur




Men fyritreytin fyri, at hetta kann gerast er, at núverandi búpláss, røktarheim, ellisheim og sambýli øll verða at meta sum røktarheimspláss ella sum pláss fyri minnisveik, og tað vil siga eisini fáa játtan, ið svarar til hetta. Við øðrum orðum skal endamálið hjá, og játtanin til sambýlini broytast.

Samstundis skulu øll tey, sum eru skrásett at hava tørv á sambýlisplássi, 202 fólk, í fyrsta umfari verða verandi í egnum heimi. Hetta krevur sjálvsagt, at aðrar tænastur og serliga heimarøktin skulu mennast, um so er, at hesi fólk skulu fáa eina nøktandi tænastu.

Men tað skal eisini havast í huga, at flest allir brúkarar ynskja at verða í egnum heimi sum longst, og tískil er eitt sindur ivasamt, um teir brúkarar, sum í kanningini eru skrásettir til at hava tørv á sambýli, ikki heldur høvdu viljað verið í egnum heimi um so var, at teir fingu eina góða heimatænastu.

## 5. 2 Kostnaðarmetingar

**Grundarlag undir kostnaðarmeting av løgum og rakstri til røktarbústaðarpláss.**
Út frá teimum fyritreytum, sum nevndar vóru í 6.1 kunnu vit royna at gera eina meting av, hvat tað fer at kosta í íløgum og í rakstri at dagføra stovnstilboðini.

Tað eru sostatt bert tey, ið hava tørv á røktarheimsplássum og plássum til minnisveik, sum eru mett at hava bráðfeingistørv.

Tørvurin á sambýlisplássum verður umrøddur fyri seg av tveimum orsøkum. Í fyrra lagi tí veruleikin í dag er, at tað eru teir røktartyngstu brúkararnir, ið flyta á sambýlini, og í øðrum lagi, tí tað er ivasamt í hvønn mun sambýlistørvurin – um vit tosa um lættari brúkarar - skal nøktast á einum eldrasambýli, um so er, at vit fáa eina dagførda tænastu til heimabúgvandi eldri, t.d. við døgnrøkt, mattænastu v.m.

Byrjanarstøðið fyri kostnaðarmetingini er ein mettur prísur á ávikavist einum røktarheimsplássi, einum plássi fyri minnisveik og á einum sambýlisplássi.

**Talva 5.6** Løgu– og dagsprísur

| | Røktarheimspláss | Heim / deild fyri minnisveik | Sambýlispláss |
|---|---|---|---|
| Løgu prísir pr. pláss | 1.000.000. kr | 1.000.000 kr | 800.000 kr. |
| Dagsprísur pr. búpláss | 1.100 kr. | 1.400 kr. | 700 kr. |

Í samband við mettu dagsprísirnar skal viðmerkjast, at dagsprísirnir fyri røktarheimspláss og sambýlispláss eru í rættuliga góðum samsvari við verandi kostnað, meðan dagsprísurin fyri pláss á heimi/deild fyri minnisveik er mettur at vera væl hægri enn verandi dagsprísur.

**Kostnaðarmeting fyri alt landið** Í fyrstu atløgu verður sæð burtur frá sambýlistørvinum, og í staðin ásanna vit, at tørvurin á røktarheimsplássum og plássum fyri minnisveik eigur at viðgerast sum bráðfeingistørvur, og at hesi fólk fyrst eiga at fáa teirra tørv nøktaðan. At kalla øll sambýlispláss gerast tískil til pláss fyri minnisveik

**Talva 5.7** Dagføring av røktarbústaðartørvinum (tal av plássum)

| | .Samlaður tørvur á búplássum | Verandi búpláss | Tørvur á Búplássum | Sambýlispláss Dagførd til Røktarbústaðar-pláss | Ìrestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 315 | 193 | 122 | 8 | 114 |
| Minnisveik | 145 | 26 | 119 | 119 | 0 |
| Tils. | 460 | 219 | 241 | 127 | 114 |

Sum sæst á talvuni er tørvur á 241 búplássum, 122 røktarheimsplássum og 119 plássum fyri minnisveik. Á verandi eldraøki eru 127 sambýlispláss. Sambýlisplássini verða dagførd soleiðis at 119 sambýlispláss verða dagførd til at kunna hýsa

minnisveikum, og restin, tað eru 8 sambýlispláss, verða dagførd til at verða røktarheimspláss.

Harumframt er tørvur á at dagføra dagsprísin fyri 26 verandi búpláss fyri minnisveik til eina hóskandi legu. Tá hetta er gjørt, er framvegis tørvur á at gera íløgur í 114 røktarheimspláss.

Í niðanfyristandandi kostnaðarmeting av hvussu nógv skal til fyri at loysa bráðfeingis tørvin á røktarbúplássum, vera verandi búpláss fyrst dagførd í mun til at nøkta tørvin hjá brúkarunum við størstum røktartørvi. Síðani verður víst á, hvussu nógv tað kostar at dagføra írestandi tørvin.

**Talva 5.8** Kostnaður av dagføring av røktarbústaðartørvinum - alt landið

| | Røktarheimspláss | Heim/deild fyri minnisveik (Eldrasambýli) | Tilsaman |
|---|---|---|---|
| 1. Rakstur 2001 | 77.489.500 | 10.439.000 | 87.928.500 |
| | | (34.638.500) | 34.638.500 |
| 2. Dagføring av verandi plássum | 3.212.000 | 29.017.500 | 32.229.500 |
| 3. Dagføring av írestandi plássum | 45.771.000 | 0 | 45.771.000 |
| 4. Tilsamans | 126.472.500 | 74.095.000 | **200.567.500** |
| | | | |
| 5. Løgujáttan írestandi pláss | 114.000.000 | 0 | **114.000.000** |

1. Er raksturin á núverandi røktarheimsplássum, plássum fyri minnisveik og sambýlisplássum
2. Er dagføring av verandi plássum fyri minnisveik og sambýlispláss til pláss fyri minnisveik og røktarheimspláss.
3. Er dagføring av írestandi røktarheimsplássum og plássum til minnisveik
4. Er rakstrarkostnaðurin av einum røktarbústaðartørvi. .
5. Neyðug løgujáttan til nýggjar røktarbústaðir.

Sum sæst skulu stórar íløgur til, og árligu rakstrarútreiðslurnar skulu økjast munandi, um tørvurin á økinum skal nøktast. Samlaðu íløgurnar eru 114 mill.kr, og raksturin veksur úr góðum 122 mill. Kr. upp í 200 mill. kr.

Hesin kostnaðurin kann tykjast møtumikil, men nøkur fyrivarni eru, sum ikki eru tikin við í kostnaðarmetingini.

- Tað verða helst fleiri brúkarar, ið vilja verða heima við einari minni og bíligari tænastu, hóast fakliga tilráðingin er, at stovnspláss er besta loysnin
- Ein samskipan av tilboðunum kann gera tey bíligari í rakstri.
- Onnur tilboð kunnu verða ment soleiðis, at røktarbústaðartørvurin ikki verður so stórur.

Harumframt er ikki tikin hædd fyri sambýlis- og røktarheimsbygging, sum longu er í gongd, og sum kann broyta myndina. Eisini er møguligt, at avvarðandi myndugleikar fara at nýta plássini øðrvísi enn her verður lagt upp til.

Nú verandi sambýlispláss í kostnaðarmetingini eru nýtt til at nøkta røktarheimstørvin og tørvin á búplássum til minnisveik, er bólkurin av fólki við tørvi á sambýlisplássum

stórur. Tørvskanningin vísir, at 202 fólk - við minni røktartørvi - hava tørv á sambýlisplássi.

Á einum sambýli við rættuliga sjálvbjargnum búfólkum, ið ikki hava tørv á so nógvari røkt, er rakstrarkostnaðurin ein annar:

**Talva 5.9** Kostnaður fyri sambýlipláss.

| | Sambýlispláss |
|---|---|
| Løgu prísir pr. pláss | 800.000 kr. |
| Dagsprísur pr. búpláss | 400 kr. |

Um hesin tørvurin skal nøktast við sambýlisloysnum, verður kostnaðurin hesin:

**Talva 5.10** Íløga og rakstur

| | Kostnaður dagføring av sambýlistørvinum |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 29.492.000 kr. |
| Løgujáttan | 161.600.000 kr. |

Á sambýlisøkinum er tann neyðuga løgujáttanin stór, 161 mió.kr., meðan árligu rakstrarútreiðslurnar ikki eru so stórar, 30 mió. kr. Tann stóri spurningurin er, í hvønn mun hesin tørvurin skal loysast, við at eldri fólk fáa møguleika fyri at flyta á sambýli, ella um tænastur til heimabúgvandi sum dagstovnatilboð, umlættingartilboð, heimarøkt við døgnrøkt, mattænasta, koyritænasta, eldraíbúðir v.m. eru á einum so høgum stigi, at brúkarin fær møguleika fyri at verða verandi í egnum heimi.

**Framskriving av røktarbústaðartørvi:** við úrslitunum av tørvskanningini og væntaðu gongdini í talinum av fólki yvir 65 ár sum grundarlagi ber til at framrokna framtíðar tørvin á røktarbústaðartilboðum.

Úrslit av tørvskanningini vísa, at 5% av øllum yvir 65 ár hava tørv á røktarheimsplássi, 3,2% hava tørv á sambýli og 2,3% tørvar demensheim/deild. Út frá hesum fyritreytum eru allar framrokningar gjørdar.

**Mynd 5.11** Framskriving av røktarbústaðartørvi.




Myndin vísir, at talan ikki verður um eina stóra øking tey fyrstu árini, men eftir 2004 fer tørvurin at økjast munandi. Hetta gevur eitt lítið skotbrá at bøta um tann stóra ónøktaða tørvin á røktarbústaðartilboðum.

Tann natúrligi vøksturin í tørvinum á røktarbúplássum frá 1999 til og við 2024 er 13 búpláss pr. ár, 6 røktarheimspláss, 4 sambýlispláss og 3 pláss fyri minnisveik. Tað er tískil ikki tann natúrligi vøksturin, sum ger, at uppgávan kann tykjast møtimikil, men fyrst og fremst tann ónøktaði tørvurin á røktarbústaðartilboðum.

Tað er alneyðugt at seta ítøkilig mál fyri, hvussu stórur tørvur skal nøktast tey næstu árini, tí tað er umráðandi at fáa ein størri tørvsfulnað, áðrenn natúrligi tørvurin fer at økjast.

**Kostnaðarmeting og aldurssamanseting fyri alt landið:** Tað er áhugavert at hyggja at, hvussu lutfalsliga býtið millum ung, vaksin og gomul fer at verða í framtíðini. Serliga er áhugavert at hyggja at, hvussu lutfallið er ímillum fólk í arbeiðsførum aldri og ung og gomul, ið eru uttan fyri arbeiðsmarknaðin.

**Mynd 5.12** Framskriving av aldursamananseting alt landið 1999 -2024



Fyri landið sum heild er broytingin í lutfallinum ikki hóttandi, tí lutfalsliga økingin av eldri fólki í mun til tey vaksnu ikki verður serliga stór tey komandi árini. Burðartíttleikin í Føroyum er tann hægsti í Norðureuropa, og hevur ligið á einum javnt hægri stigi enn í okkara grannalondum, og tískil uppliva vit ikki somu ógvusligu broyting í lutfallinum millum gomul og vaksin.

Dagføring av røktarbústaðartørvinum í Øki 1 Suðurstreymoy

**Talva** 5.13 Tørvur á búplássum øki 1

| | Samlaður tørvur á búplássum | Verandi Búpláss | Tørvur á búplássum | Sambýlispláss Dagførd til Røktarbústaða r-pláss | Ìrestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarhei m | 99 | 40 | 59 | 22 | 37 |
| Minnisvei k | 28 | 16 | 12 | 12 | 0 |
| Tils. | 127 | 56 | 71 | 34 | 37 |

Í Suðurstreymoy er bráðfeingistørvurin 37 røktarheimspláss. Í Tórshavn verður demensheim bygt við 16 búplássum, sum væntandi verður klárt at taka í nýtslu um ársskiftið 2002 - 2003. Tá eru 32 pláss fyri minnisveik í Tórshavn, og tað fer at nøkta ein stóran part av tørvinum á demensplássum í økinum.

Lágargarður økir um sítt dagstovnatilboð. Eisini er í umbúna at skipa virksemi á Tjarnagarði, har ætlanin er, at ein røð av tænastutilboðum skal verða til eldri fólk. Hesi tilboð fara at veita brúkarunum eina betri tænastu og fara saman við døgnrøktini, sum verður sett í verk, ivaleyst eisini at minka um stóra tørvin á sambýlisplássum, men eisini nakað um tørvin á røktarheimsplássum.

Øki 1 er størsta økið, men hevur bert 1 sambýli, og kann hetta als ikki vera nøktandi. Ellisheimið í Tórshavn hevur í ávísan mun havt sama búfólkabólk sum hini sambýlini í landinum. Av teimum 40 búplássinum, ið skrásett eru at vera røktarheimspláss, eru 10 á røktardeildini á Landssjúkrahúsinum. Hølisviðurskiftini á røktardeildini eru út av lagi vánalig.

Øki 1 er tað øki, sum yvirhøvur er ringast fyri, tá ið hugsað verður um tørvsfulnað í mun til búpláss. Hinvegin er øki 1 við at uppbyggja eina røð av tilboðum og tænastum, ið áttu at verið ein natúrligur partur av einari vælvirkandi eldrarøktartænastu. Her verður hugsað um dagstovn, demensdeild, uppvenjingardeild o.s.fr.

**Talva** 5.14 Kostnaður øki 1

| | Røktarheims-pláss | Heim/deild fyri minnisveik (Sambýlispláss) | Tilsaman |
|---|---|---|---|
| Rakstur 2002 | 16.060.000 | 6.424.000 | 22.484.000 |
| | | (10.877.000) | 10.877.000 |
| Dagføring av verandi plássum | 1.365.100 | 4.635.500 | 6.000.600 |
| Dagføring av írestandi plássum | 14.855.500 | 0 | 14.855.500 |
| Tilsaman | 32.280.600 | 21.936.500 | **54.217.100** |
| | | | |
| Løgujáttan írestandi pláss | 37.000.000 | 0 | **37.000.000** |

Fyri at nøkta bráðfeingis tørvin krevst ein íløga á 37 mill.kr. umframt ein øking í rakstrinum á slakar 32 mill. kr.

**Mynd 5.15** Framskriving av røktarbústaðartørvi.




Tann natúrligi tørvurin í øki 1 veksur rættiliga skjótt, og longu eftir 2004 síggja vit ein munandi vøkstur.

**Mynd 5.16** Framskriving av aldurssamanseting



Sum sæst, verða ikki stórar broytingar í aldurssamansetingini tey næstu árini, men um vit samanbera við restina av landinum, veksur parturin av eldri fólki eftir 2004 lutfalsliga skjótt í Suðurstreymoyarøkinum.

## Dagføring av røktarbústaðartørvinum Øki 2

**Talva 5.17** Tørvur á búplássum øki 2

| | Samlaður tørvur á búplássum | Verandi Búpláss | Tørvur á Búplássum | Sambýlispláss Dagførd til Røktarbústaðarpl áss | Ìrestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 48 | 22 | 26 | 10 | 16 |
| Minnisveik | 24 | 10 | 14 | 14 | 0 |
| Tils. | 72 | 32 | 40 | 24 | 16 |

Tað skulu byggjast í minsta lagi 16 røktarheimspláss í øki 2 fyri at nøkta bráðfeingis tørvin.

Ítøkilig ætlan er um at byggja eitt røktarheim í Norðstreymoy, ætlandi við 32 búplássum, har møguleiki eisini verður fyri at gera eind/ir til minnisveik fólk. Møguliga verða eisini onnur tilboð knýtt at røktarheiminum, sum kunnu koma heimabúgvandi brúkarum til góðar, men tað veldst um, um játtan verður til hetta endamál.

Tað, sum serliga ger seg galdandi fyri øki 2 er, at í Norðstreymoy er einki røktarheim, og hetta hevur við sær, at sambýlini í Vestmanna og Kollafirði beinleiðis virka sum smá røktarheim. Í Vágunum er hinvegin einki sambýli, men bert eitt røktarheim. Bygdirnar í Norður Eysturoy eru við í samstarvinum um røktarheimið í Runavík. Sjálvt um økið er eitt heimarøktarøki, fer ikki tann stóra samskipanin fram viðvíkjandi búplássum.

Tørvskanningin vísir, at tørvurin á sambýlisplássum er nøktaður í økinum, men tað er ikki víst, at hetta er galdandi allastaðni í økinum. Fyrilit  skal sjálvsagt takast yri, at tørvurin á sambýlum kann verða stórur í Vágoynni, og at tey, ið hava ein ónøktaðan tørv á røktarheimsplássum, búgva í Norðstreymoy

**Talva 5.18** Kostnaður øki 2

| | Røktarheimspláss | Heim/deild fyri minnisveik (Sambýlispláss) | Tilsaman |
|---|---|---|---|
| Rakstur 2002 | 8.833.000 | 4.015.000 | 12.848.000 |
| | | 6132000 | 6.132.000 |
| Dagføring av verandi plássum | | 4.672.000 | 4.672.000 |
| Dagføring av írestandi plássum | 6.424.000 | 0 | 6.424.000 |
| Tilsaman | 15.257.000 | 14.819.000 | **30.076.000** |
| | | | |
| Løgujáttan írestandi pláss | 16.000.000 | 0 | **16.000.000** |

Fyri at nøkta bráðfeingis tørvin skulu gerast íløgur fyri 16. mill.kr. Harumframt fara rakstrarútreiðslurnar at vaksa við nærum 16,5 mill. kr.

**Mynd 5.19** framskriving av røktarbústaðartørvi




Ikki fyrr enn um ár 2009 sæst nakar veruligur vøkstur í tørvinum á røktarbúplássum.

**5.20** Framskriving av aldursamanseting




Aldursbýti í øki 2 líkist í stóran mun hinum miðstaðarøkjunum, øki 1 og 3.

## Dagføring av røktarbústaðartørvinum øki 3

**Talva 5.21** Tørvur av búplássum øki 3

| | Samlaður tørvur á búplássum | Verandi búpláss | Tørvur á búplássum | Sambýlis-pláss dagførd til røktarbústaðar-pláss | Írestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 70 | 51 | 19 | 0 | 19 |
| Minnisveik | 28 | 0 | 28 | 20 | 8 |
| Tilsamans | 98 | 51 | 47 | 20 | 27 |

Á talvuni omanfyri sæst, at tað í Eysturoynni eru rættuliga nógv sambýlipláss, ið kundu verið nýtt til heim fyri minnisveik. Um hetta varð gjørt, hevði tørvurin á plássum fyri minnisveik skjótt verið nøktaður.

Tá annars verður hugsað um tær ætlanir um bygging av sambýlum, sum eru í økinum, og tær verða samanbornar við tørvskanningina, eigur støða at verða tikin til, hvørji búfólk skulu búgva í sambýlunum, og hvat tænastustigið skal verða.

Røktar- og ellisheimið í Runavík hevur ætlanir um útbygging, soleiðis at tað kann hýsa 24 fólkum afturat. Í hesum sambandi er ætlanin at víðka um virksemið á røktar- og ellisheiminum, soleiðis at tað eisini fer at umfata nøkur røktarheimsfyribyrgjandi tilboð, sum eins og áður nevnt, óivað fara at minka um tørvin á búplássum.

Kommunurnar í Eysturoynni sýna stóran vilja at loysa trupulleikarnar á eldraøkinum, og bólkurin metir, at tað er umráðandi, at roynt verður at samskipa alt tað virksemið, sum er, ella verður á eldraøkinum. Við hesum kunnu kommunurnar tryggja sínum borgarum fjølbroytta tænastu.

**Talva 5.22** Kostnaður øki 3

| | Røktarheims-pláss | Heim/deild fyri minnisveik | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Rakstur 2001 | 20.476.500 | 5.110.000 | 25.586.500 |
| Dagføring av verandi plássum | | 5.110.000 | 5.110.000 |
| Dagføring av írestandi plássum | 7.628.500 | 4.088.000 | 11.716.500 |
| Tilsamans | 28.105.000 | 14.308.000 | **42.413.000** |
| | | | |
| Løgujáttan írestandi pláss | 19.000.000 | 8.000.000 | **27.000.000** |

Sum sæst á talvuni omanfyri, er løgujáttanin fyri at nøkta bráðfeingistørvin á eldraøkinum 27 mill. kr. Við komandi útbyggingum á eldraøkinum í Eysturoynni er hesin tørvur nøktaður um fá ár.

Viðvíkjandi rakstrinum verður ein øking úr góðum 25 mill. til góðar 42 mill. kr., og hetta svarar til ein vøkstur á 17 mill. kr.

**Mynd 5.23** Framskriving av røktarbústaðartørvi




Sum sæst á myndini, er ikki tann stóri vøksturin tey fyrstu 5-7 árini, men síðani verður ein javnur natúrligur vøkstur á tørvinum á røktarbústaðarplássum. Við tí virksemi, sum er ella verður á eldraøkinum í Eysturoynni, eru góðir møguleikar fyri, at bráðfeingis tørvurin er nøktaður, áðrenn tann natúrligi vøksturin í tørvinum á røktarbústaðarplássum byrjar.

**Mynd 5.24** Framskriving av aldurssamanseting




Aldurssamansetingin er ógvuliga støðug, og parturin av fólki yvir 65 ár veksur bert 2 % heilt fram til ár 2024.

## Dagføring av røktarbústaðartørvinum í øki 4

**Talva 5.25** Tørvur av búplássum øki 4

| | Samlaður tørvur á búplássum | Verandi búpláss | Tørvur á búplássum | Sambýlispláss dagførd til røktarbústaðar-pláss | Írestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 46 | 42 | 4 | 0 | 4 |
| Minnisveik | 24 | 0 | 24 | 11 | 13 |
| tilsamans | 70 | 42 | 28 | 11 | 17 |

Sum sæst á talvuni omanfyri, er bráðfeingistørvurin í øki 4 17 búpláss, 4 røktarheimspláss og 13 pláss fyri minnisveik.

Sambýlið á Heygum í Klaksvík verður klárt at taka í nýtslu í næstum. Hetta sambýli hevur pláss fyri 16 búfólkum. Sambýlið er bygt soleiðis, at umstøður eisini eru til, at røktartung búfólk kunnu búgva og røktast har. Eisini er møguleiki fyri, at ein partur av sambýlinum kann nýtast til eina eind fyri búfólk, ið eru minnisveik.

Í sambandi við bygging av sambýli er bráðfeingistørvurin væl áleiðis at verða nøktaður, um so er, at játtanin til rakstur samsvarar við játtanina til røktarheim og sambýli fyri minnisveik.

Eisini verða 24 eldraíbúðir bygdar, og nevnast kann, at uml. 100 umsóknir eru til hesar íbúðir.

**Talva 5.26** Kostnaður øki 4

| | Røktarheimspláss | Heim/deild fyri minnisveik | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Rakstur 2002 | 16863000 | 2810500 | 19673500 |
| Dagføring av verandi plássum | 0 | 2810500 | 2810500 |
| Dagføring av írestandi plássum | 1606000 | 6643000 | 8249000 |
| Tilsamans | 18469000 | 12264000 | **30.733.000** |
| | | | |
| Løgujáttan írestandi pláss | 4.000.000 | 13.000.000 | **17.000.000** |

Løgujáttanir, ið skulu til fyri at nøkta bráðfeingistørvin eru 17 mill kr. Játtanin til rakstur skal økjast við góðum 10 mill.kr.

**Mynd 5.27** Framskriving av røktarbústaðartørvi




Sum sæst á talvuni, er lítil og ongin vøkstur í tørvinum á búplássum fram til 2009.

**Mynd 5.28** Framskriving av aldurssamanseting




Í talvuni sæst, at aldurssamansetingin í Norðoyggjum er ógvuliga støðug í mun til í hinum økjunum. Til dømis eru líka nógv í bólkinum 65 o.e í 1999 sum í 2019.

## Dagføring av røktarbústaðartørvinum øki 5

**Talva 5.29** Tørvur av búplássum øki 5

| | Samlaður tørvur á búplássum | Verandi búpláss | Tørvur á búplássum | Sambýlis-pláss dagførd til røktarbústaðarpláss | Írestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 38 | 28 | 10 | 0 | 10 |
| Minnisveik | 26 | 0 | 26 | 25 | 1 |
| tilsamans | 64 | 28 | 36 | 25 | 11 |

Eitt røktarheim og 3 sambýli eru í Suðuroy, men eins og aðrastaðni í landinum eru ongi búpláss, ið beinleiðis eru til minnisveik búfólk. Við eini dagføring og broyttum endamáli fyri búplássini hava vit tørv á 10 nýggjum røktarheimsplássum og 1 sambýlisplássi fyri at nøkta bráðfeingistørvin.

Harumframt er tørvur á 31 sambýlisplássum til brúkarar, hvørs tørvur í fyrstu atløgu verður nøktaður við Heimrøktini og øðrum tænastum.

**Talva 5.30** Kostnaður øki 5

| | Røktarheimspláss | Heim/deild fyri minnisveik | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Rakstur 2001 | 11.242.000 | 6.387.500 | 17.629.500 |
| Dagføring av verðandi plássum | 0 | 5.475.000 | 5.475.000 |
| Dagføring av írestandi plássum | 4.015.000 | 511.000 | 4.526.000 |
| Tilsamans | 15.257.000 | 12.373.500 | **27.630.500** |
| | | | |
| Dagføring løgujáttan | 10.000.000 | 1.000.000 | **11.000.000** |

Samlaði løgukostnaðurin er sostatt 11 mill kr.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hækka úr 17.629.500 kr. upp í 27.630.500. Við øðrum orðum er talan um ein rakstrarvøkstur á 10. mill. kr. um árið.

Møguleiki er kanska eisini fyri, at røktarheimið kundi økt sítt virksemi til eisini at umfatað røktarheimsfyribyrgjandi tilboð til heimabúgvandi brúkarar. Men eisini í hesum føri er hetta treytað av, at fígging og onnur tilboð, so sum flutningstænasta, eru tøk.

**Mynd 5.31** Framskriving av røktarbústaðartørvi




Sum sæst á myndini, er lítil vøkstur í tørvinum á búplássum tey fyrstu árini. Men eftir 2004 er ein rættuliga støðugur vøkstur.

**Mynd 5.32** Framskriving av aldurssamanseting




Sum sæst á talvuni omanfyri er Suðuroyggin, eitt øki, har parturin av fólki yvir 65 ár verður lutfalsliga stórur. Hetta merkir, at talið á fólki í arbeiðsførum aldri minkar samsvarandi. Aldursbólkurin 65 o.e. er næstan líka stórur sum bólkurin av ungfólki, og tað er ein vandamikil gongd.

## Dagføring av røktarbústaðartørvinum øki 6

**5.33** Tørvur av búplássum øki 6

| | Samlaður tørvur á búplássum | Verandi búpláss | Tørvur á búplássum | Sambýlis-pláss dagførd til røktarbústaðarpláss | Írestandi tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 14 | 10 | 4 | 0 | 4 |
| Minnisveik | 15 | 0 | 15 | 13 | 2 |
| tilsamans | 29 | 10 | 19 | 13 | 6 |

Sum sæst, er tørvur fyrst og fremst á at fáa til vega búpláss til minnisveik fólk. Hetta kann gerast, um sambýlini í oynni verða skipað og fáa rakstrarjáttan, sum krevst til heim fyri minnisveik. At tørvurin á búplássum til minnisveik fólk er so stórur í hesum økinum, er partvís orsakað av, at fleiri búfólk, vegna teirra stóra røktartørv, eru komin úr øðrum pørtum av landinum og hava fingið búpláss á røktarheiminum ella í sambýli. Í tí sambandi skal nevnast, at øll tey sum hava búpláss, hava tilknýti til Sandoynna.

Við eini nakað størri játtan átti annars møguleiki at verið fyri at økt virksemið á eldrarøktarøkinum í oynni, bæði við at hækka verandi tænastustigið til búfólk og brúkarar, og við at útvega fleiri tilboð, eitt nú røktarheimsfyribyrgjandi tilboð.

Bráðfeingis tørvurin hevði verið nøktaður, um økið fekk 6 nýggj pláss

**Mynd 5.34** Kostnaður øki 6

| | Røktarheimspláss | Heim/deild fyri minnisveik | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Rakstur 2002 | 4015000 | 3321500 | 7336500 |
| Dagføring av verðandi plássum | 0 | 3321500 | 3321500 |
| Dagføring av írestandi plássum | 1606000 | 1022000 | 2628000 |
| Tilsamans | 5621000 | 7665000 | **13286000** |
| | | | |
| Løgujáttan írestandi pláss | 4.000.000 | 2.000.000 | **6.000.000** |

Fyri at nøkta bráðfeingistørvin skulu nýggj pláss útvegast fyri 6 mill. kr. Raksturin skal økjast rættiliga nógv fyri at nøkta tørvin hjá teimum, sum hava tørv á búplássi fyri minnisveik, úr góðum 7 mill. kr. upp í góðar 13 mill. kr.

**Mynd 5.35** Framskriving av røktarbústaðartørvi




**Mynd 5.36** Framskriving av aldurssamanseting.




Í Sandoynni er støðan viðvíkjandi aldursbýtinum á leið tann sama sum í Suðuroynni. Parturin av fólki, ið eru eldri enn 65 ár, er lutfalsliga stórur. Men vøksturin av teimum 65 o.e er ikki so stórur, umframt at bólkurin av teimum ungu eisini tykist vaksa.

## 5.3 Heimarøkt og onnur tilboð

**Úrslit av tørvskanning.** Á talvuni niðanfyri síggja vit, hvussu stórur tørvurin á heimahjálp er sambært tørvskanningini.

**Talva 5.37** Heimarøktartørvur, brúkaratal og bólkar

| | Bólkur 1 | Bólkur 2 | Bólkur 3 | Bólkur 4 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Øki 1 | 161 | 35 | 16 | 6 | 218 |
| Øki 2 | 95 | 64 | 17 | 4 | 180 |
| Øki 3 | 107 | 50 | 39 | 14 | 210 |
| Øki 4 | 106 | 63 | 24 | 6 | 199 |
| Øki 5 | 43 | 26 | 4 | 5 | 78 |
| Øki 6 | 33 | 22 | 3 | 1 | 59 |
| **Tilsamans** | **546** | **262** | **103** | **36** | **947** |

Bólkur. 1 brúkarar, ið fáa heimarøkt 0-2 tímar um vikuna. Í miðal 1 tíma
Bólkur. 2 brúkarar, ið fáa heimarøkt 2-8 tímar um vikuna. Í miðal 5 tímar
Bólkur. 3 brúkarar, ið fáa heimarøkt 8-20 tímar um vikuna. Í miðal 14 tímar
Bólkur. 4 brúkarar, ið fáa heimarøkt fleiri enn 20 tímar um vikuna. Í miðal 25 tímar.

Eftir tørvsmetingini hava 947 brúkarar tørv á heimarøkt. Hesin tørvur er ymiskur: teir flestu brúkararnir hava tørv á millum 0 og 8 tímum um vikuna, meðan fáir brúkarar hava tørv á 8 tímum ella fleiri. Tað er at undrast á, at øki 1 Suðurstreymoy ikki hevur munandi fleiri brúkarar enn hini stóru økini, men ein partur av frágreiðingini er, at nógvir brúkarar í øki 1 eru mettir at hava sambýlistørv.

Fyri at meta um hvørja ávirkan tað hevur, um brúkararnir við røktarbústaðartørvi fáa røktarbústaðartilboð, verður úrslitið av tørvskanningini samanborið við brúkaratalið fyri Heimarøktina januar 2002.

**Talva 5.38** Tørvskanning og núverandi býti av heimarøkt.

| | Bólkur 1 | Bólkur 2 | Bólkur 3 | Bólkur 4 | Tils |
|---|---|---|---|---|---|
| Tørvskanning | 546 | 262 | 103 | 36 | 947 |
| Jan 2002 | 508 | 254 | 162 | 116 | 1039 |
| Munur | **39** | **8** | **-59** | **-80** | **-92** |

Í samanberingini síggja vit eina minking í brúkaratali á 92 brúkarar, og er størsta orsøkin, at brúkararnir í veruleikanum hava tørv á røktarbústaðartilboðum. Samstundis økist talið á løttum brúkarum. Orsøkin til hetta er helst, at onnur tilboð, sum t.d. dagstovnatilboð og mattænasta hava við sær, at nakrir av teimum røktartyngru brúkarunum gerast lættari í heimarøktarhøpi.

Í útreiðslum er talan um eina munandi sparing, tá ið tilsamans 139 færri brúkarar verða í bólki 3-4. Um vit seta miðaltøl inn fyri teir 4 bólkarnar, kunnu vit meta um, hvussu stór sparingin hevði verið. Eitt ársverk í Heimarøktini kostar á leið 220.000 kr.

**Talva 5.39** Sparing í mun til heimarøktina.

| Bólkar | Brúkarar | Tímar | Krónur |
|---|---|---|---|
| Bólkur 1 | 39 brúkarar á ein tíma | +39 tímar | + 214.500 kr. |
| Bólkur 2 | 8 brúkarar á 5 tímar | +40 tímar | + 220.000 kr. |
| Bólkur 3 | 59 brúkara á 14 tímar | - 826 tímar | - 4.543.000 kr. |
| Bólkur 4 | 80 brúkarar á 25 tímar | -2000 tímar | - 11.000.000 kr. |
| **Tilsamans** | | **-2747** | **- 15.108.500 kr.** |

Um so var, at eldraøkið hevði verið dagført, hevði tørvurin á heimarøkt minkað við 2747 tímum svarandi til sløk 69 ársverk, og hetta er ein sparing á 15.108.000 kr.

Fyritreytin fyri einari munandi sparing innan Heimarøktina er, at røktarheimstørvurin, tørvurin á heimi/deildum fyri minnisveik og sambýlistørvurin verða nøktaðir. Men spurningurin er, um hetta í veruleikanum er ein ynskilig sparing, og um hon er í samsvari við endamálið hjá Heimarøktini, sum er, at fólk skulu hava møguleika at verða í egnum heimi so leingi sum gjørligt.

Eingin ivi er um, at verandi støða á heimarøktarøkinum er, at alt ov nógvir brúkarar ikki hjálpast við ta tænastu, Heimarøktin kann bjóða í dag, antin tí teir hava tørv á stovnsumsorgan ella tí tænastustigið er ov lágt til at geva eldri fólki við røktartørvi, ið kunnu megna at verða heima, eina nøktandi tænastu.

Málið eigur tí at verða at geva fólki við tørvi á stovnsumsorgan stovnstilboð, ið nøkta teirra tørv, og tann møguliga sparingin eigur at verða nýtt til at geva eldri fólki, ið enn klára seg heima eina góða fyribyrgjandi tænastu, so tað verða færri, ið hava tørv á stovnsumsorgan.

**Røktarheimsfyribyrgjandi tilboð:** Ein týðandi partur av tørvskanningini er at meta um tørvin á røktarheimsfyribyrgjandi tænastum**,** og úrslitið verður lýst í talvuni niðanfyri.

**Talva 5.40** Úrslit av tørvskanning: Røktarheimsfyribyrgjandi tilboð

| | Vard íbúð | Dagstovna -tilboð | Hevur dagstovna -tilboð | Náttartilhald | Umlættingar -pláss | Umlætting | Uppvenjingar -tilboð | Mattænasta | Geronto Psykiatri |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Øki 1 | 22 | 30 | 26 | 8 | 11 | 25 | 17 | 23 | 7 |
| Øki 2 | 8 | 49 | 0 | 16 | 2 | 25 | 45 | 59 | 6 |
| Øki 3 | 23 | 65 | 0 | 3 | 11 | 39 | 61 | 35 | 1 |
| Øki 4 | 22 | 44 | 0 | 26 | 5 | 31 | 25 | 57 | 0 |
| Øki 5 | 12 | 17 | 0 | 6 | 2 | 9 | 12 | 14 | 0 |
| Øki 6 | 2 | 20 | 0 | 10 | 1 | 7 | 8 | 14 | 0 |
| tilsam. | **89** | **225** | **26** | **69** | **32** | **136** | **168** | **202** | **14** |

Tað er ymiskt, hvussu mett hevur verið um tørvin á røktarheimsfyribyrgjandi tilboðum í teimum einstøku økjunum. Orsøkin er uttan iva, at fleiri av hesum tilboðum ikki er til staðar á eldraøkinum í dag. Av somu orsøk hava tey, ið hava staðið fyri kanningini, møguliga skilt tilboðini ymiskt og tískil eisini skrásett tørvin út frá ymiskum fyritreytum. Bólkurin fer tískil ikki at viðgera úrslitini øki fyri øki, men heldur at gera eina samlaða meting av tørvinum á hesum tilboðunum.

**Mynd 5.41** Onnur tilboð




Úrslitið av kanningini letur ongan iva vera um, at tað er javnt stórur tørvur á hesum tilboðum. Tilboðini eru fyrst og fremst at meta sum røktarheimsfyribyrgjandi og viðlíkahaldandi tænastur. Tað er umráðandi at leggja sær í geyma, at hetta ikki eru tilboð, ið kunnu koma í staðin fyri búpláss, men at hesi tilboð í ávísan mun kunnu verða við til at útseta tørvin fyri búplássi hjá brúkarunum. Hetta átti sostatt at havt við sær, at samlaði parturin av teimum, ið hava tørv á einum búplássi minkaði, um so var, at omanfyrinevndu tilboð høvdu verið ein partur av eldraøkinum.

**Vardar íbúðir:** Tað er lítil ivi um, at tey flestu av teimum eldru ynskja at verða í egnum heimi/heimaumhvørvi so leingi sum møguligt. Hetta vísir millum annað ein brúkarakanning, sum Tórshavnar býráð gjørdi í 1999. Men kanningin vísti eisini, at fleiri høvdu áhuga fyri at keypa ella leiga eldraíbúðir ella vardar íbúðir, um so var, at hetta var eitt tilboð. Í Klaksvík verða sum fyrr nevnt bygdar 24 eldraíbuðir, og heili 100 umsóknir eru til hesi búpláss. So tað er lítil ivi um, at hesi tilboð hava stóran áhuga.

Um so er, at endamálið fyri eldrapolitikkinum í Føroyum er, at fólk kunnu støðast í egnum heimi ella í egnaðum heimi so leingi sum møguligt, eigur stórur dentur at verða lagdur á at menna og útbyggja røktarheimsfyribyrgjandi tænastur, serliga tí tað eftur øllum at døma eisini er eitt ynski frá brúkaranum at hava hesar møguleikar í boði.

**Mattænasta:** Fleiri av hesum tænastum eru lutfalsliga bíligar at seta í verk. Til dømis er mattanastan á Lágargarði fyri ein stóran part fíggjað av brúkarunum og Tórshavnar

kommunu. Men orsakað av vánaligum køksumstøðum og manglandi koyritænastu er tørvurin í fleiri økjum ónøktaður. Tað er eingin ivi um, at uppgávan hjá avvarðandi myndugleika er at skapa karmar fyri, at henda tænastan fer at virka í øllum økjum.

**Dagstovnatilboð, náttartilhald og umlætting:** Eisini tilboð sum dagstovnar og náttartilhald kundu í nógvum førum útsett tørvin á einum búplássi. Tað er ein sannroynd, at nógvar familjur ynskja at stuðla eldri avvarðandi at verða í egnum heimi sum longst. Uppgávan hjá myndugleikunum er somuleiðis at stuðla hesum við til dømis at veita tænastur sum dagstovnatilboð og náttartilhald.

Í løtuni hava vit bert ein skipaðan dagstovn á Lágargarði í Tórshavn, men við ræ1ttuliga lítlari rakstrarjáttan ber til at veita dagstovnatilboð á fleiri av verandi røktarheimum og møguliga eisini á nøkrum av sambýlunum. Dagstovnatilboð kunnu samskipast við náttartilhaldi, tí høli, sum verða nýtt til hvílirúm um dagin, kunnu eisini nýtast til náttartilhald.

Tað eru 32 umlættingarpláss á verandi røktarheimum og eldrasambýlum. 136 brúkarar eru mettir at hava tørv á umlætting, og svarar tað til, at brúkararnir í miðal kunnu fáa umlætting í uml. 13 vikur um árið. Í dag er støðan tann, at fleiri av plássunum ikki virka sum umlættingarpláss tí brúkararnir ikki kunnu fara heimaftur, og møguleiki er ikki fyri at veita umlætting í mun til tørvin.Tað hevði verið ein ynskilig støða at kunnað bjóðað heimabúgvandi eldri við røktartørvi og teirra avvarðandi betri og longri umlættingartilboð.

**Uppvenjingartilboð:**

Í mun til framtíðar útbyggingar av røktarheimum, heimum fyri minnisveik og sambýlum verður hugsað um meira enn bert búpláss. Tí nógvir møguleikar eru at troyta í einari samskipan av røktarbústaðarplássum og røktarheimsfyribyrgjandi tilboðum. Til dømis eigur tilboð um uppvenjing, at verðu partur av teimum tænastum í ein røktarheimseind kann bjóða teimum ið framvegis eru í egnum heimi.

## 6.4 Niðurstøða

Tørvskanningin vísir okkum, at ónøktaði tørvurin á røktarbústaðarplássum og øðrum tænastum á eldraøkinum er stórur. Tørvur er á 122 røktarheimsplássum, 119 plássum fyri minnisveik og 75 sambýlisplássum.

Uppgávan er stór og trupul, tá hugsað verður um, at ein stórur partur av tørvinum er bráðfeingis røktartørvur, sum krevur stórar íløgur í bygging og rakstur av nýggjum røktarbústaðartilboðum, umframt eina dagføring av verandi sambýlistilboðum og bútilboðum fyri minnisveik.

Bólkurin metir tvinni viðurskifti at vera sera umráðandi.
1. Í fyrsta føri skulu so nógv búpláss sum møguligt útvegast næstu árini, soleiðis at tørvurin á búplássum kemur niður á eitt hóskandi stig, og samstundis skal tryggjast at tænastan á verandi røktarbúplássum nøktar tørv brúkarans.
2. Í øðrum føri skal stórur dentur leggjast á at økja um fyribyrgjandi tænastuveitingar til heimabúgvandi eldri við tørvi á røkt og umsorgan.

Tað er sera umráðandi, at ikki bert verður hugsað um at nøkta tørvin á búplássum, tí um fyribyrgjandi tænastur á eldraøkinum ikki verða mentar, er vandi fyri, at tørvurin á búplássum verður munandi størri. Ein íløga í fyribyrgjandi tænastur kann í fleiri førum vinnast inn aftur, við at tørvurin á búplássum verður tálmaður, og at eldri við góðum tænastuveitingum kunnu verða sum longst í egnum heimi.

Neyðugt er, at avarðandi myndugleiki ger sær greitt, at her skulu stórar íløgur gerast, og stórar uphæddir skulu setast av til árligan rakstur.
.
Dagføring av bráfeingis tørvi á røktarheimsplássum og plássum fyri minnisveik:
- Dagføring av verandi røktarbústaðartilboðum 32 mió. kr.
- Rakstur av nýggjum røktarbústaðartilboðum 46 mió. kr.
- Íløgur í nýggjar røktarbústaðir 114 mió kr.

Harumframt er neyðugt at geva heimabúgvandi brúkarum øktar búmøguleikar og betri fyribyrgjandi tænastur
- Sambýlismøguleikar
- Vardar íbúðir/eldraíbúðir
- Umlættingartilboð
- Dagstovnatilboð
- Náttartilhald
- Uppvenjingartilboð
- Heimarøkt(døgnrøkt)
- Mattænastu
- Koyritænastu

Bólkurin hevur ikki gjørt kostnaðarmeting av at økja um búmøguleikar og fyribyrgjandi tænastur, men við einum størri tørvsfulnaði av røktarheimstørvi og serliga tørvinum hjá minnisveikum á stovnsplássum, verður innanfyri verandi karmar

meira orka til at betra um tænasturnar til heimabúgvandi brúkarar. Harafturat eru fyribyrgjandi tilboðini væl bíligari at seta í verk og reka, enn stovnsplásss og stovnsrøkt fyri teir tyngstu brúkararnar.

Tænastuveitingin av eldrarøkt eigur at byggja á ynskið hjá eldri fólki at megna eina sjálvstøðuga tilveru, so leingi tað er gjørligt, fyrst í sínum egna heimi ella einum egnaðum heimi og um neyðugt í egnaðum røktarbústaði. Bert á tann hátt kunnu vit virka fyri heilsu og trivnaði hjá eldra ættarliðinnum.

Henda røktarfakliga tørvsmetingin av eldraøkinum kundi hóskandi verið fylgd upp av eini brúkarakanning, har eldri komu til orðanna og løgdu fram síni ynski um, hvørji tilboð áttu at verið á eldraøkinum.

# 6 Uppgávu - og ábyrgdarbýti millum land og kommunur

Arbeiðsbólkurin er í arbeiðsetninginum biðin um at koma við uppskoti um, hvussu eldraøkið skal skipast í framtíðini, soleiðis at vit fáa eitt greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Somuleiðis verður í arbeiðssetninginum lagt upp til, at vegurin millum borgara og myndugleika eigur at vera so stuttur sum møguligt. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum setti samstundis fram ynski um, at tað skuldi verða samsvar millum hetta álitið og tað arbeiði, sum er fyriskipað undir Løgmansskrivstovuni, viðvíkjandi framtíðar uppgávu– og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Arbeiðsbólkurin undir Løgmansskrivstovuni mælir til, at alt eldraøkið, undantikið øki, ið krevja servitan, verður lagt út til kommunurnar at umsita og reka.

Arbeiðsbólkurin leggur sostatt dent á at lýsa:

1. hvussu vit fáa eitt greitt uppgávu– og ábyrgdarbýti á eldraøkinum
2. hvussu og hvørjir partar av eldraøkinum kunnu og/ella skulu leggjast út til kommunurnar.

## 6.1 Uppgávu- og ábyrgdarbýti á eldraøkinum

Tá ið vit tosa um uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, er ein grundleggjandi spurningur, hvør skal hava ábyrgdina av, at ein uppgáva verður loyst, tað er:

hvør skal hava rætt og skyldu at taka avgerð um, hvør skal loysa eina uppgávu, og hvør skal hava rætt at avgera, hvussu henda uppgávan á besta hátt verður loyst, og samstundis hvør skal bera fíggjarligu byrðarnar av uppgávuni.

Ein fyritreyt fyri at fáa greiðan skilnað millum land og kommunur er, at uppgávubýtið og fíggjarliga ábyrgdarbýtið fylgjast.

Tað eru tríggir ymiskir hættir at skipa uppgávur millum land og kommunur.

1. Landsstovnar loysa uppgávuna
2. Uppgávan verður á einhvønn hátt loyst av kommunu og landi í felag
3. Uppgávan verður loyst av kommununi, ella í samstarvi millum kommunur

Tá uppgávan liggur hjá antin kommunu ella hjá landi burturav, er uppgávu– og ábyrgdarbýtið greitt, og samsvarar við meginregluna um, at tey, ið hava avgerðarrættin í mun til at loysa eina uppgávu, eisini hava fíggjarligu ábyrgdina av uppgávuni.

1. juli 2000 varð løgtingslóg nr. 125 frá 21. mai 1993 um býtið av almannaútreiðslunum avtikin, og hetta hevði við sær, at landskassin kom at bera nærum allar rakstrarúreiðslur á eldraøkinum. Landið hevur ikki lagt eldraøkið út til kommunurnar, og eldraøkið er sostatt framvegis at meta sum ein landsuppgáva. Men landið hevur ikki gjørt stórvegis fyri at loysa stóru trupulleikarnar á eldraøkinum, og kommunurnar hava tískil verið noyddar at tikið um endan. Kommunurnar hava eftir besta førimuni roynt at loyst uppgávurnar á eldraøkinum, uppgávur sum í veruleikanum eru landsuppgávur.

Landsmyndugleikin hevur ikki í nóg stóran mun megnað at loyst uppgávurnar á eldraøkinum, hvørki tá tað snýr seg um íløgur til hóskandi búpláss, ella tá talan er um at áseta eitt tænastustig í samsvari við tørvin á økinum. Hetta hevur havt við sær, at kommunurnar hava verið noyddar at tikið um endan og funnið loysnir á bústovnatørvinum á eldraøkinum. Sigast kann, at sambýlini hava minkað um bráðfengistørvin á røktarheimsplássum og sostatt á einum samfelagstrupulleika, men tey hava ikki loyst trupulleikan, tá tað snýr seg um at finna hóskandi loysnir til fólk, sum hava stóran røktartørv. Hartil hava sambýlini í enn størri mun gjørt, at ábyrgdar- og uppgávubýtið millum land og kommunur er ógreitt. Millum annað tí tað í flestu førum eru kommunurnar, ið taka avgerð um at byggja sambýli, og síðani áliggur tað heimarøktini at veita tænastuna.

**Røktarheim.** Sambært løgtingslóg nr. 70, 2 mai 2002 eru útreiðslurnar til íløgu av nýggjum ellis- og røktarheimum býttar javnt ímillum land og kommunu. Allur raksturin av ellis- og røktarheimum verður fíggjaður av landinum.

**Sambýli.** Vanliga fáa kommunurnar 50.000 kr. pr. búpláss í stuðli frá landinum.
Røktin á heiminum verður veitt av Heimarøktini, og er sostatt ein uppgáva hjá landinum.
Men á kommunalu sambýlunum verður náttarvaktin goldin av kommununi/kommunum.
Á sambýlum undir landinum verða bæði íløga og rakstur fíggjað 100% av landinum.

**Heimarøkt.** At veita heimarøkt er ein landsuppgáva.

## 6.2 Greitt uppgávu– og ábyrgdarbýti

Landsmyndugleikarnir hava ábyrgdina av, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið á eldraøkinum er ógreitt. Við at leggja rættin til stigtakan á eldraøkinum út til kommunurnar, hevur landsmyndugleikin í ávísan mun frálagt sær ábyrgdina av eldraøkinum, samstundis sum kommunurnar hava verið trýstar til at taka ábyrgd av, at trupulleikarnir á eldraøkinum verða loystir.

Ein skipan har bæði landið og kommunan hava ábyrgdina av, at ein uppgáva verður loyst ger, at uppgávubýtið verður ógreitt. Tað hendir til dømis, tá kommunur taka stig til bygging av eldrasambýlum, og landið síðani skal hava fíggjarliga og fakliga ábyrgd av tænastuni.

Nú eru tað kommunurnar, sum skulu taka stig til tiltøk á eldraøkinum, og tær royna eftir besta førimuni at bøta um støðuna, serliga við at byggja nýggj sambýli. Hetta er í nógvar mátar ein fyrimunur, tí kommunur og kommunalpolitikarar tykjast at hava stóran áhuga í at loysa trupulleikarnar á eldraøkinum. Men trupulleikin er, at vit ikki fáa eina skipaða útbygging av eldraøkinum, og tí er stórur vandi fyri, at tær játtanir, ið fara til eldraøkið, ikki verða gagnýttar á besta hátt**.** Landsmyndugleikin hevur avgerðarrættin á økinum og setur í sambandi við íløgustuðul krøv til ætlanirnar hjá kommununum, millum annað við at senda tær til góðkenningar hja Heimarøktini. Men í roynd og veru eru ætlanirnar góðkendar, væl vitandi at tær ikki altíð eru rætta loysnin. Hetta kemst av, at tørvurin á økinum hevur verið so mikið stórur, at eitthvørt tiltak at bøta um hesa støðu hevur fingið vælvild. Afturlítandi mugu vit ásanna, at krøvini til sambýlini, tá ið talan er um búfólkaumstøður, arbeiðsumstøður, røktartænastu o.s.fr, ikki hava verið nóg høg. Sama støða kann gera seg galdandi, nú kommunur eisini skulu taka stig til røktarheimsbygging.

Tískil skal ein og sami myndugleiki hava ábyrgd av at loysa uppgávurnar, áseta uppávukostnaðin og  tænastustigið á øllum tænastum á eldraøkinum. Fyritreytin fyri hesum er, at økið verður samskipað, so at avvarðandi myndugleikar fáa førleika til at raðfesta útbyggingarnar á eldraøkinum svarandi til tørvin.

Trupulleikarnir á eldraøkinum verða bert loystir, um hugt verður at eldraøkinum sum ein samanhangandi heild, tað sama um tað eru kommunur ella landið, ið hava myndugleikan á økinum. Við hesum kunnu vit í stóran mun vara okkum fyri at fáa stuttskygdar og ikki varandi loysnir.

Tískil verður mælt til at:

1. eldraøkið verður samskipað
2. ábyrgdin av eldraøkinum verður løgd hjá einum myndugleika: kommunum ella landi

Fyrsta stigið til at fáa eitt greitt uppgávu– og ábyrgdarbýti er, at eldratænastan verður samskipað, síðani er annað stigið at avgera, **hvør** myndugleiki skal hava ábyrgdina av tí samskipaða økinum.

Tað er breið politisk semja um, at eldraøkið - í semju við kommunurnar - verður lagt út til kommunurnar sum skjótast, og tískil er tann møguleikin, at landið tekur fulla ábyrgd av eldraøkinum ikki so áhugaverdur. Hinvegin verður í samgonguskjalinum sagt, at bráðneyðugi tørvurin á eldrabústøðum, og ellis– og røktarheimsplássum í samstarvi við kommunurnar skal nøktast eftir verandi skipan. Hóskandi upphædd verður sett av til endamálið.

Skal bráðfengis tørvurin nøktast eftir galdandi skipan, er tað umráðandi, at landsmyndugleikin er við, soleiðis at avsetta játtanin verður gagnnýtt so væl sum til ber, og at sett verður inn, har tørvurin er størstur. Tað er framvegis landsmyndugleikin, sum undir verandi skipan hevur ábyrgdina av, at raðfest verður á skilabesta hátt.

## 6.3 Fyrimunir og vansar við at leggja út øki til kommunurnar

**Fyrimunir** við at leggja alsamt fleiri øki út til kommunurnar at umsita og reka, eru fyrst og fremst grundaðir á hugtakið um **nærleika**.

Fyri borgaran merkir hetta, at tænasturnar verða veittar so nær borgaranum sum møguligt. Á sama hátt eru teir politikkarar, sum hava ábyrgd av uppgávuni, eisini nær borgaranum. Politiski nærleikin hevur við sær, at politikkarin hevur betri kunnleika til teir trupulleikar, hann skal taka avgerðir um. Harumframt hevur borgarin tættari tilknýti til politiska myndugleikan, og tað gevur borgaranum betri møguleika at ávirka politiskar avgerðir, og til yvirhøvur at hava eina virknari luttøku í fólkastýrinum.

6) Broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999. § 41 í hesi løgtingslóg er soljóðandi: "Henda lóg kemur í gildi 1. januar 2000, og samstundis fer úr gildi lóg nr. 58 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om folkepension", sbr. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 37 frá 16. apríl 1997, lóg nr. 55 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om invalidpension m.v." sbr. lógarkunngerð nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21. desember 1994, §§ 27-31 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om offentlig forsorg", sbr. lógarkunngerð nr 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 30. desember 1997 og løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977 um uppískoytisveiting til einkjur, sum broytt við løgtingslóg nr. 120 frá 29. desember 1983."

7) Ændret ved lagtingslov nr. 76 af 23. maj 1997.

8) Ændret ved § 3 i lov nr. 154 af 15. marts 1989.

9) Ændret ved § 4 i lov nr. 393 af 22. juni 1993.

# Fylgiskjal 3

## LØGTINGSLÓG NR. 108 FRÁ 22. DESEMBER 1999 UM UPPIHALD Á STOVNI O.L.

**Løgtingslóg nr. 108 frá 22.12.1999**

Nr. 108 22. desember 1999

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Henda løgtingslóg um uppihald á stovni o.l. er givin út sambært § 2, stk. 1 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sosiale ydelser på Færøerne".

**§ 2.** Fær ein pensjonistur uppihald á einum stovni fyri persónar við víttfevnandi likamligum ella sálarligum breki, sum er góðkendur eftir lóggávuni um almenna forsorg ella á samsvarandi almennum ella privatum stovni, verður pensjónin útgoldin pensionistinum í 6 mánaðir umframt innleggingarmánaðin, sbr. tó § 35 í løgtingslóg um almannapensiónir o.a..
*Stk 2.* Írestaðu uppihaldstíðina fellur pensjónin burtur.
*Stk. 3.* Fær pensjonistur av nýggjum uppihald á nevndu stovnum, verður pensjónin einans útgoldin inntil uppihaldstíðin tilsamans, umframt innleggingarmánaðirnar, er 6 mánaðir, roknað frá 11/2 ári áðrenn uppihaldstíðina.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu verður við pensjónini, tá ein pensjónistur, av einum av teimum undir stk. 1 nevndu stovnum, verður settur í røkt í privatum heimum undir umsjón av einum stovni, og tá pensjonistur fær uppihald á stovnum o.l., sum ikki eru nevndir í hesi lóg.

**§ 3.** Um ein pensjonistur má metast sum røktarsjúklingur ella annars verður mettur at vera óegnaður til varandi útskriving frá einum vanligum sjúkrahúsi, sálarsjúkrahúsi ella deild**,** kann Almannastovan taka avgerð um, at pensjónin lækkar aftaná 6 mánaðar innleggingartíð.
*Stk. 2.* Ein upphædd verður varðveitt til rindan av útreiðslum til persónliga tørv pensionistsins.
*Stk. 3.* Sjúkrahús, sálarsjúkrahús ella deild skal boða Almannastovuni frá, um pensjonisturin er innlagdur meir enn 6 mánaðar.
*Stk. 4.* Í hvørjum einstøkum føri, tá Almannastovan skal taka avgerð um, um pensjónsupphæddin skal lækka, skal tað metast um, hvussu leingi innleggingin væntast at verða og framtíðarútlitini hjá viðkomandi
*Stk. 5.* Pensjónin fellur í fyrsta lagi burtur við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, pensionisturin hevur verið innlagdur í 6 mánaðar.

**§ 4.** Hjá pensjonistum, sum fáa varandi uppihald á góðkendum røktar- ella ellisheimum ella øðrum varandi staði, sum kann sammetast við eitt røktar- ella ellisheim, lækkar pensjónin við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, pensionisturin fær uppihald á viðkomandi heimi.
*Stk. 2.* Ein upphædd verður varðveitt til rindan av útreiðslum til persónliga tørv pensjonistsins.
*Stk. 3.* Hjá pensjonistum undir 60 ár verður upphæddin til persónligan tørv hækkað við 20 %.
*Stk. 4.* Er persónur, sum fær varandi uppihald smb. stk. 1, giftur við einum pensjonisti, fær hin hjúnarfelagin pensjón sum stakur pensjonistur frá sama mánaði, pensjónin hjá hjúnarfelagnum lækkar.
*Stk. 5.* Almannastovan skal fáa fráboðan um uppihaldið frá heiminum.

**§ 5.** Pensjonistar smb. § 4, sum hava inntøku umframt pensjónina, skulu rinda eitt gjald fyri uppihaldið. Gjaldið verður ásett til 10 % av allari skattskyldugari inntøku.
*Stk. 2.* Inntøkugrundarlagið verður uppgjørt, sum ásett er í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
*Stk. 3.* Í uppgerðini av inntøkuni verður sæð burtur frá inntøku, stavandi frá persónligum arbeiði

undir uppihaldinum á heiminum, um henda inntøka er minni enn tvær ferðir upphæddina, smb. § 4, stk 2.

*Stk. 4.* Gjøld fyri uppihald fáa gildi við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná upptøkumánaðin.

*Stk. 5.* Er gjaldið minni enn kr. 100 um mánaðin, verður onki gjald ásett.

*Stk. 6.* Almannastovan ásetur gjaldið eftir hesi grein.

**§ 6.** Hevur ein persónur, sum skal gjalda fyri uppihaldið, uppihaldsskyldu mótvegis einum hjúnafelaga, sum ikki hevur uppihald á røktarheimi, ellisheimi ella líknandi, skulu gjaldsreglurnar ikki nýtast fyrrenn tryggjað er hjúnafelagnum eina uppihaldsupphædd, sum hevur við sær, at livikor familjunar higartil ikki versna.

*Stk. 2.* Hjúnarfelagin sum ikki hevur uppihald á røktarheimi, ellisheimi ella líknandi, skal saman við egnari inntøku hava eina upphædd eftir til taks, ið svarar til rímiligar fastar útreiðslur, umframt somu upphædd til uppihald, sum ásett er sambært lógini um almenna forsorg.

*Stk. 3.* Er inntøkan hjá hjúnarfelaganum sum ikki hevur uppihald á røktarheimi, ellisheimi ella líknandi hægri enn roknaði fíggjarligi tørvurin eftir stk. 2, verður ongin upphædd ásett.

**§ 7.** Hevur pensjonistur, hvørs pensjón lækkar sambært hesi lóg, uppihalds- ella gjaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár, verður barnaviðbót útgoldin undir somu treytum, sum ásett er sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a..

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um og áseta nærri reglur um, at royndarskipanir kunnu setast í verk, sum víkja frá ásetingunum sambært hesi lóg.

**§ 9.** Fær pensjonistur fyribils uppihald á einum røktar- ella ellisheimi ella øðrum varandi staði, sum kann sammetast við eitt røktar- ella ellisheim, sum umlætting, skal pensjonisturin rinda eitt gjald fyri uppihaldi um samdøgrið frá 43. degi.

*Stk. 2.* Pensjonisturin kann verða til umlætting í mesta lagi 90 dagar í einum álmanakkaári.

*Stk. 3.* Røktar- ella ellisheimið skal boða Almannastovuni frá, tá ein pensjonistur fer til umlætting.

**§ 10.** Upphæddirnar sambært hesi lóg og javning av hesum, verða ásettar í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

**§ 11.** Avgerðir hjá Almannastovuni sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í Almannamálum.

*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

**§ 12.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2000.

Tórshavn, 22. desember 1999

**Anfinn Kallsberg (sign.)**

løgmaður

# Fylgiskjal 4

## LØGTINGSLÓG NR. 70 FRÁ 2. MAI 2001 UM STUDNINGSLÁN ELLIS- OG RØKTARHEIM

**Løgtingslóg nr. 70 frá 02.05.2001**

Nr. 70 2. mai 2001

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Studningslán, sum er rentu og avdrattarfrítt, kann verða latið úr landskassanum til ný- ella umbygging av ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim.

**§ 2.** Studningslánið, sum í hvørjum einstøkum føri verður veitt, er i mesta lagi kr. 500.000 faldað við talinum av íbúgvum, sum heimið er ætlað til, tó ongantið meiri enn helvtina av byggikostnaðinum og avmarkað av teirri til eina og hvørja tið til endamalið avsettu upphæddini á løgtingsfíggjarlógini.

**§ 3.** Treyt fyri at studningslán verður veitt er. at

1) byggietlanin er góðkend av landsstyrinum áðrenn farið verður undir at byggja
2) studningslánið er tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum og
3) viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstyrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara.

**§ 4.** Studningslánið fellir til gjaldingar, um so er, at ognin verður seld, ella ikki longur verður nytt til ellis- og røktarheim.

**§ 5.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2002.

Tórshavn, 2. mai 2001
**Anfinn Kallsberg (sign.)**
løgmaður

# Fylgiskjal 5

## KUNNGERÐ NR.71 FRÁ 27. AUGUST 1998 UM ELDRASAMBÝLI.

---

**Kunngerð nr. 71 frá 27.08.1998**
Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

---


- Kapittul 1 Felags reglur
- Kapittul 2 Eldrasambýlir hjá landinum
- Kapittul 3 Eldrasambýlir hjá kommununum
- Kapittul 4 Gildiskoma


Við heimild í § 32, stk. 4 í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" smbr. lógarkunngerð nr. 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 30. desember 1997, verður fyrisett:

**Kapittul 1**
**Felags reglur**

**§ 1.** Eldrasambýli eru í hesum føri sambýli, ið hýsa fólkapensiónistum við ellisbrekum, ið hava tørv á starvsfólki at hjálpa teimum í dagligu tilveruni.
*Stk. 2.* Í serligum førum kann undantak gerast frá stk. 1, ið loyvir avlamispensiónisti upptøku.
**§ 2.** Heimarøkt verður veitt í eldrasambýlunum sambært lóg fyri Føroyar um almenna forsorg og sambært løgtingslóg um heimasjúkrasystratænastuna.

**Kapittul 2**
**Eldrasambýlir hjá landinum**

**§ 3.** Búfólk rinda fyri húsaleigu, olju, el, mat og til felags útreiðslur.
*Stk. 2.* Fyri uppihald rindar hvørt búfólk kr. 3.100,00 um mánaðin. Fyri hjún, har bæði eru pensiónistar, har annað er á røktarheimi/eldrasambýli, verður gjaldið niðursett til kr. 2.100,00.
*Stk. 3.* Fastbúgvandi búfólk, ið fara í feriu í meira enn 3 dagar, fáa góðskrivað kr. 50,00 um dagin frá 4. degi at rokna.
**§ 4.** Einki depositum verður goldið við innflytan. Um eitt búfólk ynskir at innrætta býlið á ein serligan hátt, kann tó krevjast, at búfólkið rindar depositum fyri møguligar eykaútreiðslur, í sambandi við broytan av býlinum aftur til uppruna stand.
*Stk. 2.* Búfólkið rindar fyri býlið frá fyrsta í mánaðinum aftaná innflutt verður.
*Stk. 3.* Um búfólkið flytur úr býlinum ella andast, skal gjaldast til endan av mánaðinum.
*Stk. 4.* Pensiónistur kann vera til umlætting í mesta lagi 90 dagar í einum ári. Gjaldið fyri umlætting er kr. 90,00 um samdøgrið frá fyrsta degi.
**§ 5.** Felagslutir, ið eru játtaðir sambýlinum sum heild, eru ogn hjá eldrasambýlinum og ikki ogn hjá tí einstaka búfólkinum.
**§ 6.** Avgerð um upptøku, verður tikin av eini upptøkunevnd.
*Stk. 2.* Í upptøkunevndini verða hesi vald:
1. Økisleiðarin í Heimarøktini, ið er formaður.
2. Ein kommunulækni.

3. Eitt umboð, tilnevnt av Ellis- og røktarheiminum. Har einki røktarheim er í økinum, skal lokala heimasjúkrasysturin veljast.

*Stk. 3.* Almanna- og heilsumálastýrið tilnevnir kommunulæknan, sum skal verða í upptøkunevndini.

## Kapittul 3
## Eldrasambýlir hjá kommununum

**§ 7.** Búfólk rinda fyri húsaleigu, olju, el, mat og til felags útreiðslur.
*Stk. 2.* Fyri uppihald rindar hvørt búfólk í mesta lagi kr. 3.100,00 um mánaðin. Fyri hjún, har bæði eru pensiónistar, har annað er á røktarheimi/eldrasambýli, verður gjaldið í mesta lagi kr. 2.100,00.
*Stk. 3.* Einki depositum verður goldið við innflytan. Um eitt búfólk ynskir at innrætta býlið á ein serligan hátt, kann tó krevjast, at búfólkið rindar depositum fyri møguligar eykaútreiðslur, í sambandi við broytan av býlinum aftur til uppruna stand.
*Stk. 4.* Búfólkið rindar fyri býlið frá fyrsta í mánaðinum aftaná innflutt verður.
*Stk. 5.* Um búfólkið flytur úr býlinum ella andast, skal gjaldast til endan av mánaðinum.
**§ 8.** Avgerð um upptøku, verður tikin av eini upptøkunevnd.
*Stk. 2.* Í upptøkunevndini verða hesi vald:

1. Eitt umboð, tilnevnt av kommununi/kommununum, ið er formaður.
2. Ein kommunulækni.

3. Eitt umboð, tilnevnt av Ellis- og røktarheiminum. Har einki røktarheim er í økinum, skal lokala heimasjúkrasysturin veljast.

4. Økisleiðarin í Heimarøktini

*Stk. 3.* Almanna- og heilsumálastýrið tilnevnir kommunulæknan, sum skal verða í upptøkunevndini.
**§ 9.** Tá pensiónistar, sum ikki hava bústað í kommununi, koma á heimið at búgva, krevst ein váttan frá viðkomandi kommunu um at gjalda partvíst til raksturin.
*Stk. 2.* Gjald sambært stk. 1 verður avtalað millum kommunurnar.

## Kapittul 4
## Gildiskoma

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 134 frá 4. desember 1996 um eldrasambýli.

# Fylgiskjal 6

## LØGTINGSLÓG NR. 88 FRÁ 6. JUNI 1997 UM HEIMASJÚKRASYSTRATÆNASTU, SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 82 FRÁ 17. MAI 2000.

---

**Løgtingslóg nr. 88 frá 06.06.1997**
Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

---

**§ 1.** Hendan lóg um heimasjúkrasystrar er givin út sambært § 1 í „lov nr. 316 af 17 maj 1995 om Sundhedsvæsenet på Færøerne":
**§ 2.** Heimasjúkrasystrarnar eru sum starvsbólkur ein partur av heimarøktini. Røktin verður veitt uttan kostnað fyri brúkaran.
**§ 3.** Til hvørt geografiskt øki verða knýttar ein ella fleiri heimasjúkrasystrar. Tó kunnu tvey ella fleiri øki verða í felag um eina heimasjúkrasystir, um umstøðurnar tala fyri tí.
**§ 4.** Landsstýrismaðurin í almannamálum ásetir nærri reglur fyri heimasjúkrasystraskipanina.
*Stk. 2.* Vegleiðing fyri hvussu heimasjúkrasystraskipanin verður løgd til rættis og útint, verður ásett av danska heilsustýrinum.
**§ 5.** Danska heilsustýrið kann áseta reglur viðvíkjandi frágreiðingarskyldu um virksemið sambært hesi lóg.
**§ 6.** [1)] Útreiðslur í sambandi við skipanina í hesi løgtingslóg verða goldnar av landskassanum.
**§ 7.** Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kongalig fyriskipan nr. 14 frá 16. januar 1981 „om ikrafttræden på Færøerne af lov om hjemmesygeplejerskeordninger" við seinni broytingum. Kunngerðir, sum settar eru í gildi við heimild í lógini, sum fer úr gildi, hava framvegis gildi, til tær verða avtiknar við nýggjari kunngerð.

# Fylgiskjal 7

## LØGTINGSLÓG NR. 63 FRÁ 20. MAI 1996 UM ROYNDARSKIPAN INNAN ELDRARØKT Í SANDOYNNI, SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 148 FRÁ 17. DESEMBER 2001.

---

**Løgtingslóg nr. 63 frá 20.05.1996**
Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

---

Samsvarandi samtykt Føroya Løgtings staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:
**§ 1.** [1)] Landsstýrismanninum verður heimilað at seta royndarskipan innan eldrarøkt í verk í Sandoynni. Endamálið við royndartiltakinum er at royna eina skipan, sum sameinir røktarheimsrakstur og heimarøkt.
*Stk. 2.* [1)]Í royndartíðini lata luttakandi kommunur í oynni landsstýrismanninum eindirnar í Skálavík, heima á Sandi og Skopun ókeypis til nýtslu.
*Stk. 3.* [2)] Royndartíðin er sett til 6 1/2 ár, og er galdandi frá 1. juli 1996 og fer úr gildi 31. desember 2002.
**§ 2.** Royndartiltakið verður skipað soleiðis, at røktarheim verður heima á Sandi, meðan eindirnar í Skálavík og í Skopun verða nýttar til eldrasambýlir.
*Stk. 2.* [1)]Royndartiltakið verður rikið sum landsstovnur, og fyriskipað undir Serforsorgini og Heimarøktini, sum hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum.

**§ 3.** [1)] Royndartiltakið inniber, at landsstýrismanninum verður heimilað at áseta reglur, sum kunnu víkja frá ásetingunum í løgtingslógini um uppihald á stovni o.l.
*Stk. 2.* [1)] Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur viðvíkjandi upptøku á stovni og sambýli, gjaldsreglur fyri búfólk, dagligu leiðsluna, fíggjarviðurskifti o.l.

**§ 4.** Kæra um upptøku, gjaldsviðurskifti og aðrar avgerðir hjá leiðsluni av royndarskipanini, ið viðvíkja stakpersónum, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almannamálum, jb. § 6, stk. 3 í løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almannamálum.

**§ 5.** Útreiðslurnar til royndarskipanina verða í fíggjarárinum 1996 hildnar innan fyri játtanirnar til røktarheim og heimarøkt. Frá fíggjarárinum 1997 verður játtan at avseta á serligt rakstrarstað til royndarskipanina.

**§ 6.** Henda lóg fær gildi 1. juli 1996.

# Fylgiskjal 8

Nr. 49 20. apríl

**KUNNGERÐ**

**Um umsorgararbeiði fyri pensjónista**

Við heimild í § 14, stk. 4, nr. 3 í “Lov for Færøerne om folkepension”, smb. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. mars 1998, sum broytt við lóg nr. 742 frá 7. desember 1988, lóg nr. 154 frá 15 mars 1989, lóg nr. 393 frá 20. mai 1992, lóg nr. 1075 frá 23. desember 1992 og lóg nr. 393 frá 22. juni 1993, hevur landsstýrið fyrisett:

§ **1**. Stuðul til umsorgararbeiði kann veitast virksemi, ið stuðlar pensjónistum at verða búgvandi heima, ella sum stimbrar pensjónistum til at gerast virknari.

§ **2**. Umsorgararbeiði eftir § 1 fevnir um avlamis- og fólkapensjónistar og kvinnur yvir 55 ár, ið fáa einkjupensjón eftir § 27 í forsorgarlógini.

§ **3**. Skipanir ella tiltøk, sum stuðla pensjónistum at verða búgvandi í egnum heimi, kunnu t.d. vera vitjanartænastur til pensjónistar, mattænasta, vaskarískipan, fótarøkt o.l.

§ **4**. Skipanir ella tiltøk, sum duga til at gera pensjónistar virknar, eru t.d. pensjónista-fimleikur, undirvísing, fyrilestrar, klubb-arbeiði, tilhaldsstøð við tilboðum av ymiskum slagi, dagtilhald og deyvatultænasta v.m.
**Stk. 2**. Stuðul kann eisini veitast til undirhaldandi tiltøk, so sum útferðir, veitslur, film, sjónleik o.l.

§ **5**. Umsorgararbeiði kann við góðkenning frá Almannastovuni setast í verk av felagsskapum, stovnum, kommunum ella øðrum.
Eisini kann Almannastovan avgera, at umsorgararbeiði kann verða sett í verk sum sjálvstøðug skipan ella tiltak.

§ **6**. Stuðul verður veittur til at seta virksemi í verk umframt rakstur av virkseminum.
**Stk. 2**. Pensjónisturin rindar sjálvur fyri tað, sum hann nýtur í sambandi við virksemið (t.d. lutir til tilvirkan), og tað, sum hann fær gjøgnum skipanina (t.d. mat, viðgerð).

§ **7**. Almannastovan ger nærri reglur fyri hvørja einstakan skipan og tiltak.

§ **8**. Stuðul til koyritænastu til pensjónistar, kann bert veitast, tá ið hesir ikki hava møguleika at nýta almenn flutningstól. Í sambandi við stuðul skal pensjónisturin sjálvur rinda fyri tað eitt mánaðarkort kostar við almennum flutningstóli.

§ **9**. Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørdFØROYA LANDSSTÝRI, 20. apríl 1994

**Jóannes Eidesgaard** (sign.)
Landsstýrismaður

/Nella Festirstein (sign.)

# Fylgiskjal 9

## LØGTINGSLÓG NR. 64 FRÁ 5. JUNI 1984 UM SAMSÝNING FYRI AT ANSA ELDRI OG ÓHJÁLPNUM HEIMA SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 52 FRÁ 28. APRÍL 2000.

---

**Løgtingslóg nr. 64 frá 05.06.1984**
Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

---

**§ 1.** Úr landskassanum verður veitt viðurlag til fólk, sum átaka sær at ansa eldri og óhjálpnum fólki heima, tá tørvur er á støðugari røkt og hjáveru.
*Stk. 2.* [1] Samsýningin er tann sama sum miðal fyritíðarpensjón.
*Stk. 3.* Viðurlagið er treytað av, at móttakarin ikki í størri mun átekur sær annað lønandi arbeiði.
*Stk. 4.* Viðurlagið heldur uppat, um tann óhjálpni verður innlagdur á sjúkrahús í meir enn ein mánað.
**§ 2.** [1] Lógin verður umsitin av Almannastovuni.
*Stk. 2.*[2] Avgerðir, sum verða tiknar av Almannastovuni, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri Kærunevndina í almannamálum, sum hevur endaligu fyrisitingarligu avgerðina.
*Stk. 3.* [1] Landsstýrismaðurin setir nærri reglur fyri, hvussu hendan lóg verður umsitin.
**§ 3.** Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1984.

# Fylgiskjal 10

## REGLUGERÐ FYRI SERFLUTNINGSSKIPAN LANDSINS

### NORÐOYGGJAR

## Reglugerð.

### Grein 1. Endamálið.
Endamálið við skipanini í Norðoyggjum, er at veita flutningstilboð fyri brekað í Norðoyggjum, íð eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól.

Skipanin umfatar ikki sjúkraflutning.

Brekað, íð hava tørv á serflutningi, eru fólk, sum:
1 – sita í koyristóli ella nýta líknandi hjálpitól
2 – vegna likamliga brek støðugt hava brúk fyri hjálp
3 – eru blind
4 – í avmarkaða tíð, vegna sjúku ella skaða hava henda tørv.

### Grein 2. Umboð í Stýrisbólkin.
Klaksvíkar býráð velur eftir hvørt býráðsval umboð fyri Norðoyggjar ein lim í Stýrið fyri Serflutningsskipan Landsins.

#### Grein 3. Umsiting.

Dagligu umsitingina av skipanini í Norðoyggjum hevur Klaksvíkar kommuna.

#### Grein 4. Brúkarin.

Tey, íð ynskja at nýta skipanina, venda sær til Almannastovuna – Norðoya Deild. Almannastovan – Norðoya Deild, íð visiterar brúkaran, útvegar loyvi til brúkarin og fær loyvi frá brúkaranum at útvega sær neyðugar upplýsingar frá lækna og serlækna.

#### Grein 5. Flutningstólið.

Klaksvíkar kommuna eigur, koyrir og røktar bussin.

#### Grein 6. Flutningsgjald.

Flutningsgjaldið er sambært Serflutningsskipan Landsins 45% til landið, 45% til kommununa og 10% til brúkarin. Partur brúkaranna er í Norðoyggjum 10 kr. pr. túr.

Tórshavn, tann /

**Klaksvíkar kommuna:** **Føroya Landsstýrið:**

_________________________ _________________________

# Fylgiskjal 11

## LØGTINGSLÓG NR. 111 FRÁ 3. OKTOBER 1988 UM VARDAR ÍBÚÐIR / BESKYTTEDE BOLIGER.

**Løgtingslóg nr. 111 frá 03.10.1988**

**§ 1.** Eftir reglunum í hesi lóg verður studningur latin til vardar íbúðir, sum hava til endamáls at hýsa avlamisfólki og eldri fólki, og fólki annars, sum tørva at búgva í vardum umhvørvi, og tryggja teimum eitt gott og hóskandi tilhald.

**§ 2.** Studningur verður latin til:

1) Bygging av nýggjum vardum íbúðum.
2) Keyp og umbygging av verandi bygningum til vardar íbúðir.
3) Rakstrarstudning til rentur og avdráttir.

**§ 3.** Studningur kann veitast upp til 40% av byggikostnaðinum ella av keypsprísi og umbyggingarkostnaði.

**§ 4.** Studningur verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán við pantirætti í ognini innanfyri 90% av virðinum.

**§ 5.** Í rakstrarstudningi kann veitast upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum.

**§ 6.** Studningurin verður latin til stovnar, sum einans hava til endamáls at byggja (stovnseta) og reka vardar íbúðir. Stovnurin skal vera sjálveigandi stovnur og hava viðtøkur, sum eru góðkendar av landsstýrinum.

*Stk. 2.* Verða vardu íbúðirnar ikki longur nýttar til endamálið, ella seldar, fellur ognin/nettosøluprísurin til landskassan, og ger landsstýrið av, hvussu ognin/peningurin skal nýtast.

**§ 7.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

# Fylgiskjal 12

## LØGTINGSLÓG NR. 118 FRÁ 18. JUNI 1997 UM HÚSALÁNSGRUNN O.A

---

**Løgtingslóg nr. 118 frá 18.06.1997**
Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

---


- Kap. 2 Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin
- Kap. 3. Íbúðagrunnurin
- Kap. 4. Rentustudning til samansparing til sethúsabygging o.a.
- Kap. 5 Felags reglur
- Kap. 6 Skiftisreglur


**§ 1.** Húsalánsgrunnurin hevur til endamáls at veita lán til sethús- og íbúðabygging og keyp.
**§ 2.** Grunnurin er undir eftirliti landsstýrismansins.
**§ 3.** Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 4 ár. Landsstýrismaðurin tilnevnir samstundis tiltakslimir fyri sama tíðarskeið fyri einstøku stýrislimirnir.
*Stk. 2.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni.
*Stk. 3.* Stýrið setir stjóra at taka sær av dagligu um- og fyrisitingini og ásetir við landsstýrisins góðkenning hansara lønar- og setanartreytir.
**§ 4.** Grunninum er heimilað við heimild í løgtingslóg í hvørjum einstøkum føri at taka lán. Grunnurin kann tó við landsstýrismansins góðkenning taka lán í Føroyum.
**§ 5.** Húsalánsgrunnurin kann veita hesi lán:
1. Stuttfreistað lán at keypa grundøki.
2. Byggilán at byggja ella umbyggja nýggj sethús og íbúðir, avmarkað til ta upphædd, ið grunnurin veitir sum veðskuldarlán.
3. Veðskuldarlán til nýggj sethús og íbúðir.
4. Veðskuldarlán at keypa sethús ella íbúð.
5. Veðskuldarlán til endurnýggingar, umbyggingar og bjálving av sethúsum og íbúðum.

**§ 6.** Landsstýrismaðurin ásetir eftir uppskoti frá stýrinum nærri reglur í kunngerð um treytir fyri lánsveiting sambært § 5 umframt lánstreytir annars.
**§ 7.** Húsalánsgrunnurin og stýrið fyri Húsalánsgrunnin um- og fyrisitur eisini Bjálvingarstuðulslánsgrunnin, Íbúðagrunnin og skipanina við rentustudningi til samansparing til sethúsabygging.
*Stk. 2.* Stjórin bindur stovnarnar sambært stk. 1 við sínari undirskrift. Til upptøku av láni, keyp og sølu av fastari ogn, veðseting og borgan krevst tó eisini undirskrift formansins ella undirskrift frá 2 stýrislimum. Stýrið kann veita stjóranum fulltrú at binda stovnarnar í einstøkum føri ella í øllum líknandi føri.
*Stk. 3. A*vgerðir, sum Húsalánsgrunnurin hevur tikið, kunnu kærast til stýrið fyri Húsalánsgrunnin. Tílík kæra skal vera skrivlig og framkomin til stýrið innan 4 vikur eftir, at Húsalánsgrunnurin hevur fráboðað avgerð sína.

**Kap. 2**
**Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin**

**§ 8.** Endamál grunsins er at veita stuðulslán til bjálving og orkusparandi tiltøk til njótandi avlamis-, einkjufólka- og fólkapensionistar, sum búgva í egnum húsum ella

íbúð.
*Stk. 2.* Egin hús ella íbúð eru at skilja sum hús ella íbúð, ið bert viðkomandi pensionistur og/ella hjúnafelagin er eigari av sambært tingbókini.
*Stk. 3.* Tá ið persónur sambært § 8, 1. og 2. stk., hevur avhendað hús ella íbúð til onnur enn tey, ið rætt hava til bjálvingarstuðulslán, og persónurin býr í ognini og hevur tryggjað sær rætt til lívslangan bústaðarrætt við tinglýstum servitutti í somu ogn, kann bjálvingarstuðulslán veitast, men tá uttan avdráttar- og rentufrítøku, sí § 9, stk. 3.
*Stk. 4.* Yvirtakarin skal fráboðað Húsalánsgrunninum um yvirtøkuna, og verður renta roknað frá veruliga yvirtøkudegnum, ognarbrævsins innlating til tinglýsing ella tí degi, ið kemur fyrst eftir lánsupptøkuna.
**§ 9.** Bjálvingarstuðulslán eru avdráttar- og rentufrí.
*Stk. 2.* Avdráttar- og rentufrítøka heldur fram, um pensionistur doyr, og einkjan ella einkjumaðurin situr í óskiftum búgvi, sjálvt um viðkomandi ikki er pensionistur.
*Stk. 3.* Tá ið pensionistur, sum sambært § 8, stk. 1, hevur fingið játtað/veitt bjálvingarstuðulslán, doyr, kunnu børn og barnabørn hansara yvirtaka lánið og rinda tað aftur sambært reglum ásettar í kunngerð.
*Stk. 4.* Tá ið onnur enn børn og barnabørn hjá pensiónisti sambært § 8 yvirtaka hús ella íbúð, sum bjálvingarstuðulslán er játtað/veitt til, skal lánið alt rindast aftur í einum.
*Stk. 5.* Um tann, ið yvirtekur húsini ella íbúðina er pensionistur kann loyvi verða givið til, at avdráttar- og rentufrítøka heldur fram.
*Stk. 6.* Avdráttar- og rentufrítøkan heldur uppat, tá ið viðkomandi ikki longur er pensiónistur smbr. § 8 stk. 1 - um orsøkin til hetta ikki eru inntøkuviðurskifti - og tá ið viðkomandi doyr. Um einkjufólk heldur uppat at fáa einkjufólkapensión, tí viðkomandi fær aðra pensión smbr. § 8, stk. 1, heldur avdráttar- og rentufrítøkan fram.
**§ 10.** Tá ið pensionistur fær varandi uppihald á einum eldrasambýli ella ellis- og røktarheimi, og húsini ella íbúðin hjá viðkomandi verða nýtt av øðrum enn hjúnafelagnum, heldur avdráttar- og rentufrítøkan uppat.
*Stk. 2.* Um pensionistur og møguligur hjúnafelagi flyta úr viðkomandi húsum ella íbúð, kann støða takast til, um avdráttar- og rentufrítøkan skal halda uppat.
**§ 11.** Bjálvingarstuðulslán verða tryggjað við upprykkjandi tinglýstum veðrætti í viðkomandi føstu ogn.
*Stk. 2.* Veðhavari er Bjálvingarstuðulsgrunnurin.
**§ 12.** Bjálvingarstuðulslán til eini hús ella íbúð kann hægst vera kr. 110.000 til útreiðslurnar av sjálvari bjálvingini/orkusparingini íroknað meirvirðisgjald (mvg). Harafturat kunnu leggjast útreiðslur til kanningar og eftirlit, tinglýsing, veðhavaralýsing og byggirentur.
**§ 13.** Áðrenn umsókn um bjálvingarstuðulslán verður játtað, verða húsini ella íbúðin kannað av metingarfólki Húsalánsgrunsins.
*Stk. 2.* Metingarfólkini gera meting um tørvin á bjálvingartiltøkum, uppsett í raðfylgju eftir tørvinum, saman við kostnaðarætlan fyri hvørt einstakt tiltak.
*Stk. 3.* Tað er ein treyt fyri gjalding av bjálvingarstuðulsláni, at metingarfólkini hava váttað, at bjálvingin er gjørd samsvarandi fyriskrivaðum reglum, sum stýrið hevur staðfest í tekniskari reglugerð.
*Stk. 4.* Um so er, at viðkomandi pensionistur sjálvur heilt ella partvíst útinnir sjálvt arbeiðið við bjálvingini, kann hetta ikki íroknast útreiðslurnar.
**§ 14.** Almannstovan hevur upp á fyrispurning frá Húsalánsgrunninum skyldu at upplýsa um umsøkjarin er pensionistur og um viðurskifti hansara sambært § 8, stk. 1

og 6, og § 10, stk. 1.
*Stk. 2.* Tá ið bjálvingarstuðulslán er veitt, og grunnurin hevur fráboðað Almannastovuni hetta, skal Almannastovan upplýsa Húsalánsgrunninum, tá ið broytingar fara fram í fortreytunum fyri avdráttar- og rentufrítøku.
**§ 15.** Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin fær árliga játtan á fíggjarløgtingslógini. Peningur, sum kemur inn sum rentur og avdráttur, fer í Bjálvingarstuðulslánsgrunnin.
*Stk. 2.* Tá ið bjálvingarstuðulslán er játtað, og treytirnar annars eru loknar, kunnu útreiðslurnar til byggikreditt verða játtaðar sum fyribilslán. Somuleiðis kunnu hesar útreiðslur játtast sum fyribilslán í øðrum peningastovnum, meðan bjálvingin verður gjørd, til bjálvingarstuðulslánið verður útgoldið.

## Kap. 3.
## Íbúðagrunnurin

**§ 16.** Endamál grunsins er at fremja og stuðla kommunum, feløgum og stovnum at útvega og reka íbúðahús.
*Stk. 2.* Íbúðagrunnurin veitir lán til íbúðafeløg og íbúðastovnar, sum sambært hesi lóg eru góðkend til at fáa fígging úr íbúðagrunninum.
**§ 17.** Stovnsfæ íbúðagrunsins er tann peningur, sum játtaður verður á fíggjarløgtingslógini.
*Stk. 2.* Íbúðagrunninum er heimilað at upptaka neyðug lán til fígging av íbúðahúsum.
**§ 18.** Bert feløg, sum skipað eru sum sjálvsognarstovnur ella lutafelag kunnu góðkennast sambært hesi lóg. Íbúðagrunnurin ella kommunur kunnu sjálv seta á stovn tílík íbúðafeløg ella stovnar.
*Stk. 2.* Endamal felagsins skal vera at útvega og reka íbúðahús. Í sjálvsognarstovni hevur íbúðagrunnurin og/ella heimstaðarkommunan rætt til at velja lim(ir) í nevndina.
*Stk. 3.* Viðtøkur og broytingar í viðtøkum hjá íbúðafeløgum og stovnum skulu góðkennast av Húsalánsgrunninum.
*Stk. 4.* Húsalánsgrunninum verður heimilað at krevja broytingar í áður góðkendum og galdandi viðtøkum, og landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um viðtøkur felaganna/stovnanna um roknskap herundir avseting í grunn, nýtslu av yvirskoti, framløgu og grannskoðan av roknskapi.
**§ 19.** Søla, avhending ella broyting av ognunum má ikki fara fram uttan samtykki stýrisins. Heldur ikki má ognin veðsetast uttan loyvi, undantikið upprunaligu veðsetingini við byggiláninum ella endaligu veðsetingini ella veðbrævi til íbúðagrunnin. Hús, bygd til leiguíbúðir kunnu seinni við góðkenning stýrisins vera sundurbýtt í eigaraíbúðir.
**§ 20.** Áðrenn farið verður undir bygging ella keyp skal stýrið góðkenna byggiætlanir, støðd av íbúðum, kostnaðarætlan, fíggingar ætlan o.tl.
*Stk. 2.* Einki keyp má gerast ella arbeiði byrjast, fyrrenn góðkenning Húsalánsgrunsins fyriliggur.
**§ 21.** Íbúðir, ið lán verður veitt til, eiga at vera útvegaðar so ódýrt sum gjørligt, samstundis sum tær skulu hava allar neyðugar hentleikar.
*Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð eftir uppskoti frá stýrinum fyri Húsalánsgrunnin at áseta nærri reglur um íbúðastøddir, og hvat lán frá Íbúðagrunninum fevnir um.
**§ 22.** Í íbúðahúsum við leiguíbúðum verður gjørdur leigusáttmáli. Leigan skal ásetast soleiðis, at hvør einstøk deild hevur møguleika at bera sínar rakstrarútreiðslur, t.v.s. renting, avskriving, fyrisiting og viðlíkahald.
*Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður heimilað eftir uppskoti frá stýrinum fyri

Húsalánsgrunnin at áseta nærri reglur um leigugjald, innskot fra leigarunum og umvælingar í sambandi við, at flutt verður úr íbúð.
**§ 23.** Í íbúðahúsum við íbúðum, sum ætlaðar eru til sølu beinanveg ella seinni, skal í viðtøkunum frammanundan vera skilliga sagt frá hesum, eins og í viðtøkunum skal vera gjørt av, hvussu sølupeningurin skal nýtast, og um víðari søla kann fara fram og tá undir hvørjum treytum.
*Stk. 2.* Stýrið kann seta sum treyt fyri góðkenning av viðtøkunum, at íbúðirnar ikki verða seldar fyrrenn aftaná ávíst áramál sum leiguíbúðir.
**§ 24.** Til keyp ella bygging av íbúðahúsum lænir grunnurin 20%, og felagið/stovnurin útvegar 15% av virðinum sum eginpening.
*Stk. 2.* Lánini úr íbúðagrunninum verða veitt sum kontantlán. Lánini skulu hava upprykkjandi veðrætt. Upphæddirnar saman við frammanfyri verandi veðrættindum skulu tryggjast við fullgóðum veðrætti innan fyri metingarvirðið. Metingarvirðið er at skilja sum virðið, mett av metingarfólki Húsalánsgrunsins.
*Stk. 3.* Landsstýrismanninum verður heimilað eftir uppskoti frá stýrinum fyri Húsalánsgrunnin at áseta í kunngerð reglur viðvíkjandi eginpeningi, lánsupphædd og afturgjaldingartreytum.

## Kap. 4.
## Rentustudning til samansparing til sethúsabygging o.a.

**§ 25.** Endamálið er at veita rentustudning úr landskassanum til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging ella keyp og til at keypa grundstykki til sethúsa- ella íbúðabygging.
**§ 26.** Samansparingin verður soleiðis, at innskot verður sett inn á eina serstaka sparikonto í einum føroyskum peningastovni.
*Stk. 2.* Ein slík konto kann bara av sama persóni stovnast einaferð og vera ein og sama konto, tó kann henda eina og sama konto flytast eftir samtykki og skrivligum boðum Húsalánsgrunsins í annan peningastovn eftir áheitan kontohavarans.
*Stk. 3.* Í heilt serstøkum føri kann gerast undantak í sambandi reglurnar í stk. 2.
*Stk. 4.* Hevur eigarin ikki nýtt samansparda peningin sambært endamálinum í § 25 í samansparingartíðini, verður samansparda upphæddin útgoldin eigaranum uttan rentustudning og rentu av rentustudningi eftir boðum og uppgerð Húsalánsgrunsins.
**§ 27.** Einans tey, ið eru undir fullari skattskyldu í Føroyum og eru fylt 16 ár, tá ið peningurin verður settur inn, kunnu koma undir rentustudningsskipanina.
*Stk. 2.* Innskot, t.v.s. penningur, sum verður settur inn á sparikonto, kann í mesta lagi verða kr. 30.000,00 í einum kalendarári.
**§ 28.** Rentustudningur verður veittur við, at renta 3% p.a. verður tilskrivað samlaða innskotinum (saldo).
*Stk. 2.* Rentustudningur verður veittur í mesta lagi í 8 ár, tó kann eigarin søkja Húsalánsgrunnin um skáa í eitt ár í senn, grundað á útbúgving.
*Stk. 3.* Húsalánsgrunnurin roknar rentustudningin samstundis sum peningastovnarnir annars tilskriva rentu, og boðar Húsalánsgrunnurin peningastovnunum og Føroya Gjaldstovu frá rentustudningsupphæddini.
**§ 29.** Tá ið rentustudningur fyrstu ferð er tilskrivaður, hevur eigarin ikki ræði á innskotinum, rentu ella tilskrivaða rentustudninginum, uttan tá ið hesar upphæddir próvfast verða nýtt sambært endamálinum í § 25, og skrivligt samtykki og fráboðan um uppgerð frá Húsalánsgrunninum er peningastovninum tøk fyri útgjalding.
*Stk. 2.* Fíggjarúttøka ella útpanting kunnu ikki verða gjørdar í kontoina, hald kann ikki leggjast á kontoina, eins og kontoin verður hildin uttan fyri trotabúarviðgerð og skuldarumskipan.

*Stk. 3.* Undantøkan sambært stk. 2 fellur burtur, tá ið 2 ár eru liðin síðan tíðarskeiðið í § 28, stk. 2, er rokkið, og samstundis fellur allur rentustudningurin aftur til landskassan.
*Stk. 4.* Um samanspararin og eigarin av føstu ognini ikki er sami persónur, skal samanspararin skrivliga vátta mótvegis Húsalánsgrunninum, at hann/hon gevur samtykki til hesa flyting og sleppur øllum fíggjarkrøvum mótvegis Húsalánsgrunninum/landskassanum.
*Stk. 5.* Verður samansparingin givin leys í úrtíð, skal rentustudningurin og renta av rentustudninginum gjaldast landskassanum aftur sambært skrivligum samtykki og uppgerð Húsalánsgrunsins er peningastovninum tøk fyri útgjalding.
**§ 30.** Stýrið fyri Húsalánsgrunnin ger uppskot og landstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um hesi viðurskifti:
1) Skái vegna útbúgving
2) Mannagongdir í sambandi við stovning og leysgeving av uppsparingarkontoini.

## Kap. 5
## Felags reglur

**§ 31.** Roknskaparár Húsalánsgrunsins, Bjálvingarstuðulslánsgrunsins, íbúðagrunsins og fyri skipanina við rentustudningi til samansparing til sethúsabygging er álmanakkaárið.
*Stk. 2.* Roknskapirnir sambært 1. stk. verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara.
*Stk. 3.* Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins.
**§ 32.** Húsalánsgrunnurin, Bálvingarstuðulslánsgrunnurin, Íbúðagrunnurin og skipanin við rentustudningi til samansparing til sethúsabygging hefta hvør sær við ognum sínum mótvegis sínum áognarum.
**§ 33.** Lán, stuðulslán ella stuðul sambært hesi lóg verða latin í tráð við metta fíggjarorku grunnanna.
*Stk. 2.* Húsalánsgrunninum verður heimilað at meta um afturgjaldingarevni umsøkjaranna og við støði í hesum at taka avgerð um lánsumsókn, eins og lán skulu tryggjast við fullgóðum veðrætti.
*Stk. 3.* Heimilað verður Húsalánsgrunninum at gera endaliga upp við skuldarar, eftir at eingin trygd ella ogn er eftir at fáa fulnað í, og inntøkur og væntaðar inntøkur skuldarans ikki verða mettar at megna at afturrinda skuldina.
**§ 34.** Stýrið fyri Húsalánsgrunnin reikar fyri, at týðandi avgerðir, tiknar eru sambært hesi lóg á hvørjum ári verða festar á blað, og a1ment atkomiligar, samstundis sum roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum.
**§ 35.** Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina og løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisiting galda ikki fyri fyrisiting sambært hesi lóg. Tó eru ásetingarnar í § 3 í løgtingslógini um fyrisiting um ógegni galdandi fyri alt fyrisitingarvirksemi sambært hesi lóg.
**§ 36.** Grunnarnir og skipanin um rentustudning til samansparing til sethúsabygging eru leys av øllum skatti og avgjøldum til land og kommunu.

## Kap. 6
## Skiftisreglur

**§ 37.** Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi:
1) Løgtingslóg nr. 97 frá 01.11.1978 um Húsalánsgrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 13.06.1995.

2) Løgtingslóg nr. 40 frá 07.05.1991 um bjálvingarstuðul til pensionistar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 29 frá 14.02.1995.
3) Løgtingslóg nr. 65 frá 13.06.1995 um endurstovnan av íbúðagrunninum.
4) Løgtingslóg nr. 85 frá 24.10.1978 um rentustudning til samansparing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 10.05.1994.

*Stk. 3.* Ognir íbúðagrunsins, sum gjørdust landskassaogn við løgtingslóg nr. 33 frá 27.03.1992 um avtøku av landskassagrunnum, verða fluttar aftur sum ogn íbúðagrunsins við gildi frá 07.04.1992, og samstundis fellur burtur tann pr. 31.12.1991 óútgoldni landskassastuðul til íbúðagrunnin.

# Fylgiskjal 13

## Kanning av røktar - og bústaðartørvinum á eldraøkinum.

**Umráði: Øki 1 ❑ Øki 3 ❑ Øki**
**5 ❑**
**Øki 2 ❑ Øki 4 ❑ Øki**
**6 ❑**

**Føðingardagur: dagur__________ ár_______**

**Býur/bygd ______________**

**Kyn: Maður ❑**
**Kvinna ❑**

## Hvørjum tilboð er tørvur á:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | **Røktarheimi.** | | |
| 2. | **Demensheimi/Deild.** | | |
| 3. | **Sambýli.** | | |
| 4. | **Vardari íbúð.** | | |
| 5. | **Dagstovni.** | | |
| 6. | **Náttilhaldi.** | | |
| 7. | **Umlæting.** | | |
| 8. | **Heimarøkt.** | Bólkur 1 | |
| | | Bólkur 2 | |
| | | Bólkur 3 | |
| | | Bólkur 4 | |
| 9. | **Uppvenjing.** | | |
| 10. | **Mattænastu.** | | |

**Er tørvur á bráfeingis tilhaldi í umráðnum? Ja❑ Nei ❑**

**Um svarið er ja, hvussu nógvum plássum er tørvur á? ___**

**<u>Viðmerkingar</u>** Um fólk verða Skrásett at hava tørv á tilboðunum ;- 1 ella 2 røktarheimi /demensheimi - so verða hesi fólk ikki mett at hava onnur tiboð fyri neyðini. So um krossur verður settur við 1 ella 2 skal bert tann eini krossurin setast.

Hini tilboðini kunnu verða samansett. Til dømis kan eitt fólk hava tørv á heimahjálp og umlætting, og eitt annað á mattænastu og náttilhaldi. Í slíkum føri kunnu fleiri krossar setast.

Tað er umráðandi í samband við metingina at halda fast um virðisgrundarlagi "sum longst í egnum heimi". Tað kann verða, at fólk sum í dag standa á bíðilista til eitt røktarheimspláss, høvdu kunna klára seg við til dømis náttilhaldi og heimarøkt. Um so er skullu hesi fólk eisini skrásetast undir hesum tilboðum. Røktarheimspláss eigur at verða seinasti útvegur.

**<u>Viðmerkingar til røktartilboð:</u>**

Ad.1: Her verður hugsað um fólk sum hava tørv á røkt alt døgnið. Um so er at fólk verða skrásett at hava hendan tørvin, so skullu tey ikki skrásetast aðrastaðni í talvuni.

Ad.2: Her verður hugsað um fólk sum hava tørv á røkt/hjáveru alt døgnið. Um so er at fólk verða skrásett, at hava henda tørvin, so skullu tey ikki skrásetast arðastaðni í talvuni.

Ad.3: Her verður hugsað um fólk sum skullu verða partvís sjálvhjálpin, og sum ikki hava døgnrøkt fyri neyðini. Somuleiðis eigur hetta at verða eitt tilboð fyri fólk sum ikki kunna og/ella ynskja at búgva einsamøll.

Ad.4: Her verður hugsað um fólk, sum orsaka av likamligum brekum/veikleikum ikki kunna búgva í einum vanligum húsum.

Ad.5: Her verður hugsað um fólk sum í ein ávísan mun eru sjálvhjálpin, og sum hava tørv á sosialari samveru, ítrivi og menning.

Ad.6: Her verður hugsað um fólk, sum ikki vilja/tora at verða eisamøll um náttina, men sum aðrar tíðir á døgninum í stóran mun eru sjálvhjálpin.

Ad.7: Her verður hugsað um fólk, sum hava tørv á umlæting í eitt ávíst tíðarskeið, men sum annars kunnu verða heima.

Ad:8: Her verður hugsað um fólk, sum hava tørv á heimarøkt í egnum heimi ella á sambýli.Brúkarin verður bólkaður eftur tyngd, í samsvar við tær klassifikatónreglur, sum nýttar verða í heimarøktini.

Ad.9: Her verður hugsað um fólk, sum hava likamliga/mentala uppvenjing og viðlíkahald fyri neyðini. Orsøkinar kunnu verða apopleksi, osteoporose, giktsjúkur, afasi o.a.

Ad.11: Her verður hugsað um fólk, sum ikki megna at standa fyri egnari matgerð

Fylgiskjal 14

# Úrslit av tørvskanning

| | Tørvur á røktarbústaðarplássum | | | | | | | | | | Tørvur á heimarøkt | | | | | Tørvur: Onnur tilboð | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Øki | Samlaður røktarheimstørvur | Hevur røktarheimspláss | **Røktarheimstørvur** | Samlaður tørvur á heimið/deild fyri minnisveik | Hevur pláss á heimið/deild fyri minnisveik | **Tørvur á heimið/deild fyri minnisveik** | Samlaður tørvur á eldrasambýlið | Hevur sambýlispláss | **Tørvur á sambýlisplássum** | Samlaður tørvur á røktarbípláss um | **Bólkur 1** | **Bólkur 2** | **Bólkur 3** | **Bólkur 4** | **Tilsamans** | Vard íbúð | Dagstovnatilboð | Hevur dagstovnatilboð | Náttartilhald | Umlættingar-pláss | Umlætting | Uppvenjingar-tilboð | Mattænasta | GerontoPsykiatri |
| 1 | 99 | 40 | **59** | 28 | 16 | **12** | 78 | 34 | **44** | 115 | 161 | 35 | 16 | 6 | 218 | 22 | 30 | 26 | 8 | 11 | 25 | 17 | 23 | 7 |
| 2 | 48 | 22 | **26** | 24 | 10 | **14** | 26 | 24 | **2** | 42 | 95 | 64 | 17 | 4 | 180 | 8 | 49 | 0 | 16 | 2 | 25 | 45 | 59 | 6 |
| 3 | 70 | 51 | **19** | 28 | 0 | **28** | 29 | 20 | **9** | 56 | 107 | 50 | 39 | 14 | 210 | 23 | 65 | 0 | 3 | 11 | 39 | 61 | 35 | 1 |
| 4 | 46 | 42 | **4** | 24 | 0 | **24** | 31 | 11 | **20** | 48 | 106 | 63 | 24 | 6 | 199 | 22 | 44 | 0 | 26 | 5 | 31 | 25 | 57 | 0 |
| 5 | 38 | 28 | **10** | 26 | 0 | **26** | 31 | 25 | **6** | 42 | 43 | 26 | 4 | 5 | 78 | 12 | 17 | 0 | 6 | 2 | 9 | 12 | 14 | 0 |
| 6 | 14 | 10 | **4** | 15 | 0 | **15** | 7 | 13 | **-6** | 13 | 33 | 22 | 3 | 1 | 59 | 2 | 20 | 0 | 10 | 1 | 7 | 8 | 14 | 0 |
| Tils. | 315 | 193 | **122** | 145 | 26 | **119** | 202 | 127 | **75** | 316 | **546** | **262** | **103** | **36** | **947** | **89** | **225** | **26** | **69** | **32** | **136** | **168** | **202** | **14** |